| **Býráðsfundur**<br>26. november 2020 | Blað nr.: 1093 |
| --- | --- |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 26. november 2020 **Kl**. 18:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 267/20-291/20

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 267/20 | 20/00205-1 | Mál beind í nevndir 2020 | 1096 |
| 268/20 | 20/04410-1 | Rampur til Erlu Kongsdóttir í Tórshavn og Nólsoy | 1098 |
| 269/20 | 18/02670-1 | Møguligt keyp av trøð í Hoydølum. Matr.nr. 16b, Hoyvík. | 1101 |
| 270/20 | 20/01753-2 | Matr.nr. 1160f, Tórshavn. Sp/f Berg Hestar. | 1104 |
| 271/20 | 20/01519-2 | Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður. | 1107 |
| 272/20 | 17/01053-1 | Integratión, samskipan og átøk | 1110 |
| 273/20 | 17/01361-1 | Listaverkstøð í Finsen | 1126 |
| 274/20 | 20/03974-1 | Frágreiðing um normering á dagstovnaøkinum | 1140 |
| 275/20 | 20/04037-1 | Ábøtur á venjingarrúm í Høllini á Hálsi | 1143 |
| 276/20 | 20/03596-1 | Navn til p-økið við Mortansstovubrekku | 1145 |
| 277/20 | 18/03914-1 | Uppskot at velja uttanhýsis umboð fyri kommunustýrið í tvey skúlastýri | 1146 |
| 278/20 | 20/04321-1 | Bátahylur í Álakeri - gøta á brimgarð | 1149 |
| 279/20 | 15/02638-18 | Kommunuætlanin | 1151 |
| 280/20 | 20/03248-5 | Umsókn um byggiloyvi til Ovasavn á matr. nr. 92a og 19, Nólsoy | 1160 |
| 281/20 | 20/01016-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt á Glyvursnesi, matr. nr. 2a og 2c, Kirkjubøur | 1163 |
| 282/20 | 20/02249-2 | Nýggj umsókn um broyting av byggisamtykt til útstykking á matr. nr 83a, Hvítanes | 1165 |
| 283/20 | 20/01446-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Sílagøtu, matr. nr. 803f, Tórshavn | 1168 |
| 284/20 | 20/00199-3 | Umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til KOKS | 1171 |
| 285/20 | 20/00775-1 | Kunngerð um súkklandi á gongubreyt - broytingaruppskot | 1176 |
| 286/20 | 18/03628-9 | Persónsupplýsingartrygd í Tórshavnar Kommuna | 1180 |
| 287/20 | 20/03416-1 | Fíggjarætlan 2021, Tórshavnar kommuna | 1183 |
| 288/20 | 20/03794-1 | Eykajáttan oktober 2020 | 1193 |
| 289/20 | 20/04370-1 | Eykajáttan november 2020 | 1196 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 290/20 | 20/00203-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020 | 1199 |
| 291/20 | 17/02798-12 | Føroyskt Íslandsrossafelag : Umsókn um víðkan av øki felagsins við Kráarheygg í Havnardali (2006-0321) | 1202 |

**Til viðgerðar**

# 267/20 Mál beind í nevndir 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 3/20 | 20/00205-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 25/20 | 20/00205-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 63/20 | 20/00205-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 87/20 | 20/00205-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 131/20 | 20/00205-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 182/20 | 20/00205-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 214/20 | 20/00205-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 267/20 | 20/00205-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. november 2020 | Blað nr.: 1097 |
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

# 268/20 Rampur til Erlu Kongsdóttir í Tórshavn og Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 24.11.2020 | 84/20 | 20/04410-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 295/20 | 20/04410-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 268/20 | 20/04410-1 |

**Upprunin til málið:**
Strandfaraskip Landsins hava keypt eitt nýtt skip, sum m.a skal brúkast sum avloysaraskip á Nólsoyarleiðini, tá Ternan ikki er í sigling.

Avloysaraskipið er bygt soleiðis, at tað kann ikki brúka verandi atløgupláss í Nólsoy og Tórshavn.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin var, at skipið skuldi koma fyrr í ár, og so skuldi takast støða til, hvørjar møguligar tillagingar skuldu gerast á atløguplássini. Um skipið hevði komið til tíðina, hevði rúm tíð verið at gjørt tillagingar, til skipið skuldi brúkast sum avloysaraskip.

Skipið hevur ein stutta rampu framman, sum skal brúkast til bæði fólk og bilar. Gronin á skipinum skal siglast inn móti kaisíðuni, og rampan verður síðani løgd niður á bryggjuna, meðan skipið verður liggjandi við fram skrúvu.

Tað er ein avbjóðing, at rampan er so stutt, serliga tá tað er nógv flóð ella fjøra. Um rampan á skipinum, á flóð, er langt oman fyri bryggjuna, røkkur rampan ikki niður á bryggjuna, og um hongslini á rampuni á fjøru eru niðan fyri bryggjukantin, ber ikki til at leggja rampuna niður.

Fyri at kunna taka støðu til hvat skal gerast, má Tórshavnar havn hava at vita frá Strandferðsluni, akkurát hvussu rampan á landi skal síggja út.
Stanndferðslan hevur ikki heilt vitað hvat skipið kom at stinga, og hvussu nógv tað kann “trimmast”, fyri enn tað var komið á flot.

Um skipið hevði tað “røttu” hæddina og eina langa rampu, hevði tað ikki verið neyðugt við nakrari broyting.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

Loysnin er at hækka bryggjukantin við einari rampu, sum verður stoypt oman á bryggjuna.
Tað ber ikki til at broyta verandi rampur, tí tær skulu framhaldandi brúkast til Ternuna.
Rampurnar verða umleið 10 m langar, og tí mugu tær staðsetast soleiðis, at tær eru sum minst til ampa á havnaøkinum.

Í Nólsoy er rampan staðsett í norðara enda á bryggjuni úti á Klivum, og í Tórshavn er rampan staðsett á sunnaru síðu av rampuni, sum Ternan brúkar.

Arbeiðið fyri báðar rampurnar kann gerast fyri kr. 630.000
Alt eftir hvussu veðrið verður, og at flutningur av tilfari til Nólsoyar ikki seinkar arbeiðinum, kunnu rampurnar takast í brúk umleið 20. desember.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
(stutt frágreiðing um fíggjarlig viðurskiftið)

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Dkk | Dkk 630.000 |
| Kostnaður í hesum árinum | Dkk | Dkk 630.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Dato | Dato 30/11 til 21/12-2020 |
| Avleiðingar á rakstur | | Dkk 630.000 |

**Játtan:**

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | verkætlan | Eykajáttan |
| Dkk | | | | | | | | |
| Útgreining: | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:** Havnarmeistarin mælir til at taka undir við at byggja rampur í Tórshavn og Nólsoy, fyri tilsamans kr. 630.000
Arbeiðið verður fíggjað av íløgum fyri Tórshavnar havn konto 7475.

**Vinnunevndin 24. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at havnameistarin arbeiðir við at finna eina loysn fyri atløguviðurskiftunum í Hesti og leggja málið fyri nevnd aftur og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020: S**amtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

# 269/20 Møguligt keyp av trøð í Hoydølum. Matr.nr. 16b, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 220/18 | 18/02670-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.11.2018 | 307/18 | 18/02670-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 68/19 | 18/02670-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 184/20 | 18/02670-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 276/20 | 18/02670-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 249/20 | 18/02670-1 |
| 7 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 269/20 | 18/02670-1 |

**Upprunin til málið:** Trøðin stendur á sølulista hjá meklara.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Trøðin matr.nr. 16b, Hoyvík, er til víddar 10.616m2, harav vegur 983m2, og liggur í D1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar Kommunu, sum er lagt til almenning, náttúrufriðingar – mentanarlig endamál og tílíkt.
Serstøk byggisamtykt er galdandi fyri økið. Um nýtslu økisins framgongur, at økið verður í síni heild lagt til alment fríøki, traðarbrúk og til náttúrufriðingar- og gróðursetingar endamál og verður sundurbýtt á eindirnar A,B og C. Trøðin hoyrir til økið A. ( Økið úr Boðanesgjógv og niðan til Hvítanesvegin ) er partur av frílendis ætlanini fyri Boðanes Hoydalar.

Á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, verður skrivað um Sanatoriutrøðna.
Gamla Sanatoriutrøðin er ogn hjá Innlendismálaráðnum, og løgd til Umhvørvisstovuna at umsita. Hesar jarðir eru í alt uml. 21,6 hektarar í vídd ( 1 ha = 10 tús. M2 ) Øll frílendisætlanin fevnir tó í alt um uml. 28,2 ha. Lendið er partur av tí býarskipanarliga grøna geiranum, ið gongur úr fjøruni við Boðanes og Hoyvíkina, niðan gjøgnum Hoydalarnar og Ternurygg, og út í hagan uppi undir Húsareyninum og Villingafossi.

Tað kann eisini viðmerkjast, at gjøgnum matriklin gongur almenn gøta, sum verður nógv brúkt av havnarborgarum.

Vísast kann á, at fíggjarnevndin sambært máli nr. 2007-1225, hin 16. mai 2007, samtykti, at mæla býráðnum til, at kommunan ognar sær økið fyri jarðarprísin frá Búnaðarstovuni. Hin 24. mai 2007, handar seljarin kommununi bræv, har seljarin krevur kr. 400 kr.m2. og samtykkir býráðið fyri læstum hurðum hin 24. mai 2007, ikki at keypa.

Grundstykkið liggur nú á sølulista við prísuppskoti kr. 2.000.000,- svarandi til 188,40 kr.m2.

Sambært heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni er prísurin fyri landsjørð – øki1. Tórshavn.
C. Velt lendi og væl dyrkingarbart lendi, sum liggur væl fyri 137 kr.m2. Keypsprísurin vildi tá veri 1.454.392,-

Vit hava tosað við meklara sum greiðir frá, at tað ikki nyttar at lata boð inn, sum er lægri enn samsvarandi jarðarprísi sambært Búnaðarstovuni sum er 137 kr.m2.

Meklarin greiðir eisini frá, at privatir keyparar eisini hava víst ognini áhuga.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortsjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni, mæla fíggjarnevndini til at heimila umsitingini at bjóða uppá trøðna upp til kr. 1.475.000,00 + meklaraútreiðslur.
Keypið verður fíggjað av konto 6175 keyp/søla.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Bergun Kass og Jákup Dam, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur lagt boð inn áljóðandi kr. 1.475.000,00
Boðið, var treytað av býráðssamtykt, og var galdandi til 17.05.2018 kl. 15:00

Meklarin hevur boðað frá, at seljarin ikki tekur av boðnum.

**Fíggjarnevndin 14. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti.**
Meklarin upplýsir at trøðin framvegis ikki er seld, og at seljarin hevur tikið trøðna av sølulista.

Hóast boðið ikki er nøktandi, vil seljarin nú møguliga selja fyri 1,475 mill. kr.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at umrøða málið, hvørt kommunan skal fara víðari við málinum ella ikki.

Viðmælir fíggjarnevndin at keypa trøðna, má játtan útvegast til keypið.

**Fíggjarnevndin 14. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti.**
Meklarin upplýsir at trøðin framvegis ikki er seld, og at seljarin hevur tikið trøðna av sølulista.

Hóast boðið ikki er nøktandi, vil seljarin nú møguliga selja fyri 1,475 mill. kr.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at umrøða málið, hvørt kommunan skal fara víðari við málinum ella ikki.

Viðmælir fíggjarnevndin at keypa trøðna, má játtan útvegast til keypið.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini ynskir málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at mæla fíggjarnevndini til at heimila umsitingini at bjóða uppá trøðna upp til kr. 900.000 av kt. L6275 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, mælir frá at keypa ognina.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 07. okt 2020 at mæla fíggjarnevndini til at heimila umsitingini at bjóða uppá trøðna, matr. nr. 16b, Hoyvík, upp til kr. 900.000.

Hugsanin er, at boðið skal fíggjast soleiðis:
300.000 kr av L62033, Havnadalur - fríøkið
300.000 kr av L62032, Gøta kring Havnina og fiskastykkið
300.000 kr av L62023, Frílendið við Hoydalsá.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og at fíggja eitt møguligt keyp soleiðis:
300.000 kr av L62033, Havnadalur - fríøkið
300.000 kr av L62032, Gøta kring Havnina og fiskastykkið
300.000 kr av L62023, Frílendið við Hoydalsá.

At beina í býráðið at viðgera sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir, um tikið verður av boðnum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

# 270/20 Matr.nr. 1160f, Tórshavn. Sp/f Berg Hestar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 159/20 | 20/01753-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 296/20 | 20/01753-2 |
| 3 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 270/20 | 20/01753-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn dagfest 19.05.2020

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Matr. nr. 1160f, Tórshavn. Vídd 4.551m2. Leigumál fyriliggur við Sp/f Berg hestar viðvíkjandi matrikul 1160f, og harumframt eitt øki uttanfyri. Samlaða leigugjaldið er 5.000 kr. pr. ár.

Verandi leigusáttmálið er undirskrivaður 27.11.2006, og hevur gildið 20 ár frá undirskrivingardegi, t.v.s. til 27.11.2026.

Hevur leigarin hildið sínar skyldur sambært sáttmálanum, og skal kommunan ikki sjálv brúka økið, kann leigumálið verða longt.

Verandi sáttmáli er komin í gildið, ístaðin fyri uppruna 15 ára sáttmála 10.12.1999.

Sambært grein 3 framgongur, at leigarin fær ikki endurgjald fyri arbeiðið, ið er lagt í økið, tá hesin leigusáttmáli gongur út. Leigarin hevur skyldu at taka burtur alt, ið er flutt til økið, fast sum leyst, og ruddað økið, tá leigumálið heldur uppat. Verður hetta ikki gjørt, kann býráðið gera hetta fyri leigarans rokning.

Um sáttmálin verður uppsagdur av kommununi áðrenn 20 ár, t.v.s. áðrenn 2026, verður virðisminkingin av ríðihúsinum sett til 1/20 um árið.

Sambært tingbókarváttan, er leigusáttmálin tinglýstur í matr.nr. 1160f, og eru ognarveðbrøv tinglýst i bygninginum.

Advokatur felagsins søkir vegna leigaran, um at keypa matr.nr. 1160f, alternativt at keypa sjálvt undirlendið undir ríðihøllini.

Um tað ikki letur seg gera at fáa økið til keyps, verður í øðrum lagi søkt um nýggjan 30 ára leigusáttmála.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Sambært § 44. í kommunustýrislógini má føst ogn hjá kommununi ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment.

Sí tó kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn, sum gevur møguleika fyri sølu uttan alment útboð, men tó so, at søla altíð skal verða til marknaðarprís.

Ein tílík søla skal góðkennast av kommunala eftirlitinum.

Advokatur umsøkjarans, metir, at vísandi til at bygningur stendur á økinum, er heimild til at selja økið, vísandi til § 2. stk. 1 litra 3, sum ásetur , at søla av økjum, sum eru minni enn 300 fermetrar til víddar og sum ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á, eru frítikin fyri kravinum um alment útboð. Advokaturin metir, at

innihaldið er púra greitt, at um tað ikki letur seg gera at byggja á økið, so er ikki neyðugt við almennum útboði.
Advokaturin metir, at landstýrismaðurin við heimild í § 2. stk 2. eigur at víkja kravinum um alment útboð, tá talan er um at selja ogn undir einum verandi virkisbygningi.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnaskrivstovuni, mæla til at beina málið í býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:** Leigarin á økinum hevur upplýst fyri umsitingini, at neyðugt er at gera ábøtur á ognina á leigaða økinum, og til tess at fáa fígging, er umráðandi at fáa longt leigumálið.

Leigusáttmálin ásetur, at hevur leigarin hildið sínar skyldur sambært sáttmálanum, og skal kommunan ikki sjálv brúka økið, kann leigumálið verða longt.

Av tí at leigumálið liggur í einum øki, sum er lagt út til framtíðar vegaloysnir av Oyggjarvegnum og oman á Marknagili og út í Havnardal, er ikki óhugsandi, at leigumálið verður ávirkað av hesum ætlanum, og tí má ein leingjan av leigumálinum taka hædd fyri hesum.

Skotið verður tískil upp at leingja leigumálið í 10 ár, so tað fer úr gildi 31. desember í 2036, men við tí fyrivarni, at skal kommunan brúka økið innan hetta tíðspunkt, skal leigarin fara av økinum móti at fáa ávíst annað øki til virksemi sítt men uttan endurgjald fyri tað, ið er lagt i økið.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at leingja leigumálið til 31. desember 2036 undir teirri fortreyt, at skal kommunan brúka økið í sambandi við framtíðar vegagerð, skal leigarin fara av økinum uttan endurgjald fyri tað, ið er lagt í økið, men samstundis fáa ávíst annað øki til virksemi sítt.

Mælt verður somuleiðis til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020**: Ein meiriluti, Annika Olsen, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum um at leingja sáttmálan og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt at leingja leigumálið til 31. desember 2036 undir teirri fortreyt, at skal kommunan brúka økið í sambandi við framtíðar vegagerð, skal leigarin fara av økinum uttan endurgjald fyri tað, ið er lagt í økið, men samstundis fáa ávíst annað øki til virksemi sítt.

# 271/20 Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 160/20 | 20/01519-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 34/20 | 20/01519-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 154/20 | 20/01519-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 210/20 | 20/01519-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 185/20 | 20/01519-2 |
| 6 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 271/20 | 20/01519-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 01.12.2020 | 67/20 | 20/01519-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 246/20 | 20/01519-2 |

**Upprunin til málið:** Eigarin av grundstykkinum bjóðar kommununi grundstykkið til keyps.

Umleið 535m2, verða frámatrikuleraðir matr.nr. 43a, Velbastaður. Stykkið liggur beint hinumegin skúlan á Velbastað.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Parkeringsviðurskiftini við Skúlan á Velbastað eru sera trupul.

Verandi eigari av ognini matr. nr. 43a, hevur vent sær til kommununa. Hann bjóðar kommununi eitt grundstykki á uml. 535m2, til keyps fyri uml. 500.000,00
( Uml. 935 kr.m2 )

Longdin á grundstykkinum framvið vegnum verður uml. 20,25 metrar.

Um kommunan ognar sær lendið, ber til at gera parkeringsøkið á grundstykkinum.

Stykkið hevur staðið á sølulista hjá ognarmeklara, men er fyribils tikið av sølulista aftur, meðan frábýtismálið verður avgreitt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í teknisku nevnd og í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at kommunan ognar sær økið til parkeringspláss til skúlan.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti. V**erkætlanin verður fíggjað av konto 8175, Vegir Íløgur, L00002, framfluttur karmur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til, at keypa ognina, sum nú er frámatrikulerað og hevur fingið matr.nr. 43i, Velbastaður. Vídd 477m2, fyri í mesta lagi 500.000,00 svarandi til 1.050 kr.fermeturin.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Jákup Dam legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at keypa uml. 535 fermetrar av matr. nr. 43a og 43i, Velbastaður, sambært upprunaliga tilmælinum til teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina og sambært kortskjali, j.nr. 20/01519/3.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Jákupi Dam, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Grundstykkið er matrikulerað, og er breiddin til vegin einans uml. 20 metrar, vísandi til at ein geiri á 4 metrar er matrikuleraður til økið omanfyri.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við eigaran av ognini, og eigarin er sinnaður til at selja kommununi lendi á uml. 310 fermetrar burtur av matr. nr. 43i og 43h, fyri kr. 400.000,00 Hetta verður gjørt við marknaumskipan.

Breiddin til vegin verður tá uml. 26 metrar, og ber tá til at gera 10 parkeringsbásar á økinum, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við omanfyri nevndu loysn, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9 Kort yvir parkeringsøkið við skúlan á Velbastað.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

## 272/20 Integratión, samskipan og átøk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 03.04.2017 | 15/17 | 17/01053-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 01.05.2017 | 17/17 | 17/01053-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 109/17 | 17/01053-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 06.11.2017 | 44/17 | 17/01053-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 11.12.2017 | 50/17 | 17/01053-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 05.03.2018 | 15/18 | 17/01053-1 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 07.05.2018 | 21/18 | 17/01053-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 154/18 | 17/01053-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 211/18 | 17/01053-1 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 20.06.2018 | 30/18 | 17/01053-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 203/18 | 17/01053-1 |
| 12 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 144/18 | 17/01053-1 |
| 13 Trivnaðarnevndin | 13.09.2018 | 33/18 | 17/01053-1 |
| 14 Trivnaðarnevndin | 01.10.2018 | 39/18 | 17/01053-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 278/18 | 17/01053-1 |
| 16 Trivnaðarnevndin | 05.11.2018 | 42/18 | 17/01053-1 |
| 17 Trivnaðarnevndin | 26.11.2018 | 51/18 | 17/01053-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 347/18 | 17/01053-1 |
| 19 Trivnaðarnevndin | 06.06.2019 | 19/19 | 17/01053-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 161/19 | 17/01053-1 |
| 21 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 137/19 | 17/01053-1 |
| 22 Trivnaðarnevndin | 06.02.2020 | 6/20 | 17/01053-1 |
| 23 Trivnaðarnevndin | 14.05.2020 | 15/20 | 17/01053-1 |
| 24 Trivnaðarnevndin | 11.06.2020 | 19/20 | 17/01053-1 |
| 25 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 272/20 | 17/01053-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 302/20 | 17/01053-1 |

**Málslýsing:**
**Bakstøði**
Í samgonguskjalinum hjá sitandi býráðssamgongu verður sagt, at arbeiðast skal fyri, at tilmælini um integratiónspolitikk fyri Tórshavnar kommunu verða fylgd, og at tilboð fyri tilflytarar í kommununi verða raðfest og løgd í fasta legu.

Sett verða harumframt ymisk ítøkilig mál og ætlanir:
- At integratiónssamskipari verður settur at veita tænastur til tilflytarar, at savna og menna tilboð
- At skipa verður eitt altjóða hús sum royndarskipan at leiðbeina tilflytarum
- At virkast skal fyri, at sjálvboðin, lesandi, eldri tilflytarar og onnur, ið kunnu/vilja hjálpa, taka lut
- At virka verður fyri, at føroyskt undirvísing til tilflytarar á Kvøldskúlanum verður ment, og
- At kommunan skal ganga á odda við at bjóða starvsvenjing til tilflytarar á kommunalum arbeiðsplássum sum lopfjøl til, at hesi kunnu nýta teirra egnu førleikar.

**Í hesum uppriti verður lýst, hvussu hetta kann skipast, so tað verður samanhangur millum verandi tænastur á integratiónsøkinum og ætlanirnar hjá samgonguni.**

**Tørvur**
Sum partur av altjóða samfelagnum eru Føroyar í broyting. Hetta sæst millum annað aftur í fólkasamansetingini, har fleiri útlendingar flyta til landið at arbeiða, íðka ítrótt ella sum partur av familju. Hetta er gongd, sum hevur vundið uppá seg síðan aldarskiftið. Í árinum 2000 búðu 286 fólk í Føroyum, sum høvdu annan ríkisborgararætt enn norðurlendskan, í 2014 var samsvarandi talið 894.

Við ymiskum mentanum er kommunan vorðin uppaftur meira fjølbroytt, men skulu øll, bæði útlendingarnir, sum flyta higar, og tey, sum búgva her frammanundan, fáa fullgóða nyttu og uppliving av ymiskleikanum, so er tað umráðandi, at nýggju borgararnir so skjótt sum til ber verða innlimaðir í samfelagið, tað verið seg stovnsliga integratión (arbeiðsmarknaðartilknýti), mentanarliga integratión (mál, mentan og samfelagsviðurskifti), sosiala intgratión (gerandislig sambond) og politiska integratión (demokratisk luttøka).

Ásannandi hetta lat kommunan gera eitt álit um integratiónspolitikk, sum varð liðugt við ársenda 2015. Politikkurin skal vera brúgv hjá nýggju borgarunum til føroyska samfelagið, og tí varð í álitinum lýst, hvussu fólkasamansetingin í Tórshavnar kommunu sær út (tjóðskap, aldur v.m.), hvørjar avbjóðingarnar eru, og hvat kommunan kann gera við tað. Í álitinum eru 8 høvuðstilmæli, sum eisini verða tikin upp her.

**Bygnaður**
Integratión er sambært kommunustýrisskipanini politiskt ábyrgdarøki hjá trivnaðarnevndini. Av samgonguskjalinum framgongur, at talan um serliga politiskt raðfest øki.

Integratión í praksis er tó tvørsektorielt, tvs., at øll fakøki í umsitingini og virkisøkini annars hava ábyrgd av integratión, nøkur meira enn onnur.

Uppskot er tí, at meðan skipaða og samskipandi integratiónsarbeiðið verður bygt upp, eigur yvirskipaða fyrisitingarliga ábyrgdin, eisini samsvarandi serligu politisku raðfestingini, at liggja hjá stjórnini, sum leggur út í kortið ítøkiligar málsetningar samsvarandi politiskum samtyktum.

Landspolitiskt varar Uttanríkis- og vinnumálaráðið yvirskipað av integratión. Uppgávan er løgd til Útlendingastovuna, har integratiónssamskipari er settur. Kommunurnar hava hóast hetta rættiliga stórt frælsi til sjálvi at taka stig til integratiónsátøk innan hennara uppgávuøki, og sum mett verður tørvur er á. Samstundis kunnu kommunur samstarva sínamillum um integratión eins og Útlendingastovuna.

**Verandi tænastur á integratiónsøkinum**
Kommunan hevur sum er eina røð av tænastum til borgararnar í kommununi, sum eisini fevma um tænastur til tilflytarar. Tænastan til tilflytarar er eins og tænastan til hinar borgararnar í kommununi desentral og verður framd á avvarðandi fakøki.

**Børn og ung og tilflytarar**
Kommunan hevur sum tænastuveitari og myndugleiki innan dagstovnaøkið og barnaverndarøkið nógv samskifti við foreldur, harundir kravdar foreldraviðtalur. Á sama hátt er innan skúlaverkið, har ábyrgdin hjá kommununi tó er ikki hin sama við tað, at lærarar eru settir av landinum.

Sum lýst í tilmælinum um integratiónspolitikk eru avbjóðingarnar innan barnaøkið serliga hersar:
- Alt kunningartilfar er á føroyskum
- Misskiljingar vegna mentanarmunir
- Tulkatænasta

Kommunan er í gongd við at nágreina, hvussu kunningin á dagstovnaøkinum kann betrast bæði í mun til ítøkiligt tilfar til tilflytararnar og sum amboð til starvsfólkini. Partur av hesum er eisini at betra fatanina av mentanarmunum, tvs. at skapa eitt tvørmentanarlig umhvørvi.

Metast má, at skipað tulkatænasta, har tulkar eru góðkendir eisini í mun til verju av viðkvæmum persónsupplýsingu v.m., er mál fyri fleiri myndugleikar bæði hjá landinum og kommununum. Í integratiónsálitinum hjá landsstýrninum frá 2011 verður sagt, at tulkatænasta skal skipast, men ikki hvussu.

Atlit kann tó eisini takast til, at ikki øll tulking nýtist at vera um persónsviðkvæm viðurskifti, men um meira almenn viðurskifti, ið ikki setir somu krøv til tulkaran, og tað í hesum sambandi snýr seg um at skipa ein “tulka-banka” av sjálvbodnum og/ella fakligum tulkum.

**Kvøldskúlin og tilflytarar**
Kvøldskúlatilboðið í føroyskum máli til tilflytarar hevur góða undirtøku, men avbjóðingar eru fleiri. Yvirskipað er tørvur á, at krav verður sett tilflytarum um at læra seg málið. Í dag er talan um, at tilflytarin sjálvur ynskir at læra málið.

Onnur avbjóðing er, at sjálv undirvísingin er ikki skipað sum føst játtan ella tilboð, tí Mentamálaráðið stendur fyri størsta partinum av fíggingini. Tað fyriliggur heldur eingin formaliserað námsætlan fyri undirvísingina. Tað er Mentamálaráðið, sum skal skipa móðurmálsundirvísingina, íroknað upplýsing um mentan og samfelag, har tað eisini er møguligt hjá tilflytarum at fáa hægri málsliga undirvísing.

Ein triðja avbjóðing er, at teir flestu tilflytararnir eru eisini á arbeiðsmarknaðinum, og at undirvísingin má verða tillagað til tað, tvs. bæði dagtilboð og kvøldtilboð, møguliga eisini intensiv vikuskiftistilboð.

**Snarskivan og tilflytarar**
Snarskivan er tænastudepilin hjá borgarum í Tórshavnar kommunu, staðið har kommunan møtir borgaranum. Snarskivan er sostatt eitt slag av millumliðið millum borgaran og umsitingina í Tórshavnar kommunu. Snarskivan veitir eina røð av tænastum beinleiðis til borgaran, og virkar sum eitt kunnandi og ráðgevandi millumlið, tá talan er um mál, ið verða viðgjørd úti á fakdeildunum.

Kommunan møtir tilflytarum fyrstu ferð í Snarskivuni, har tey koma at skráseta flyting í kommununa. Her fáa tey m.a. ráðgeving um p-tøl, lækna, barnaansing og líknandi tænastur, sum tilflytarar hava tørv á at fáa greiði á sum skjótast.

Seinasta árið hevur verið miðað ímóti at menna eina betri tænastu til tilflytarar. Ein faldari við hentum upplýsingum á enskum máli er gjørdur sum partur av vælkomupakkanum til tilflytarar. Í næstum verður í samstarvi við Útlendingastovuna skipað fyri fundi við eina røð av tilflytarum úr ymiskum londum. Hetta fyri at fáa nærri at vita um teirra upplivingar í sambandi við flyting í kommununa, og við støði í hesum at framleiða málrættaða kunning til tørvin hjá tilflytarum.

Hetta er liður í arbeiðum at menna eitt sonevnt “tilflytarhorn” í Snarskivuni, har Tórshavnar kommuna verður sjónliggjørd sum ein fjølbroytt kommuna, og at kommunan ynskir, at øll kenna seg vælkomnan og væl kunnaðan. Hetta “horn” skal eisini avspeglast talgilt á torshavn.fo, sum skal útbyggjast við tilfari til tilflytarar á enskum máli. Hetta skal eisini avspeglast á sosialu miðlunum hjá Tórshavnar kommunu soleiðis, at fyrispurningar um kunning og ráðgeving, sum kemur inn við Snarskivuna, um telefon, tpost o.s.fr., er skjótur at nøkta og bera fram á talgildu miðlunum.

**Hugskotið og tilflytarar**
Hugskotið, sum er íverksetarahúsið hjá Tórshavnar kommunu, ráðgevur persónum og fyritøkum um at stovna og reka egið virkið. Hugskotið ráðgevur sum er fleiri tilflytarum og eisini eru tað fleiri tilflytarar, sum leiga sær skrivstovuhøli í Hugskotinum, har teir arbeiða við at menna egin hugskot.
**Diversity**
Diversity er eitt tiltak hjá Tórshavnar kommunu, sum varð hildið á fyrsta sinni í 2016. Endamálið við tiltakinum var at heiðra fjølbroytni og á hendan hátt varpa ljós á ymiska tilfeingi í kommununi. Hetta var gjørt bæði gjørt út frá einum integratiónshugsunarhátti, men eisini sæð í ljósinum av, at samfeløg, har ymiskleiki er sjónligur, hava betri gróðrarlíkindi fyri nýhugsan og íverksetan.

**Tey átta integratiónstilmælini og samgonguskjalið**
Í stuttum kunnu tey níggju integratiónstilmælini í integratiónsálitinum hjá kommununi frá 2015 lýsast soleiðis:

1. Tulkatænasta – tryggja, at samskifti serliga millum stovn og foreldur og innan barnavernd verður fatað og skilt rætt bæði í mun til almenna kunning og viðbrekin mál
2. Starvsvenjing – útlendsku tilflytararnir hava í størri og minni mun útbúgvingar. Kommunan kann økja møguleikan fyri, at fakligu førleikararnir verða gagnnýttir innan fakøkið.
3. Málundirvísing – eggja til og krevja, at tilflytarar læra føroyskt mál, harundir eisini børn. Streingja á landsmyndugleikarnar um at skipa málundirvísingina betri og differentierað.
4. Kunning og ráðgeving – kunning um rættindi og skyldur, eitt nú kunningardag, ensktmælt kunningartilfar, "tilfytara-corner" á Snarskivuni
5. Mentorskipan – taka stig til sjálvbodna mentorskipan, har sjálvboðim hjálpa útlendskum tilflytara at finna seg til rættis á ymsan hátt, eitt nú luttøku í felagslívi (ítrótt v.m.), greiða frá fyrbrigdum, sum tilflytarin varnast og undrast á osfr.
6. Tilgongdir og tilfar í sambandi við familjusamførd børn – taka stig til serstakar tilgongdir og tilfar eitt nú í sambandi við eyka málundirvísing og tillagað tilfar
7. Tvørmentan – við tvørmentanarligum umhvørvi, har høvuðseykenni er opinleiki mótvegis mentanarmunum til tess at minka um málsligar og mentanarligar misskiljingar
8. Integratiónsskrá – samskipað integratiónsskrá til einstaka tilflytaran, og er skipaður eftir tørvin á vegleiðing og stuðli

Samgonguskjalið vísir til hetta og leggur so ítøkilig mál aftrat, serliga um at seta í starv integratiónssamskipara, og at skipa eitt altjóða hús. Niðanfyri verða hesi bæði mál nærri lýst sum grundarlag fyri víðari tilgongd.

**Integratiónssamskipari**
Til tess at byggja upp, skipa og samskipa kommunalu integratriónsátøkini, og at fáa miðsavnaða orku til endamálið, er skilagott at seta integratiónssamskipara í starv, sum burturav fæst við hetta.

Mett verður, at integratiónssamskiparin tørvar egið fysiskt stað, har viðkomandi kann tosa við tilflytarar uttan órógv og sum beinleiðis inngongd hjá tilflytarum til restina av kommununi, eitt slag av "front office" fyri restina av tænastunum hjá kommununi.

Tað skal vera gjørligt hjá tilflytarum at støkka inn á gólvið og hitta integratiónssamskiparan, sum so kann leiðbeina borgaran til restina av kommununi. Eisini skal samskiparin vegleiða og vísa borgaran til rætta myndugleikan, tá ið spurt verður um tænastu, ráðgeving v.m., sum ikki liggur hjá kommununi, tað veri seg til Útlendingastovuna ella aðrar almennar ella privatar stovnar.

Inngongdin hjá tilflytarum til kommununa og tænastur hennara skal vera tann sama sum hjá borgarunum annars, tvs. um Snarskivuna, eisini til tess at sjónliga signalera, at kommunan ynskir tilflytarum vælkomnar.

Umframt henda meira sjónliga partin, skal integratiónssamskiparin eisini seta í gongd og samskipa tey átøk, sum áløgd verða ella tørvur er á.

Harumframt skal hann í samskifti við ymsu fakøkini koma við hugskotum til átøk, vísa á tørv v.m., eins og at hann skal kunna lofta teimum avbjóðingum, ið fakøkini hava, og koma við uppskotum um loysnir í samstarvi við avvarðandi partar.

Uppgáva hjá integratiónssamskiparanum verður tí eisini at fáa skipað grundarlagið undir tilboðum og tænastum samsvarandi teimum átta integratiónstilmælunum so sum tulkatænastu, mentorskipan og starvsvenjingar v.m. í tann mun, ið kommunan sjálv kann fremja hesi.

Integratiónssamskiparin skal hava hóskandi útbúgving og royndir, men metast má, at í starvi sum hesum eru persónligu eginleikararnir eisini sera týdningarmiklir aftrat fakliga profilinum. Samskiparin fær fjøltáttaðar uppgávur og skal samstarva breitt við fleiri fakbólkar og skipanir internt og eksternt.

Setast kann spurningur við, hvørt talan skal vera um fulltíðar ella parttíðar starv, og um talan er um varandi starv skilt soleiðis, at endamál eisini má vera, at ymsu virkisøkini hjá kommununi við tíðini hava bygt upp førleikar og fortreytir til sjálvi at lyfta teirra viðkomandi integratiónsuppgávur.

Sæð í hesum ljósinum kundi starvið í fyrsta umfari verið skipað sum tíðaravmarkað verktætlanarstarv.

Integratiónsamskiparin verður eftir omanfyri standandi fysiskt staðsettur í Snarskivuni, men mett verður, at starvið yvirskipað vísir til stjórnina, í øllum førum ta tíð, tað tekur at byggja integratiónsarbeiðið upp.
Mett verður skilagott, at integratiónssamskiparin er knýttur at fakligum stýrisbólki ella kontaktbólki, ið er mannaður við viðkomandi deildarleiðarum ella starvsfólkum í mun til faklig viðurskifti, tænastur, tørv v.m. Hetta kundi eitt nú veri sosialdeildarleiðarin, leiðarin á Snarskivuni, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á starvsfólkadeildini og leiðarin á Kvøldskúlanum, ella eftir tørvi.

**Altjóða hús**
Í samgonguskjalinum er skrivað, at altjóða hús skal skipast sum royndarverkætlan at leiðbeina tilflytarum. Um hetta er avmarkaða endamálið, so kann hetta skipast sum afturvendandi kvøldsetur ella líknandi eitt nú á Býarbókasavninum ella øðrum tøkum høli hjá kommununi.

Um hugsað verður breiðari, so kann eitt altjóða hús eisini vera karmur um tvørmentanarligt virksemi, tvs. karmur, har føroyingar og tilflytrarar hittast eitt nú til mentanarlig tiltøk, fyrilestrar v.m.

Annað endamál við altjóða húsinum kundi verið sum sosialt tilhaldsstað hjá tilflytarum tó soleiðis, at endamálið má framhaldandi vera integratión skilt soleiðis, at altjóða húsið fremur samveru millum tilflytarar og føroyingar. Havast skal eisini í huga, at tilflytararnir umboða fleiri tjóðskapir.

Spurningur er, um altjóða hús sum royndarverkætlan skal hugsast sum egið hús/stað, ella um talan heldur er um skipan/bygnað, ið samskiparin stendur fyri, har ymisk høli verða nýtt. Í samgonguskjalinum er eisini nevnt, at sjálvboðin, lesandi, eldri tilflytarar og onnur, ið kunnu/vilja hjálpa, taka lut, og tað kundi m.a. verið ein møguleiki í mun til fyriskipan av tiltøkum í altjóða húsinum.

Mett verður skilagott, at integratiónssamskiparin fær sum uppgávu at nágreina konsept fyri altjóða húsið.

**Fígging v.m.**
Integratión sum sjálvstøðug uppgáva hevur onga beinleiðis fígging. Fleiri tilmæli og átøk hava heldur ikki við sær beinleiðis tørv á nýggjari fígging, meðan eitt nú málundirvísing er tengt at játtan frá landsstýrinum.

Skal setast ein integratiónssamskipari, so skal starvið fyrst normerast og flokkast, eins og fígging skal fáast til vega til løn og rakstur. Alt eftir, hvussu virksemið við altjóða húsi verður skipað, er eisini fíggjartørvur knýttur at tí, eins og integratiónssamskiparin kann hava tørv á játtan til ávís integrtatiónsátøk.

Spurningur er, um stovnast skal nýggj konta á fíggjarætlanini til Integratiónssamskipan og átøk.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, miðfyisitingarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at umrøða málini í hesum uppriti nærri sum grundarlag fyri raðfesting, fíggjarætlan v.m.

**Trivnaðarnevndin 03. apríl 2017:** Umrøtt. Biðið verður um starvs- og uppgávulýsing í mun til integratiónssamskiparastarvið til næsta fund.

**Ískoyti:**
Biðið er um starvs- og uppgávulýsing til starv sum integratiónssamskipari.

Til tess at byggja upp, skipa og samskipa kommunalu integratriónsátøkini, og at fáa miðsavnaða orku til endamálið, verður skipað nýtt starv sum integratiónssamskipara. Starvið er fulla tíð.

Integratiónssamskiparin skal vera samskipandi millumlið millum tilflytarar og kommununa. Integratiónssamskiparin skal í hesum sambandi vegleiða og kunna tilflytarar um viðurskifti, tænastur og tilboð í kommununi, harundir at vísa til rætta myndugleika, tá tað ikki er kommunan, eitt nú Útlendingastovuna ella aðrar almennar ella privatar stovnar.

Integratiónssamskiparin hevur fjøltáttaðar uppgávur og skal samstarva breitt við fleiri fakbólkar og skipanir innanhýsis og uttanhýsis. Integratiónssamskiparin skal virða og duga at seta seg inn í avbjóðingar hjá tilflytarum sum heild, verða tænastusinnaður, uppsøkjandi og fyrikomandi.

Integratiónssamskiparin skal seta í gongd og samskipa tey átøk, sum áløgd verða ella kommunan metir tørvur verða á. Integratiónssamskiparin skal í samstarvi við ymsu deildirnar í fyrisitingini taka stig til og koma við hugskotum til átøk, vísa á tørv v.m., eins og at hann skal kunna lofta teimum avbjóðingum, ið deildirnar og tænastuøkini annars hava á integratiónsøkinum, og koma við uppskotum um loysnir í samstarvi við avvarðandi partar.

Uppgáva hjá integratiónssamskiparanum er eisini at skipa grundarlag undir skipanum og tilboðum samsvarandi integratiónstilmælunum (frá desember 2015) so sum kunning, tulkatænastu, mentorskipan og starvsvenjingar v.m. í tann mun, ið kommunan sjálv kann fremja hesi ella í samstarvi við aðrar myndugleikar.

Integratiónssamskiparin skal hava útbúgving á bachelor- ella kandidatstigi. Umframt fullgóðan málsligan førleika á enskum og føroyskum, skal integratiónssamskiparin hava gott innlit í kommunalu skipanina og føroysk samfelagsviðurskifti annars.

Integratiónssamskiparin hevur skrivstovu í Snarskivuni tó við tilvísing til trivnaðarfyristingina. Aftrat sær hevur integratiónssamskiparin fakligan kontaktbólk, ið er mannaður við viðkomandi deildarleiðarum ella starvsfólkum í mun til faklig viðurskifti, tænastur v.m.

Víðari tilgongd:
Sum víst í málslýsingini til undanfarna fund í trivnaðarnevndini, hevur integratión sum sjálvstøðug uppgáva onga beinleiðis fígging. Fleiri tilmæli og átøk hava heldur ikki við sær beinleiðis tørv á nýggjari fígging.

Starvið sum integratiónssamskipari skal normerast av fíggjarnevndini, eins og fígging skal fáast til vega til løn, rakstur og møgulig integratiónstiltøk. Ítøkiligi fíggjartørvurin hongur lutvíst saman við ítøkiligu lønarútreiðslunum, tvs. sáttmála, starsvaldur v.m., og virksemisstiginum annars, men metast má, at starvið krevur kr. 500-700.000 árliga.

Alt eftir, hvussu virksemið við altjóða húsi verður skipað, er eisini fíggjartørvur knýttur at tí.

Spurningur í hesum sambandi er, hvørt integratión skal hava sítt egna rakstrarstað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at skipa starv sum integratiónssamskipari sambært omanfyri standandi starvs- og uppgávulýsing, og í hesum sambandi útvega fígging til løn, rakstur og integratiónsátøk. Mælt verður til at skipa serstaka rakstrarkontu til integratión.

**Trivnaðarnevndin 1. mai 2017:** Nevndin hevur onkra viðmerking til starvs- og uppgávulýsingina, sum verður tillagað samsvarandi. Samtykt at taka undir við tilmælinum um at skipa starv sum integratiónssamskipari og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at Kr. 200.000 verða at játta til at løna integratiónssamkipara restina av árinum fíggjað soleiðis, ið verður at fíggja soleiðis:
1311 Miðfyrisiting kr. 100.000
1312 Trivnaðarfyrsiting kr. 100.000

Starvið er tíðaravmarkað í eitt ár.

**Ískoyti:**
Starvið sum integratiónssamskipari er sett frá 1. november 2017. Samskiparin kemur á fundin at umrøða ymisk viðurskifti innan integratión saman við nevndini sum grundarlag fyri seinni arbeiðsætlan.

**Trivnaðarnevndin 06. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Integratiónssamskiparin leggur fram uppskot til arbeiðsætlan.

**Trivnaðarnevndin 11. desember 2017:** Siri Helgadóttir Tórgarð, samskipari, kunnaði um ætlanir fyri 2018.

**Ískoyti:**
Eitt av høvuðstilmælunum í sambandi við integratiónsátøkini er at fáa sett í verk skipaða starvsvenjing til tilflytarar.

Gjørt er uppskot til eitt pilotprojekt hesum viðvíkjandi, sí hjálagt.

Endmálið er at skipa eina starvsvenjing, ið miðar í móti at skapa eina heildarintegratión, sum fevnir um mál, mentan, arbeiði og samfelag. Hetta merkir eitt nú, at í starvsvenjingin er skipað bæði sum arbeiði og málmenning, har tað eisini fáa undirvísing.

Uppskotið leggur upp til eina royndarverkætlan, har samlaða kostnaðarmetingin er kr. 1,8 mió, og sum fevnir um 12 tilflytarar, ið fáa løn í starvsvenjingartíðarskeiðinum, settum lærara í ¾ tíð og samsýning til mentorar umframt útreiðslur til undirvísingartilfar v.m.

Uppskotið verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at viðgera uppskotið og at fáa heimild til at arbeiða víðari við ætlanini.

**Trivnaðarnevndin 05. mars 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Eitt av høvuðstilmælunum í sambandi við integratiónsátøkini er at fáa sett í verk skipaða málundirvísing til tilflytarar. Gjørt er upprit um føroyskt sum fremmandamál, sí hjálagt.

Málið er grundarsteinur undir góðari integratión. Við góðum mál førleikum ber til at kunna seg um samfelagið, mentanina og fáa innlit í sosiala siðvenju. Sum foreldur gerst tað læittari at hjálpa og stuðla børnunum. Og tað gerst læittari at fáa eitt gott og gevandi arbeiðslív.

Umframt at lýsa verandi støðu og undirvísingartilboð, verður í uppritinum mælt til, at kommunan gongur á odda at skipa nýggjan leist til tilflytarar at læra føroyskt sum fremmandamál, ið eisini er tillagað til ymiskt førleikastig og ymiskt torleikastig.

Uppritið verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at viðgera uppritið og at geva umsitingini heimild til at arbeiða víðari við ætlanini.

**Trivnaðarnevndin 07. mai 2018:** Samtykt at fáa sett ætlanina í verk, harundir at fáa til vega fígging, og at beina málið til ummælis í mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at heita á umsitingina um at avvarandi partar í umsitingini og Kvøldskúlanum greina málið nærri og koma aftur í mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Viðv. skúlatilboði
Við greiningunum í málinum er fingið eitt enn betri grundarlag fyri at fara undir m.a at betra um eitt nú málundirvísingina og onnur átøk. Mett verður mest hóskandi at fingið dagført undirvísingartilboð skipað innan Kvøldskúlaskipanina og innan galdandi lóg, ið m.a. hevur eina samansetta fígging frá kommununi og Mentamálaráðnum. Skúlin hevur í mong ár havt skipaða undirvísing fyri tilflytarum, ið er ment og útbygd stigvíst. Kvøldskúlin og integratiónssamskiparin hava gjørt eitt dagført upprit um málundirvísing, ið er hjálagt.

Viðv. tilskundan til uppmøting og læring

Í fjør viðgjørdi býráðið mál 17/01123 viðv. prísskipan hjá Kvøldskúlanum 2017-18. Sí hjáløgt skjal frá viðgerðini tá. Ein partur av samtyktini var at innføra eitt depositum á 2000 kr fyri byrjanarskeið, ið næmingurin fær aftur um hann møtir 85% og fer til próvtøku. Sum heild hevði tað áðrenn ikki gingið nøktandi við at møta hjá næmingum og har fleiri møta tí passar teimum best. At læra mál er oftast sera krevjandi og krevur eisini ávísa tilskundan.

Útlendingalóggávan í Føroyum, ið er danskt málsøkið, hevur í høvuðsheitum verið óbroytt síðani aldarskiftið, meðan tað í Danmark eru gjørdar hópin av tillagingum, ið eru ætlaðar at møta teimum avbjóðingunum, ið danir hava innan sítt økið, herundir viðv. væntandi málførleikum hjá tilflytarunum.

Í verandi støðu ber til sbrt. galdandi lóggávu at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum uttan at hava nøktandi málsligan førleika. Mælt verður til, at býráðið formliga heitir á landsstýrismannin í Uttanríkis- og vinnumálum, um at fáa dagført útlendingalóggávuna soleiðis, at reglurnar í Føroyum í størri mun tilskunda og eyggja tilflytarum til skjótt og væl at ogna sær nøktandi málkunnleika og at treyt m.a. verður sett um nøktandi málføreika fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a) at taka undir við hjálagda dagførda uppritinum um málundirvísing við støði í ymsum førleikastigum og torleikastigum, og beinanvegin søkja Mentamálaráðið um fígging til slík skeið at byrja eftir summarfrítíðina, har Kvøldskúlin í Havn eisini bjóðar seg til at verða høvuðsstøð fyri slíka undirvísing
b) at áheitan verður send til landsmyndugleikarnar um at fáa sett sum megintreyt fyri varandi uppihaldsloyvi, at persónar hava staðið hóskandi málroynd.

Málið at senda í býráðið um trivnaðarnevndina.

**Ískoyti**:
Fíggjarligar avleiðingar
Virksemi innan málundirvísing fyri tilflytarum er sum meginreglu fíggjað soleiðis, at landið fíggjar undirvísingarkostnaðin og Kvøldskúlin annað. Tó so, at ofta er ávís óvissa knýtt at fíggingini frá landinum. Ítøkiliga hevur Kvøldskúlin oyramerkt ávísa upphædd til at fara undir eyka byrjanarundirvísingartilboðið fyri tilflytarum við veikum bókligum førleikum. Víðari viðgerðin í nevndunum vil sýna um og hvøjar aðrar møguligar fíggjarligar avleiðingar vera í 2019 og framyvir.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at heita á landmyndugleikarnar um saman við kommununum at fara undir røð av átøkum at fremja integratión bæði viðvíkjandi málmenning, mentan, førleikameting, arbeiðsmarknað o.a.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum samtykt í fjør er starvssetanin av integratiónssamskipara tíðaravmarkað til 31. oktober 2018.

Integratiónssamskiparin leggur fram stutta frágreiðing um virksemið higartil, um royndirnar og avbjóðingarnar eins og boð uppá framhaldandi arbeiði við integratión.

Frágreiðingin verður send seinni í vikuni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til trivnaðarnevndini til at umrøða frágreiðingina.

**Trivnaðarnevndin 13. september 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Setanin av integratiónssamskipara er avmarkað til eitt ár og gongur út 31. oktober 2018.

Á síðsta nevndarfundi varð frágreiðing løgd um virksemið higartil og boð uppá arbeiðsætlan fyri eitt komandi tíðarskeið.

Støða skal takast til, hvussu integratiónsarbeiðið skal skipast framyvir, harundir, um integratiónssamskiparastarvið skal skipast fast, leingjast í eitt ávíst tíðarskeið ella niðurleggjast.

Verður avgjørt, at integratiónssamskiparastarvið skal halda fram antin sum fast starv ella longt ávíst tíðarskeið, er neyðugt við fígging til endamálið.

Í løtuni fíggjar konta 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsumál løn hjá integratiónssamskiparanum og tiltøk v.m. Fígging er tøk á kontuni til at fíggja framhald í inniverandi ári. Fíggjartørvurin er í høvuðsheitum løn fyri november og desember. Í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2019 er upphædd til integratión ikki sett av.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at integratiónssamskiparastarvið verður skipað sum fast starv ella verður longt fram til 31. oktober 2019, at útreiðslur til virksemið restina av inniverandi ári verða fíggjaðar av kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið, tó í mesta lagi kr. 120.000, og at játtan fyri 2019 verður fingin til vega á fíggjarætlanini fyri 2019. Málið verður at beina í fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 01. oktober 2018:** Samtykt at mæla fíggjarnevndini til at leingja setanina av integratiónssamskipara til 31. desember 2018, og at málið um framhaldandi skipan av integratiónsarbeiðinum verður tikið uppaftur á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Trivnaðarnevndin 05. november 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Á kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið, sum higartil hevur fíggjað integratiónsvirksemið, væntast ein minninýtsla í 2018 á kr. 1,1 mió. Í fíggjarætlanini 2019 eru settar kr. 800.000 av til hesa kontu, harav uml. kr. 500.000 eru markaðar til samtykta samstarvsverkætlan (mentorskipan fyri ung). Tá lagt er upp fyri hesum, eru sostatt kr. 1,4 mió tøkar.

Skotið verður upp, at henda minninýtsla verður flutt fram til fíggjarárið 2019, og at kr. 800.000 verður markaðar á kontu 2460 til at fíggja integratiónssamskiparastarvið og integratiónsátøk annars í 2019.

Hetta merkir, at til ber at leinga samskiparastarvið í øllum førum fram til 31. desember 2019 og annars halda fram við at menna integratiónsarbeiðið. Metast má, at politisk støðutakan um eina varandi skipan av integratiónsarbeiðinum eigur at verða tikin í hesum tíðarskeiðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til

- at leingja setanina av integratiónssamskiparanum fram til 31. desember 2019,
- at fíggja kr. 800.000 til integratiónsvirksemið av kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið av framfluttari minninýtslu í inniverandi ári, og
- at beina málið í fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 26. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Ískoyti:**
Sum samtykt er skipaða integratiónsarbeiðið fyribils sett til at halda fram til árskiftið 2020. Nú hálvtannað ár er gingið, síðani integratiószsamskipari varð settur í starv og virksemið av álvara byrjaði, ber til at siga meira um starvið og virksemið á økinum, hetta sum grundarlag fyri at taka støðu til, um integratión skal skipast sum fast virksisøki í fyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu.

Niðurstøðan er, at skipanin eigur at halda fram.

**Byrjanin**
Síðan november 2017 hevur Tórshavnar kommuna havt møguleika at seta kós fyri integratiónsøkið í kommununi og í Føroyum við tað, at økið er raðfest politiskt, og at skipað er eitt samskiparastarv til endamálið.

Hetta hevur havt týdning fyri teir tilflytarar, ið longu vóru í landinum, og fyri tey, ið komin eru. Serliga er tað tey, sum eru familjusameind, ið hava fingið ágóðan av, at integratiónsøkið í Tórshavnar kommunu alsamt gerst meira skipað. Tey hava fingið ein persón at venda sær til og tey síggja broytingar á eitt nú málmenningarøkinum – eitt økið, sum hevur stóran týdning fyri integratiónina hjá tí einstaka og børnum teirra.

Í dag búgva í Tórshavnar kommunu 625 útlendskir tilflytarar, norðurlendingar ikki íroknaðir. Av hesum eru 265 kvinnur og 360 menn. Ein stórur partur av monnunum hava einans arbeiðsloyvi og roknast kann við, at tá eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi minkar, fellir talið av monnum eisini. Hesir 625 tilflytararnir koma úr 74 ymiskum londum.

Seinastu 10 árini eru talið av útlendskum tilflytarum til Føroya tvífaldað og væntast skal, at talið komandi árini framvegis veksur.

Á einum meira yvirskipaðum og strategiskum støði hevur Tórshavnar kommuna eisini havt møguleika at gera seg galdandi innan integratiónsøkið. Tætt og gott samstarv hevur verið við Útlendingastovuna, sum hevur ført við sær at amboð og filmur verður tøkur til dagstovnaøkið at brúka í arbeiðið teirra við fleirmæltum familjum.

Tórshavnar kommuna hevur eisini staðið á odda fyri at samskipa verkætlanina um amboð til dagstovnaøki, og hevur verið drívmegin aftanfyri at fáa tær sjey kommunurnar í verkætlanina at samstarva. Harafturat hevur, eftir eitt ávíst trýst frá Tórshavnar kommunu, Útlendingastovan nú kalla inn til fyrsta netverksfund innan integratión, har seks kommunur afturat Tórshavnar kommunu luttaka. Hetta er sera positivt, tí við hesum fer at bera betur til at samskipa integratiónstiltøk kring landið.

Eftir áheitan frá Tórshavnar býráð hevur Vinnu- og uttanríkismálaráðið tikið upp arbeiðið at gera uppskot til rammulóg um integratión. Fundur hevur verið við kommununa um hetta, og hevur kommunan fingið høvi at koma við sínum hugsjónum um, hvussu integratión skal skipast í Føroyum.

Samstarv hevur eisini verið við Mentamálaráðið, ið millum annað hevur stuðlað verkætlanini um amboð til dagstovnaøkið. Tórshavnar kommuna hevur harumframt verið vertur fyri fundin hjá "An inclusive cultural

sector in the Nordics", eitt samstarv í norðurlendskum høpi, um hvussu mentan og mentanarlig tiltøk kunnu stuðla undir góða integratión og inklusjón.

Innanhýsis í kommununi hevur týðandi samstarv verið millum integratiónssamskiparan og Kvøldskúlan um føroyskt sum annað mál. Leiðslan í Kvøldskúlanum arbeiðir miðvíst fyri at fáa í lag skipan um føroyskt sum annað mál, soleiðis at tey, ið fáa prógv, fáa eitt prógv, sum er á einum góðkendum støðið, har CEFR skipanin verður brúkt. Samstarv er við MMR um hetta.

Samstarv hevur eisini verið við hinar deildirnar í Trivnaðarfyrisitingini, har integratiónssamskiparin hevur verið brúktur sum innanhýsis ráðgevi í mun til mál, ið hava havt eitt integratión og inklusjón aspekt tengt at sær. Samstarv er við Býarbókasavnið og við Tórsgøtu um tiltøk ol. til tilflytarar. Gott samstarv hevur eisini verið við Snarskivuna.

Í 2018 var skipað fyri nógvum ymiskum tiltøkum og nógv orka varð brúkt uppá hetta. Talan var um almenn tiltøk, har øll vóru vælkomin at luttaka. Í Posthúskjallarinum varð skipað fyri open space tiltøkum, til Mentanarnáttina var stórt tiltak í Perluni, og Diversity week var í oktober. Afturat hesum varð skipað fyri regluligum fundum við einum úrval av tilflytarum fyri at fáa kenslu av, hvat rørir seg í tilflytarahópinum og at koma tættari nøkrum teirra. Eisini var útlendskur lesandi í praksislæru á integratiónsøkinum á vári 2018, og ein tilflytari í starvsvenjing gjøgnum ALS á heysti 2018.

**Í løtuni**
Í løtuni er nógv ymiskt á skránni innan integratiónsøkið. Feltið er stórt og ríkiligt er at tríva í. Sumt er líka til at fara undir og ber væl til at røkka við ásettum fíggjarkarmi og innan kommunumark. Annað er meira trupult at fara undir, avmarkað av manglandi rammulóg og manglandi tilfari. Eisini liggur eitt arbeiði at gera politiskt innanhýsis í mun til integratiónsøkið.

Í løtuni verður arbeitt við at fáa fund í lag við heilsufrøðingarnar hjá Gigni, sum arbeiða í Tórshavnar kommunu um eitt møguligt samstarv um upplýsandi mammubólk til tilflytara mammur. Endamálið við einum slíkum mammubólki er at fáa samband við hendan ávísa bólkin av mammum og stuðla undir tí góða samstarvinum við heilsufrøðingin.

Byrjandi fundur hevur verið við skúlastjórarnar í Tórshavnar kommunu um at fara undir skreening av tilflytara næmingum, sum koma beinleiðis úr útlondum og inn í fólkaskúlan – samskifti hevur eisini veri við MMR um hetta. Endamálið er at tryggja næminginum best møguligu byrjan uppá skúlagongdina.

Byrjandi samstarv er millum Tórshavnar kommunu, Mariehamn/Áland og Nuuk, um integratiónsøkið. Endamálið er at kanna nærri, um hesir tríggir partar kunnu fáa nyttu av samstarvi um eitt felags prosjekt, sum søkt verður um pening til frá norðurlendska samstarvinum um integratión. Orsøkin til, at hesir tríggir partar hava eitt byrjandi samstarv er, at migratiónsmynstrið í hesum trimum londum líkist, og at ymiskar avbjóðingar í mun til integratión og inklusjón líkjast. Og brýtur hetta burturfrá hinum norðanlondunum.

Fyrireikað verður eisini til Mentanarnáttina og til Diversity week.

**Fyri framman**
Arbeiði á integratiónsøkinum fer framyvir at snúgva seg um at halda fast í nøkrum føstum tættum, sum til dømis Diversity week og luttøku á Mentanarnáttini. Harumframt at seta onnur tiltøk í verk, sum til dømis innførsluskeið til nýggjar tilflytarar og gera tað til fastan tátt í árshjólinum hjá integratiónsøkinum. Hetta er alt mentanarlig og almenn tiltøk, ið hava til endamáls at varpa ljós á margfeldi í Tórshavnar kommunu og at leggja lunnar undir eina góða integratión.

Annað arbeiði á integratiónsøkinum er áhaldandi at tryggja samstørv við stovnar uttan fyri kommununa, aðrar kommunur, landið og útlandið. Hetta alt fyri at tryggja, at Tórshavnar kommuna altíð bjóðar øllum sínum borgarum bestu tænastuna og starvsfólkum sínum nýggjastu vitanina innan integratións- og inklusjónsarbeiði.

Eitt afturat er at veita innanhýsis ráðgeving innan integratión til deildir í fyrisitingini og til stovnar hjá kommununi. Aftur er talan um at tryggja borgarum eina góða tænastu, men meira umráðandi er, at starvsfólkini hjá kommununi fáa tey amboð og tann stuðul, sum skal til, til at tey kunnu fremja arbeiði sítt í mun til tilflytarar á ein munagóðan hátt og føla seg tryggan í at gera hetta.

Ein partur av tí arbeiðinum, sum liggur fyri framman, bíðar eftir politiskari støðutakan og rammum. Her verður sipað til skipan við starvsvenjing, málmenning til vaksin og tilflytaranæmingar í fólkaskúlanum. Tá rammulóg verður gjørd innan hesi øki, skal væntast, at nakað av hesum verður lagt til kommununar at skipa.

Ein áhaldandi partur av arbeiðinum innan integratiónsøkið er strategi og fyrisiting. Undir hesum eru serliga tvey mál, sum eru átrokandi at fara undir og tað er at fáa í lag integratiónspolitikk fyri Tórshavnar kommunu, og at fáa enska partin av heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu og kunningini til tilflytarar yvirhøvur dagført.

Spurningur er eisini, í hvønn mun integratiónsarbeiðið skal fevna um persónliga ráðgeving til tilflytarar.

Niðanfyri verða lýst tvey uppskot til, hvussu integratiónsøkið í Tórshavnar kommunu kann skipast framyvir:

1. Integratiónsøkið hevur primært tvær funksjónir – innanhýsis ráðgevandi, fyrisitingarliga og strategiska funktión og at skipa fyri tiltøkum. Ynskiligt er við tveimum starvsfólkum. Ein, sum tekur sær av innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi. Og ein, sum tekur sær av tiltøkum.
    a. Innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi
        i. Skipar økið strategiskt í mun til politikkin hjá kommununi og menning av økinum eitt nú við støði rammulógini um integratión, tá hon verður samtykt, og sum útgreinar kommunalu uppgávurnar á økinum
        ii. Skipar fyri innanhýsis menningartiltøkum til starvsfólk í kommununi bæði fyrisiting og stovnar, ið hava beinleiðis samband við tilflytarar, td. ráðgeving, fundir og skeið innan integratión og inklusjón
        iii. Samstarvar við aðrar partar – deildir og stovnar í kommununi, aðrar kommunur, stovnar, land og útland
        iv. Samskipar samstarv um starvsvenjingar

    Hetta yvirlitið er ikki úttømandi, bert eitt yvirlit yvir nøkur arbeiðsøki hjá tí persóninum, sum tekur sær av innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi.
    b. Tiltøk
        i. Diversity week
        ii. Mentanarnáttin
        iii. Innførslu skeið
        iv. Skeið / fundir saman við Gigni til tilflytara mammur
        v. Onnur føst tiltøk td. kvøldsetur, hugni og annað
        vi. Uppsøkjandi arbeiði fyri at fáa eitt tættari samstarv við tilflytarar – td. at fara á tey arbeiðsplássini, ið hava nógvar tilflytarar, at hava fund/prát við teir tilflytarar, ið eru har. At fara á Kvøldskúlan, tá skeið í føroyskum, sum annað mál byrjar osv.
        vii. Standa fyri samskifti á Facebook-síðuni hjá integratiónsøkinum

Hugsast kann,at onnur tiltøk kunnu koma afturat, og at annað arbeiði eisini verður at fyriskipa hjá hesum persóni. Talan er um yvirlit yvir, hvat er á skrá og ætlað.

Við hesum leistinum verður ikki bjóðað persónlig ráðgeving til tilflytarar hjá Tórshavnar kommunu. Hetta kemst av tí, at royndirnar seinasta hálvtannað árið vísa, at tað, sum tilflytarar venda sær til kommununa um, er ráðgeving, sum aðrir almennir myndugleikar og skipanir eiga at veita.

Annað, sum tilflytarar venda sær til kommununa um, er ráðgeving í mun til umsóknir teirra um uppihaldsloyvi – hetta er øki, sum Útlendingastovan varar av. Rættarhjálpin bjóðar eisini ókeypis løgfrøðiliga hjálp. Eitt annað er ráðgeving í mun til útbúgving og umskúling.

2. Integratiónsøkið skal røkja innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi. Skal skipa fyri tiltøkum. Og ráðgeva tilflytarum. Neyðugt verður við í minsta lagi tveimum ársverkum – fulla tíð til ein persón, ið tekur sær av innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi, hálva tíð til ein persón, ið tekur sær av at skipa fyri tiltøkum og hálva tíð til ein persón, ið veitur persónliga ráðgeving til tilflytarar.
    a. Innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi er tað sama, sum í uppskoti 1
    b. Tiltøk er sum í uppskoti 1 – tó avmarka til Diversity week, Mentanarnáttina, onnur tiltøk, so sum kvøldseta og hugni og samskifti á FB.
    c. Ráðgeving til tilflytarar
        i. Persónlig ráðgeving til tilflytarar
        ii. Uppsøkjandi arbeiði at fáa eitt tættari samstarv við tilflytarar – td. at fara á tey arbeiðsplássini, ið hava nógvar tilflytarar, at hava fund/ prát við teir tilflytarar, ið eru har. At fara á Kvøldskúlan, tá skeið í føroyskum, sum annað mál byrjar osv.

Verður integratiónsøkið skipað á hendan hátt, mugu onnur hølir finnast at hýsa integratiónsøkinum. Starvsfólkini mugu sita soleiðis, at viðskiftafólkið, tilflytarin, kann ganga beint inn og út uttan at órógva onnur starvsfólk hjá TK og má hetta vera eitt stað, sum er lætt at finna, serliga hjá tilflytarum, sum ofta ikki eru so staðkend. Afturat hesum er umráðandi at hava atgongd til fundarhøli, sum bæði skal brúkast til persónliga ráðgeving og fundarvirksemi.

Omanfyri eru lýst tvey uppskot. Mælt verður til fyrra uppskotið, ið er mest viðkomandi fyri kommununa

**Bygnaður og skipan**
Integratión er í dag skipað sum virkisøki í trivnaðarfyrisitingini við beinleiðis tilvísing til trivnaðarstjóran, men virksemið gongur tvørturum fyrisitingar og deildir/stovnar. Við einum ella tveimum starvsfólkum er økið enn ov lítið til at skipa sum deild í fyrisitingini, og tí kann verandi skipan í høvuðsheitum halda fram.

Hinvegin eigur virksemið at verða fíggjað av sjálvstøðugari rakstrarkontu. Í dag er játtan sett av á kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsumál, men hetta er ikki rakstrarkonta.

Skal integratiónsøkið mennast og leggjast í trygga legu bæði í mun til menningararbeiðið og fyriskipan av tiltøkum, verður mett neyðugt at økja um starvsfólkaorkuna, har miðað eigur at verða eftir tveimum starvsfólkum.

Gjørt er uppskot til fíggjarætlan, har støðið er tikið við verandi starvsfólkaorku og fígging kr. 800.000, harav kr. 200.000 er til ymisk tiltøk. Um fíggingin verður veitt, sum eftir hjálagda uppskoti, verður talan um eina øking uppá kr. 750.000, har økt verður bæði um lønarjáttan og játtan til tiltøk og menning.

Dømi um fígging er hjálagt, sum eisini tekur støði í teimum báðum uppskotunum omanfyri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at integratión heldur fram sum virkisøki í Tórshavnar kommunu. Mælt verður harumframt til, at játtan til integratión verður skipað í sjálvstøðugari rakstrarkontu frá fíggjarárinum 2020.

**Trivnaðarnevndin 06. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í 2015 varð gjørt upprit um tilmæli til ymisk integratiónsátøk, sum í ávísan mun hava verið grundarlag fyri tí integratiónsvirksemi, sum kommunan við at seta í starv integratiónssamskipara í 2017 hevur framt.

Í hesum tíðarskeiði hevur tilflytingin tikið dik á seg. Landsstýrið hevur eisini í størri mun lagt seg eftir at arbeiða við integratión yvirskipað bæði viðvíkjandi kunningartilfari og at fáa skipað málundirvísingina í fastari legu. Kommunan hevur verið við til at skunda undir hetta eins og tað arbeiðið, sum landsstýrið nú ger við at orða uppskot til integratiónslóg.

Henda gongd gevur størri tørv á at nágreina ítøkiliga leiklutin og uppgávurnar hjá kommununi viðvíkjandi integratión framyvir, og sum setur kós bæði inn í kommununa og út í samfelagið. Politikkurin kann virka sum leiðbeining um, hvussu kommunan tekur ímóti nýggju borgarunum í kommununi, og hvussu kommunan veitir eina dygdargóða tænastu í tí mentanarmøtinum, ið stendst av tí øktu tilflytingini úr londum uttanfyri Norðurlond. Eisini kann ein integratiónspolitikkur virka sum vegleiðing í ivamálum innanhýsis, og endaliga staðfestur ein integratiónspolitikkur eisini, at politiska skipanin í kommununi áhaldandi vil raðfesta týdningin av góðari integratión.

Íntegratión verður ofta býtt sundur í fýra høvuðsmið:

- Stovnsliga integratión (arbeiðsmarknaðartilknýti, tilknýti til dagstovnar, skúlar vm.)
- Mentanarliga integratión (málførleikar, innlit í mentan, samfelagslinnlit vm.)
- Sosiala integratión (gerandislig sambond við fólk, felagslív vm.)
- Politiska integratión (luttøka í fólkaræðinum vm.)

Mett verður, at hesi mið kunnu verða grundarlag fyri arbeiðinum at orða ein integratiónspolitikk, sum aftur er grundarlag fyri raðfesting av arbeiðsætlanum og átøkum at tryggja góða integratión.

Ætlanin er at skipa verkstovum í viku 10 (fyrst í mars) við umboðum fyri politisku skipanina og fyrisitingar og deildir í kommununi umframt ætlandi Útlendingastovuna. Endamálið er, at politiska skipanin og ymsu kommunalu virkisøkini geva íkast til, hvat tey halda er umráðandi at taka við í integratiónspolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.

Umframt umboð fyri stjórnina verður skotið upp, at umboð fyri hesar deildir taka lut í verkstovuni: sosiala deild, mentamáladeildin, barna- og ungdómsdeildin, heilsu- og umsorganartænastan, snarskivan, starvsfólkadeildin og stjórnarskrivstovan.

Hugsanin er, at á verkstovuni verður orðað eitt fyrsta útkast til integratiónspolitikk, sum verður sent býráðsnevndunum til hoyringar. Møguliga verður eisini ein bólkur umboðandi tilflytarar savnaður at gera viðmerkingar til uppskotið. Við støði í afturmeldingunum og møguligari nýggjari styttri verkstovu verður uppskotið gjørt liðugt at lata politisku skipanini til endaliga samtyktar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og integratiónssamskiparin mæla nevndini til at taka undir við uppskotinum til tilgongd at orða integratiónspolitikk.

**Trivnaðarnevndin 06. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Útkast til integratiónspolitikk verður lagt fram.

**Trivnaðarnevndin 14. mai 2020:** Grundarlag fyri integratiónsarbeiðinum í Tórshavnar kommunu varð lagt fram og verður tikið upp aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt 14. mai 2020, har lagt varð upp til, at nevndarlimir til næsta fund viðmerkja útkastið til grundarlag fyri integratiónsarbeiðinum, sí hjálagda skjal.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at viðgera útkastið.

**Trivnaðarnevndin 11. juni 2020:** Nevndin samtykti at taka undir við grundarlagnum fyri integratiónsarbeiðinum hjá kommununi og beinir málið í býráðið.

Nevndin samtykti harumframt, at starvið sum integratiónssamskipari verður sett 1. september 2020.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at heita á umsitingina um at koma aftur í nevnd við einari ítøkiligari ætlan um, hvussu integratiónsøkið skal skipast og herundir hvussu lýst verður eftir integratiónssamskipara.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

## 273/20 Listaverkstøð í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 106/17 | 17/01361-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 173/17 | 17/01361-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 279/17 | 17/01361-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 324/17 | 17/01361-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 294/17 | 17/01361-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 6/18 | 17/01361-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 53/18 | 17/01361-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 107/18 | 17/01361-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 69/18 | 17/01361-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 146/18 | 17/01361-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 152/18 | 17/01361-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 137/18 | 17/01361-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 120/18 | 17/01361-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 164/18 | 17/01361-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 234/18 | 17/01361-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 213/18 | 17/01361-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 4/19 | 17/01361-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 39/19 | 17/01361-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 94/19 | 17/01361-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 118/19 | 17/01361-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 208/19 | 17/01361-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 191/19 | 17/01361-1 |
| 23 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 139/19 | 17/01361-1 |
| 24 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 319/19 | 17/01361-1 |
| 25 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 69/20 | 17/01361-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 116/20 | 17/01361-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 99/20 | 17/01361-1 |
| 28 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 209/20 | 17/01361-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 284/20 | 17/01361-1 |
| 30 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 292/20 | 17/01361-1 |
| 31 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 273/20 | 17/01361-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu er m.a. orðað viðv. skapandi list:

**"Skapandi list, mentan og siðsøga í kommununi**
Íløgur í mentan og list, eru íløgur í okkara egna samleika. At kenna og vera partur av søguni, er ein virðismikil førningur og tí eiga søvn at verða sjónligir partar av høvuðsstaðnum.
...
Listahús eigur at útvegast, har listafólk í kveikjandi umhvørvi kunnu fáa frið at skapa. "

**Myndlistaverkstað í Finsen**
Slíkt verkstað kundi verið hugsað í ovaru høllini í Finsen (fyrrv. fimleikahallunum í fyrrv.

kommunuskúlanum). (sí hjálagdar myndir og tekning).
Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fer at fáa hita frá Finsen.

Ynski er hjá myndlistafólki um at fáa betri møguleikar fyri verkstøðum. Ein fyrimynd er t.d. listaverkstað í Tróndheimi. Sí [www.lkv.no](http://www.lkv.no)

Høllin kundi verið avsett til verkstað hjá myndlistafólki og umsitin av myndlistafelagnum sbrt. nærri avtalu við kommununa viðv. upptøku, skipan, gjaldi v.m. Hugsanin er at rindast skal leiga fyri hølini og at tey so vítt til ber hvíla í sær sjálvum fíggjarliga.

Tað er hugsandi at har kundi verið einir 10-12 básar til listafólk.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av høllini v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avklársing í mai 2017. Hugsanin er at minimalt skal gerast við hølini.

Ætlandi verður farið í samskifti við felagið hjá Myndlistafólki at gera uppskot til avtalu um, hvussu virksemi kann skipast har.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Býarskipanardeildin vísir á, at í heildarætlanini fyri Finsen hevur málið verið at ymisku hølini, sum eru afturat sjálvum lestrarbústøðunum skulu vera útatvend og bjóða býnum og borgarum inn o.s.fr. Ovara høllin er serstøk m.a. við góðum ljósi og útsýni til garðin í Finsen. Ein vandi við at gera myndlistaverkstað er, at virksemi verður ov innatvent og ikki uppnær endamálinum m.a. um at fáa lív í umhvørvi kring Finsen.

Tí er neyðugt, um avgjørt verður at fara víðari við hesi verkætlan, at umsitingin í dialoginum við listafólkini fær greinað, hvørt virksemi kann skipast soleiðis, at tað kann innganga í visjónina um útatvent virksemi, sjónliggera list, framsýningar o.a.
Hartil er hóskandi at verkætlanin verður gjørt tíðaravmarkað og eftirmett t.d. innan 1 ár.

**Grafiska listaverkstaðið í Finsen (listgrafo)**
Er longu lutvíst staðsett og íverksett í hæddini undir auluni. Er ætlað til verkstað hjá listafólki innan grafikk (sí mynd og tekning). Hølini tilhoyra Bústaðir, men eru ætlaði til mentanarligt endamál, har tað verður rindað fyri rakstur og bygningsviðlíkahald, men ikki beinleiðis leiga.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið fyri listagrafikarar. Hugsanin er áhugaði søkja um upptøku til at brúka hølini hjá felagnum sbrt. upptøkureglugerð sbrt. avtalu við kommununa um upptøku, skipan og gjald. Hugsanin er at rindast skal fyri hølini.
Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Áðrenn verkætlan kann fremjast er neyðugt at endalig avtala kemur við Bústaðir um bygningsviðlíkahald o.a.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Eins og fyri møguliga myndlistaverkstaðið, er hóskandi at skipa verkætlanina sum eina tíðaravmarkaða roynd og við eftirmeting.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um listagrafiskan verkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum
b) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um myndlistaverkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum.

**Mentamálanevndin 3. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum a og b.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið á fundi við umboð fyri Føroysk myndlistafólk og ListGraFo. Hesi hava latið inn uppskot/frágreiðing um, hvussu tey kundu hugsað sær at virka í hølunum í Finsen. Sí hjáløgdu skjøl.

Ein avbjóðing, sum serliga tykist gera seg galdandi fyri listgrafiska verkstaðin, er húsaleigan. Enn er ikki endaliga greitt, hvør fermetrakostnaðurin verður fyri raksturin av í listgrafisku hølunum og myndlistaverkstaðnum, men fyri tað fyrra helst nakrar túsund kr. um mánaðin og tað seinna nakað hægri.

Í tí sambandi hevur samband eisini verið við Tórshavnar Kvøldskúla um til ber at kombinera skeiðvirksemi hjá skúlanum við virksemið hjá listgrafiska felagnum. Skúlin er sum útgangsstøði jaligur um hetta, og letur tað upp fyri virksemi, ið kann vera ymiskar tíðir á degnum gjøgnum alla vikuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til fundin í september.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 8. november 2017:**
Viðv. listgrafiska verkstaðnum

Samskifti hevur verið við felagið Listgrafo og Kvøldskúlan um møguleikarnar. Felagið ynskir at hava hølini burturav og sigur seg vera til reiðar at rinda fyri kostnaðin av hølunum. Endaligi kostnaðurin er treytaður av brúksavtaluni millum Bústaðir og kommununa. Hesin kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini 15. november 2017. Hølini vera ætlandi tøk seinni í november. Ávíst ivamál er um tørv á útsúgving til arbeiðið við vandamiklum løgi. Hetta er ikki kostnaðarmett.

Fyrivarni hjá umsitingini fyri hesi loysnini er mest um nýtslan av hesum serstaka høli verður nóg nógv til at felagið burturav skal hava tey.

Viðv. Myndlistaverkstaðnum

Samskifti hevur verið við Føroysk myndlistafólk um møguleikarnar. Umrøtt hevur verið antin at skipa tað sum verkstøð fyri tey sum eru at rokna sum yrkislistafólk. Hin møguleikin er at skipa virksemi meiri sum ein verkstað fyri yngri listafólk, ið ikki eru at rokna sum yrkislistafólk ella eina samanseting av báðum. Um fyrra loysnin verður valt metir umsitingin at tað er best um felagið sjálvt gerð avtalu við kommununa um virksemi og tekur sær av umsitingini av hølunum, upptøku v.m. Sum er eru hølini ikki klár at taka í nýtslu. Ymiskar ábøtur eru neyðugar. Herundir serliga viðv. brunaviðurskiftum, umframt aðrar ábøtur innan HVS, el v.m. Mett verður hóskandi at fáa ráðgeva at gera eina lýsing av viðurskiftunum. Umsitingin greiðir nærri frá hesum á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við tilmæli til komandi fund.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

**Viðv. Listgrafiska verkstaðnum**
Samráðingarnar við Bústaðir um brúksavtalu fyri Listatornið í Finsen eru lidnar og kemur málið ætlandi fyri í fíggjarnevndini í desember. Í rundum tølum fevnir fyrrv. Evningsstovan, um umleið 1/3 av fermetrunum í Listatorninum og skal felagið tá rinda umleið 5.000 kr. / mánaðin íroknað el&hita fyri hølini.

Samstundis verður mett, at tað hevði verið ynskiligt, um listgrafiska undirvísingin hjá Kvøldskúlanum var í somu hølum. Umsitingin og Kvøldskúlin meta at tað hevði verið ein fyrimunur og hevði kunna økt um nýtslustigið, umframt at Kvøldskúlin so kann nýta verandi listgrafiska hølið til onnur undirvísingarendamál. Eisini verður mett, at ein møgulig avtala eigur at vera tíðaravmarkað t.d. til 2 ár ella at hava møguleika fyri uppsøgn við rímiligum skotbráði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til og gera tilmæli til fíggjarnevndina um:
a). hvørt Listgrafo skal fáa í boði leigusáttmála
b). hvørt Listgrafo og listgrafiska virksemi hjá Kvøldskúlanum eigur at vera í felag í hølunum

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við loysn b og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireikað arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri Myndlistaverkstaðið í Finsen. Sí hjálagt kostnaðarmeting v.m. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 524,7 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Møguliga kunnu einstakir postar takast út.

Støða er ikki tikin til fígging av verkætlanini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina og taka støðu til um um farast skal víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur spurt ráðgevan um hvat kostnaðurin vildi verið um ovara høllin verður umvæld, men ikki niðara. T.v.s. hvat krevst av umvælingum v.m. í trappuøkinum upp til ovaru høllina. Metingin er at 496 tkr. koma aftur í hondverkaraútreiðslum, umframt kostnaðurin til ráðgeving, ókent og mvg. T.v.s. uml. 631 tkr. Sí hjálagt tilfar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata hervið nevndini hesar upplýsingar til umrøðu við atliti til møguligt tilmæli á komandi fundi.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Umrøtt.

Ískoyti
Vísandi til samtyktina í mentamálanevndini 29. november 2017 hevur samskifti verið við Listgrafo um samhýsing í hølunum í Finsen saman við Kvøldskúlanum. Sí hjálagt uppskot til avtalu.

Fyri at fáa hølini klár til endamálið hjá Listgrafo og Kvøldskúlanum er neyðugt við ymiskum ábótum o.a. Hetta er mett til umleið 100 tkr. og verður ætlandi framt innan raksturin hjá Kvøldskúlanum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við uppskotinum til avtalu og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Málið er nú gjøgnumgingið av nýggjum saman við Húsaumsitingini, umframt at ráðgevin hevur samskift við byggivaldið um fyritreytirnar í verkætlanini. Byggivaldið boðar frá, at arbeiðast kann víðari við verkætlanini, tó so, at endaligt byggiloyvi skal fáast til vega, áðrenn farið verður í gongd.

Um ynski er at fara í gongd við at gera myndlistaverkstað í ovaru høllini, eru hondverkaraútreiðslurnar (HVÚ) mettar til 524,7 tkr. umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ), ókent (ca. 15% av HVÚ) og kommunalt MVG (6,25% av øllum postum). Um farið verður undir arbeiðið í ovaru høllini og ikki samstundis undir

arbeiðið í niðaru høllini, er neyðugt at gera trappuuppgongdina millum báðar hallirnar. Metingin fyri tað arbeiðið er 496 tkr., umframt somu postar til ráðgeving, ókent og kommunalt mvg. Samanlagt gevur tað umleið 1,3 mkr.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión. Arbeiðið kann hóskandi verða boðið út í mai/juni til at verða útint tíðliga í heyst.

Við atliti til at fáa góðar prísir verður mett best, um arbeiðið í ovaru høllini var gjørt samstundis sum arbeiðið í niðaru høllini t.e. virknishøllini í Finsen – sí mál 17/01362, men er tað ikki alneyðug trey og krevur meirfígging uppá uml. 1,5 mkr.

Á løgukonto 5775 eru tøkar 921 tkr. fluttar frá verkætlan L57027 frá 2017 – sí mál 16/03404. Restin av fíggingini til verkætlanina, uml. 400 tkr., verður skotið upp at fíggjað av løgukonto 5775, smærri ítróttaanlegg, har 1,5 mkr. eru tøkar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðari á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir útboð av arbeiðinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen og Halla Samuelsen atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og játta kr. 921 tkr., ið eru tøkar fluttar frá verkætlani L57027 frá 2017 umframt 400 tkr. av løgukonto 5775, smærri ítróttaranlegg, sum eykajáttan til arbeiðið. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til at fara aftur til upprunaætlanina at nýta hølini til alment innandura spælipláss.

**Ískoyti:**
Í skrivið dagfest 17. mai 2018 hava býráðslimir fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin ynski um at fáa málið um hølisviðurskifti hjá Listgrafo á skrá til fyrst komandi býráðsfund.

**Viðv.sáttmála við Listagrafo um leigumál í Finsen, sum er góðkendur í bæði mentamálanevnd og fíggjarnevnd**.
Undirritaða fer vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði at biðja um at fáa eitt mál á skrá á næsta býráðsfundi. Tað snýr seg um leigusáttmálan, sum er gjørdur við felagsskapin Listagrafo um leigumál í Finsen.

Og sum eisini fevnir um, at Kvøldskúlin skal arbeiða har avís avtalaði tíðspunkt. Hesin sáttmálin er sum skilst góðkendur tann 24. Apríl í ár.

Sum skilst hava tey nú fingið boð um, at tey ikki sleppa inn har kortini.

Hesum kunnu vit í andstøðuni ikki taka undir við. Tí hetta er ein tilgongd, sum hevur staðið uppá í nógv ár. Og tey hava bíðað í tolni eftir avtaluni, sum er staðfest í einum av bæði Mentamálanevndini og fíggjarnevndini góðkendum sáttmála – og sum listabólkurin eisini hevur góðtikið.

Soleiðis kann mann ikki fara við fólki, felagsskapum og skúlum – og tað kunnu vit í andstøðuni ikki góðtaka.

Tað verður víst til, at Skúlin á Fløtum skal disponera yvir hølunum. Vit hava sum andstøða ferð eftir ferð víst á, at sjálvandi skulu vit gera alt vit eru ment til tess at Skúlin á Fløtum kann húsast á so fáum matriklum sum møguligt, meðan bygt verður. Og júst tú skutu vit upp, at Skúlin á Fløtum fekk Gamla realskúla at húsast í, inntil byggjaríið verður liðugt. Tá ber so til at gera Gamla realskúla um til ein dagstovn. Tørvurin á dagstovnaplássum eigur at verða loystur á annan hátt beint nú – til dømis við at brúka allan brúna Skúla til endamálið.

Vit fara tí at krevja málið á næsta býráðsfund, soleiðis at vit kunnu samtykkja, at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Vinarliga
Vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði
Helena Dam á Neystabø
Heðin Mortensen
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bjørghild Djurhuus og
Annfinn Brekkstein

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Síðani viðgerðina seinast hevur samskifti verið millum Tórshavnar kommunu og Listgrafo um viðurskiftini og hvør onnur møgulig hølisloysn kundi verið hóskandi til virksemi felagsins. Felagið metir, at niðara høllin í Finsen og hjárúmið norðanfyri eru meiri áhugaverd enn ovara høllin og hjárúmini har. Felagið ynskir ein leigusáttmála um hølini skjótast tilber. Í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen er innleiðandi viðgjørt at gera eina virknishøll í niðaru høllini í Finsen.

Í sambandi við fyrireiking av málunum eru ávegis tekniskar greiningar og kostnaðarmetingar gjørdar av ráðgeva og Húsaumsiting fyri bæði niðaru høllina sum virknishøll og í sambandi við hetta málið um listaverkstøð. Mett verður, at tað lutfalsliga skjótt ber til at fáa greinað viðurskiftini viðv. við atliti til at broyta endamál og ístaðin gera listaverkstøði í niðaru høllini ístaðin teirri ovaru høllini.

Í næstum kann farast í samráðingar við Listgrafo um innrætting og krøv til hølini, soleiðis at neyðug teknisk fyrireiking og byggimálsviðgerð kann fremjast, sum so síðani kann vera grundarlag fyri einum leigusáttmála.

Harumframt kann eisini eftirfylgjandi farast í samráðingar við Myndlistafelagið um møguleikan fyri myndlistaverkstaði í parti av niðaru høllini í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a) um farast skal í samráðingar við Listgrafo við tí endamáli at gera leigusáttmála og fyrireika listgrafiskan verkstað í parti av niðaru høllini í Finsen,

b). um farast skal í samráðingar við Myndlistafelagið um at gera leigusáttmála og fyrireika myndlistaverkstað í parti av niðaru høllini í Finsen.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir a) og b).

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, mæla til at halda fast í uppskot í skrivi, dagfest 17. mai 2018, sum gongur út uppá at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan .

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Helenu Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam:

Mælt verður til at halda fast í uppskoti í skrivi 17. mai 2018, sum gongur út uppá, at býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin, Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti:

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 20. juni 2018, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Listaverkstøð
Umsitingin hevur verið í samskifti við Listgrafo um málið. Felagið er nú sinnað til at viðgera møguleikan fyri at gera listaverkstøð í ovaru høllini og ynskir at fara í samráðingar um tað.

Ovara høllin er nakað størri enn niðara av tí at fleiri hjárúm eru. Tí er møguliga møguligt at kombinera listagrafisk virksemi við annað listaverkstaðarvirksemi. Hetta verður ætlandi kannað nærri í komandi tilgongdini.

Betri møguleikar fyri framsýning/gallarívirksemi fyri yrkislist í býnum
Listgrafo hevði upprunaliga ætlanir um at hava samansett verkstað og framsýningarhøli, men av tí at talan nú er um ovaru høllina setur felagið fram ynski um at kommunan betrar um møguleikarnar hjá yrkislistafólki til at framsýna og eisini selja sína list. Til komandi fund kemur tilmæli um, hvussu hetta kann fremjast, bæði

uppá stytri og longri sikt og soleiðis styrkja um møguleikarnar fyri at yrkislistafólk kunnu virka og annars geva borgarum og vitjani høvi til at síggja nútíðarlist í góðum umstøðum.

Henda ætlanin hongur í stóran mun saman við ætlanunum um virknishøll í hinari høllini í Finsen, sí tilmæli um tað. Neyðugt verður við eyka fígging til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini til at gera uppskot til leiguavtalu við Listgrafo um leigumál um listaverkstøð í meginpartinum av ovaru høllini, møguliga samansett við annað listavirksemi.
b). at heimila umsitingini at fara undir útboð av umvælingararbeiðinum av ovaru høllini.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við b.

**Ískoyti**
Umsitingin er í holt við tilgongdina at bjóða umvælingina av ovaru høllini út. Hetta við endamálinum at hava listaverkstøð har.

Listgrafo hevur 1. februar 2019 fráboðað, at tey ynskja niðaru høllina til listaverkstøð.

Mett verður ikki hóskandi at býta virksemi um millum ovaru og niðaru høllina í Finsen. Fyrst og fremst vegna atkomuviðurskiftini, ið mugu vera sera høgligt til virknishøllina um hon skal kunnu brúkast til skúla, dagstovnar, frítíðarskúlar og virkni hjá borgarum v.m. Umframt at endaliga byggiloyvið til ovaru høllina vil hava avmarkingar viðv. tali av fólki í høllini, ið kann vera torført at hondhevja við eini virknishølll í teirri ovaru høllini.

Helst er betri at kanna víðari um onnur staðseting kann finnast til listgrafiskt virksemi. Verkætlanin viðv. listaverkstøðum verður síðani fyrireikað víðari, men til annað listaverkstaðarendamál enn listgrafiskt virksemi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at halda fast við samtyktina um at listaverkstøð í ovaru høllini og at farið verður undir víðari kanningar um listagrafiskavirksemi hjá Listgrafo kann hýsast aðrastaðni.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at halda fast við samtyktina um listaverkstøð í ovaru høllini í Finsen.

**Ískoyti**
Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum
Tilgongdin er ávegis og væntast klárt til næsta fund. Sí eisini mál 17/01362 Virknishøll í Finsen.

Viðv. listverkstaði í ovaru høllini í Finsen
Listgrafo hevur nú boðað frá, at tey taka av møguleikanum fyri at brúka ovaru høllina í Finsen og at tey ynskja samráðingar um avtalu uppá rímiligar treytir. Umsitingin metir, at tað er hóskandi at virksemi verður kombinerað við listgrafisk virksemi hjá Tórshavnar Kvøldskúla. Hetta verður fyri tað mesta avmarkað til stutt skeið og burdi væl kunna virka saman við virkseminum annars har. Eisini verður mett hóskandi at partur av hølunum verður gjørt tøkt til annað listarligt virksemi og at farið verður í dialog við Myndlistafelagið um menning av tí konseptinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at

fara í samráðingar:
a). við Listgrafo um brúksavtalu um listagrafiskan verkstað í ovaru høllini og
b). við Myndlistafelagið um listaverkstøð í ovaru høllini.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið á fundi við Listgrafo og Myndlistafelagið um listaverkstøð í ovaru høllini í Finsen.

**Viðv. Listgrafo**
Felagið vísir á ymiskar vansar viðv. hølunum og vísir harumframt á, at vánirnar fyri kunna koma inn í hølini er væl út í 2019. Tí ynskir felagið heldur sum fremsta ynskir at bíða eftir at sleppa inn í hølið tey upprunaliga høvdu fingið uppskot til leigusáttmála um – nevniliga evningstovnuna undir Auluni í Finsen. Tey hølini eru í løtuni ein 3. fl. hjá Skúlanum á Fløtum og verða tøk aftur á sumri 2020. Onnur alternativ vildu verið í kjallarahæddini í Skansastovu, men er har avbjóðingin at Tøkum lætt hevur brúksavtalu um hølini einaferð um vikuna, umframt at felagið eisini nevnir høli í norðara bygninginum á Bacalao.

**Viðv. Myndlistafelagnum**
Dialogurin er nógv tengdur at viðurskiftunum hjá Listgrafo, ið fevnir um fleiri av somu fólkunum. Felagið arbeiðir samstundis saman við LISA viðv. møguleika fyri at fáa listaligt virksemi í Hoydølum, umframt at felagið nevnir møguleika fyri listaverkstøðum í norðara bygninginum á Bacalao. Felagið ynskir fegin at halda fram við dialoginum í næstum.

**Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum av ovaru høllini**
Umsitingin greiðir frá kostnaðarmetingunum v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja at lata Listgrafo sama leigusáttmála um evningstovnuna, sum felagið hevði í boði 2017, men galdandi frá sumri 2020, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**

Víst verður til ískoyti í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Ein meiniluti Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

Ein minniluti Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentalamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við málinum og mælir til at halda fast við upprunaligu ætlanina at brúka báðar hallirnar til innandura spælipláss.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Trónda Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinni Brekkstein um, at hallirnar í Finsen verða brúktar til innandura spælipláss sum uppruna ætlanin var, og at peningurin verður játtaður til tað endamálið, ið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
**Skipan av listaverkstaðnum**
Arbeiðið við at umvæla ovaru høllina í Finsen gongur sína gongd og verður ætlandi liðugt í mars 2020. Umsitingin hevur havt fund við Føroysk Myndlistafólk um, hvussu tey meta verkstaðið skal skipast. Felagið hevur áður sýnt áhuga at standa fyri virkseminum, men metir, at um talan skal vera um eitt konsept fyri bæði yrkislistafólki og onnur, so meta tey tað betri at virksemi er skipað undir kommununi, men at tey vilja viðvirka til at menna konseptið og síggja eisini áhugaverdar møguleikar í at yrkislistafólk og onnur t.d. lesandi og spírar húsast í somu hølum. Fyri at fáa eitt slíkt konsept at virka, er hóskandi at royna seg stigvíst fram og gera hóskandi tillagingar so hvørt

**Rakstur**
Hølini í ovaru høllini, íroknað hjárúm eru umleið 350m² og verður roknað við at árligu útreiðslurnar til el, hita, samskipan og ávísa reingerð eru uml. 150 tkr./árið. Hetta inniber at hølini helst skulu hava eina nøkulunda tilsvarandi inntøkur, umframt at roknast má við ávísum útreiðslum til at byrja virksemi. Mett verður at umleið 10 básar kunnu vera í listaverkstaðnum.

Innan mentamálaøkið er rakstrarøkið nevnt Mentanarhølir í miðbýnum. Mett verður hóskandi at hetta økið fær listaverkstøðini at umsita.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at fyrireika endaligt konsept við reglugerð, gjaldskrá v.m. fyri einum listaverkstaði, ið bæði bjóðar fram at hýsa yrkislistafólki og øðrum listafólki

b). at listaverkstaðið verður skipað undir Mentanarhølum í miðbýnum

og at venda aftur til nevndina í 2020 við málinum til endaliga støðutakan.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøða blankt.

**Ískoyti:**
Umvælingararbeiðið í hallunum í Finsen gongur sína gongd, og ovara høllin verður væntandi klár at taka í nýtslu í apríl/mai 2020.

Mentanarhølir í miðbýnum og umsitingin eru í holt við at fyrireika nýtslutøkuna og herundir gera uppskot til, hvussu hølini vera skipaði og innrættaði. Sí hjálagt uppskot til reglugerð. Hugsanin er, at reglugerðin verður send til ummælis hjá Føroyskum myndlistafólkum og øðrum viðkomandi pørtum. Til at gera hóskandi uppbýti í básar v.m. í listaverkstaðnum, umframt ymiskar útreiðslur ísv. uppstart av hølunum er neyðugt við uml. 110 tkr.

Hugsanin er, at inntøkurnar frá brúksleigumálunum fara til rakstur av tilboðnum (t.e. el&hita, reingerð og umsiting o.a.)

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at senda hjálagda uppskot til reglugerð til ummælis.
b). at játta 110 tkr. av kontu 5366 Stuðul annars til kontu 5312 Mentanarhølir í miðbýnum.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Uppskotið til reglugerð hevur verið til hoyringar hjá Føroyskum myndlistafólkum og LISA, ið eisini var biðið um at senda til viðkomandi limafeløg.

TK hevur fingið hesar viðmerkingar frá Føroyskum myndlistafólkum:
*“Vit hava bert eina viðmerking, tað er til orðið listasøgufrøðing í §3, stk. 2.*
*Kanska tað er betur at tað stendur listakønur í staðin, so ber til at eitt listafólk kann sita har, og ikki einans "akademikari".”*

Umsitingin metir at henda viðmerking kann takast til eftirtektar.

Meting:
Við støði í tí er gjørd dagføring í reglugerðini, sí dagført uppskot hjálagt.

Nýtslutøkan av hølunum verður nú fyrireikað, og í endanum av apríl verður ætlandi lýst við møguleikanum at søkja um at leiga bás í hølunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja dagførdu reglugerðina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Minnilutin (Javnaðarflokkurin í Tórshavnar Býráði) krevur, at málið um leigusáttmálan við ListGrafo um Evnishølini í Finsen kemur til viðgerðar á næsta Býráðsfundi tann 24. September við møguleika fyri at atkvøða, um at leigusáttmáli verður gjørdur við ListGrafo um evnishølini í Finsen. Ein nátúrlig avleiðing av hesum er, at nýggj høli verða útvegað til Talvsambandið.

**Lýsing av málinum um Listafólkafelagsskapin ListGraFo og Tórshavnar Kommunu.**

Á seinasta regluliga býráðsfundi í juli mánaði umrøddu vit málið um hølisviðurskiftini hjá felagsskapinum Føroyskir Listgrafikarar, ListGraFo, sum í mong ár hevur bíðað eftir, at avtala, sum varð gjørd um gomlu evnisstovuna í Kommunuskúlanum (nú Finsen), skuldi verða sett í verk.

Longu í 2015 varð avtala gjørd við ListGrafo um, at tey skuldu sleppa inn í hesi høli við øllum teirra sera tungu og virðismiklu útgerð, av tí at tey máttu fara út hølunum í Kongagøtu, tá húsið varð selt.
Hølini í Kommunuskúlanum/nú Finsen vórðu innrættað til endamálið. Neyðugir hentleikar eru har, og ikki minst umstøður til at seta stór og sera tung amboð upp. Hølini egna seg í allar máta væl til endamálið, eins og stóri sýnisgluggin tryggjar at listaverkini kunnu koma almennninginum til gleði og gagn. Nú ið listafólkaklivar eru skipaðir í fimleikahøllini í Finsen, er tað uppaftur meira sjálvsagt at grafiski verkstaðurin verður júst har.

Í 2016 gjørdi býráðsmeirilutin av, at hølini skuldu brúkast til fyribils skúlastovu til tey yngru skúlabørnini, meðan Skúlin á Fløtum verður bygdur. Vit royndu at fáa í lag, at listafólkafelagsskapurin kundi sleppa inn beinan vegin, og at onnur loys varð funnin til fyribils skúlastovu. Men tað fekk ikki undirtøku í meirilutanum, og vit viðurkendu eisini, at tað hevði týdning, at næmingarnir í Skúlanum á Fløtum fingu hóskandi undirvísingarhøli.

Tað var týðiliga og greitt avtalað, at tá ið Skúlin flytir inn á Fløtum, skuldi listafólkafelagsskapurin so aftur sleppa inn í evningsstovuna. Og í 2018 varð uppskot til leigusáttmála viðgjørt og góðkent í bæði mentamálanevd og fíggjarnevnd. Og felagsskapurin Listgrafo boðaði frá, at eisini tey góðtóku uppskotið til leigusáttmála. Men knappliga broyttist støðan. Og býraðsmeirilutin vildi eftir øllum at døma ikki standa við leigusáttmálan longur.

Maskinur og útgerð teirra er í stórum vanda fyri at forfarast í vánaligum umstøðum í bingjum uppi á Sandvíkarhjalla. Og tað má sigast at hesin felagsskapur av framstandandi og dugnaligum listafólkum hevur verið tolin og bíðað nú í nógv nógv ár, tí júst hesi høli eru tey best egnaðu í allar mátar.

Nú í 2020, nakrar mánaðir áðrenn skúlin flytir út á Fløtir,  hevur meirilutin í Býráðnum avgjørt, at listafólkafelagsskapurin kortini ikki sleppur inn í evningsstovuna, sum tað hevur verið meiningin í nógv ár. Nú er tað Tavfelagið sum skal leiga hesi høli – og harafturat til ein nógv nógv lægri leigukostnað, enn Mentamálaumsiting Býráðsins kravdi frá listafólkabólkinum Listgrafo.

Vit í Javnaðarflokkinum ivast nógv í, um tað er farið rætt fram, tá ið avtala um leigusáttmála verður undirskrivað, hóast vit á Býráðsfundi hava kravt málið fyri næsta býráðsfund, og vit mótmæla teirri viðferð, sum Listafólkabólkurin ListGrafo hevur fingið frá býráðssamgonguni.

Tey eru nú enn einaferð heimleys, vandi er fyri at útgerðin forferst, og tey verða send runt í býnum at hyggja at hølum, sum øll vita, at tey kortini ikki fáa hendur á. Sjálvsagt skulu vit eisini hýsa Talvfelagnum, og eingin ivi er um, at har eru hópin av møguleikum til tess. Men nú verða hesir báðir felagsskapir spældir út móti hvørjum øðrum, sum hvørgin teirra ynskir. Ein loysn skal finnast á báðum.

Men vit mótmæla mannagongd og viðferð, sum kommunan hevur víst ListGrafo, og krevja málið fyri Býráðsfund  tann 24. September 2020, við møguleika fyri at atkvøða um Býráðið er sinnað at halda gjørdar avtalur viðListGrafo, og at finna aðra loysn á leigumáli við Talvsambandið.
Vegna
Javnaðarflokkin í Tórshavnar Býráði

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar 2019-2020 samtykti mentamálanevndin 9. september 2020 "At fáa greinað um tað ber til at sameina virksemi hjá Gigni og Listgrafo í Gula skúla og fyritreytirnar fyri tí."

Umsitingin viðgerð málið og fer ráðgevi væntandi undir greiningar um mánaðarskiftið og er ætlanin at ein meting verður tøk í nov.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Helena Dam á Neystabø hevur biðið um at fáa til viðgerðar í mentamálanevndini at geva ListGrafo innivist í evningshølinum í Finsen.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, taka ikki undir við at geva ListGrafo innivist í evningsstovuni, tí at kommunan hevur gjørt leiguavtalu við Havnar Telvingarfelag í sama hølið.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, beinir málið í býráðið við áheitan um at gera avtalu við ListGrafo um innivist í evningsstovuni í Finsen.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Atkvøtt varð um uppskot frá Heðin Mortensen um at beina málið aftur í Mentamálanevndina, ið varð einmælt samtykt.

# 274/20 Frágreiðing um normering á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 16.11.2020 | 299/20 | 20/03974-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 301/20 | 20/03974-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 274/20 | 20/03974-1 |

**Upprunin til málið:**
Endurskoðan av útrokningarlyklinum á dagstovnaøkinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við bygnaðarbroytingina til eindarleiðslu á dagstovnaøkinum var partur av arbeiðssetninginum at endurskoða útrokningarlykilin, harundir normeringarnar á dagstovnaøkinum.

Í løtuni uppliva vit eitt dagstovnaøki, sum er undir trýsti. Stovnarnir hava brúk fyri fleiri hondum, fleiri fakfólkum, betri skipanum, nýggjum mannagongdum, betri umstøðum, fyrireikingartíð v.m.

Sama støða hevur eisini verið í Danmark, har kjakast hevur verið um minimumsnormeringar síðstu 20 árini stuðlað undir av nógvari gransking, sum hevur víst, hvussu umráðandi tað er at hava góða normering og dygdargóð fakfólk á dagstovnaøkinum bæði fyri menningina og trivnaðin hjá børnunum og starvsfólkunum.

Í fjør samtykti danska fólkatingið at skipa minimumsnormeringar á øllum dagstovnum stigvíst fram til 2025, harundir eisini at útbúgva fleiri námsfrøðingar til økta talið av starvfólkum. Serstøk játtan varð eisini latin kommununum í hesum sambandi.

Í Føroyum hevur eisini verið kjak um minimumsnormeringar síðstu árini. Føroya Pedagogfelag hevur latið gera uppskot um minimumsnormeringar, og løgtingið hevur eisini nýliga havt viðgerð av slíkum uppskoti, sum tó ikki er samtykt. Uppskotið hjá Føroya Pedagogfelag er í stórum tað sama sum tær donsku normeringarnar.

Normeringin hjá Tórshavnar kommunu í vøggustovu og barnagarðsstovu kann samanberast við tær hjá donskum kommunum áðrenn minimumsnormeringina. Sorø kommuna við uml. 29.000 borgarum hevði í 2018 eina normering uppá 1 starvsfólk til hvørji 3,9 børn í vøggustovu og 1 starvsfólk til hvørji 7 børn í barnagarðsstovu. Í donskum kjaki verður tikið til, at normeringarnar í 2018 vóru søguliga lágar.

Sum tað sæst í talvuni niðanfyri er normeringin í Tórshavnar kommunu í 2020 heldur frægari enn tann í Sorø kommunu í 2018. Hinvegin er samtykta minimumsnormeringin betri enn normeringin í Tórshavnar kommunu í dag.

| | **Tórshavnar kommuna 2020** | **Danmark í 2025/FP** |
|---|---|---|
| Vøggustovur | 1 starvsfólk til 3,5 børn | 1 starvsfólk til 3 børn |
| Barnagarðsstovur | 1 starvsfólk til 6,6 børn | 1 starvsfólk til 6 børn |
| Frítíðarskúli | 1 starvsfólk til 14,5 børn | 1 starvsfólk til 9 børn |

Í tølunum fyri Tórshavnar kommunu er íroknað normeringsøkingin uppá kr. 4,5 mió frá 2020.

Um normeringin í Tórshavnar kommunu varð sett til minimumsnormeringina, sum hon verður í Danmark í 2025, so skulu leggjast uml. kr. 36 mió aftrat játtanini býtt soleiðis:

| | |
|---|---|
| Vøggustovur | 17,2 mió |

| | |
|---|---|
| Barnagarðsstovur | 9,1 mió |
| Frítíðarskúli | 9,6 mió |

Hesi tølini eru tengd at barnatalinum, sum merkir, at hesar útreiðslurnar til betri normeringar fara at hækka, um barnatalið hækkar eisini komandi árini.

Útrokningarnar eru harumframt gjørdar í samsvari við núverandi útrokningarlykil, har grundarlagið er ásetingin í dagstovnalógini, har tímarnir til børnini skulu vera minst 2/3 námsfrøðingar. Hin triðingurin er hjálparfólk. Lønarsatsurin er miðal starvsaldur á øllum dagstovnaøkinum fyri ávikavist námsfrøðingar og hjálparfólk.

Foreldragjaldið er í dag 27%. Um óbroytt fer foreldragjaldið at hækka samsvarandi normeringsvøkstrinum, men tað ger so eisini, at aðrar útreiðslur á dagstovnaøkinum fara at hækka, t.e. systkinaavslátturin og fíggjarlig frípláss.

Fyrivarni skal takast fyri, at skipanirnar í Danmark og Føroyum eru ikki heilt eins, eitt nú viðvíkjandi undirvísingarskyldu og frítíðarskúla. Í Danmark fara børn í skúla á seks ára aldri.

Kostnaður til tímar vegna serligan tørv/serstovur er ikki íroknaður minimumsnormeringini. Hetta liggur eisini uttanfyri vanligu normeringina í Tórshavnar kommunu.

Metast má, at verður normeringin hækkað til at verða á sama stigi sum tann danska minimumsnormeringin, so er skilagott at gera hetta yvir eitt áramál, har hædd verður tikin fyri samlaðu kommunalu fíggjarætlanini komandi árini, og har man samstundis streingir á landsmyndugleikarnar um at útbúgva fleiri námsfrøðingar til dagstovnaøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fíggjarætlanin.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 16. november 2020:** Nevndin mælir til breiða politiska semju um at hækka normeringarnar sambært yvirlitinum omanfyri yvir eitt áramál og at heita á landsstýrið um at raðfesta útbúgving av námsfrøðingum til dagstovnaøkið. Málið beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

## 275/20 Ábøtur á venjingarrúm í Høllini á Hálsi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 247/20 | 20/04037-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 275/20 | 20/04037-1 |

**Upprunin til málið:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Hann biður somuleiðis vegna Javnaðarflokkin um at fáa sett hetta uppskot fram til atkvøðugreiðslu

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Uppskotið snýr seg í stuttum um, at venjingarrúmið treingir til ábøtur, og at feløgini hava lagt nógv sjálvboðið arbeiði, í tað sum er gjørt.

Eins og onnur feløg í kommununi hava fingið stuðul til hesa skilagóðu íløgu, skal høllin á Hálsi eisini raðfestast á sama hátt sum onnur feløg í kommununi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Javnaðarflokkurin mælir býráðnum til at játta kr. 500.000 til endamálið av kontu 5717 Ítróttaranlegg av meirinntøkum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá einum samdum býráði: Mælt verður til at játta kr. 500.000 til ítróttaranlegg til vektrúm í Høllini á Hálsi at fíggja av meirinntøkum.

Broytingaruppskotið varð einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

# 276/20 Navn til p-økið við Mortansstovubrekku

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 30.09.2020 | 1/20 | 20/03596-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 281/20 | 20/03596-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 289/20 | 20/03596-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 276/20 | 20/03596-1 |

**Upprunin til málið:**
Marin Katrina Frýdal, býráðslimur.

**Lýsing av málinum:**
Gøtunavnanevndin er biðin um at koma við uppskoti/-um til navn til parkeringsøkið við Mortansstovubrekku. Kort yvir økið er hjálagt.

Til kunningar kann nevnast, at Gøtunavnanevndini umrøddi spurningin um navn til sama parkeringsøki á fundi 15.12.2011. Tað snúði seg serliga um staðarnavnið Svínaryggur. Nevndin viðgjørdi tá málið av sínum eintingum.
Í gerðabókini frá fundinum stendur m.a.: "Fólk eru farin at nevna nýggja parkeringsøkið við Jóannesar Patursssonar gøtu *Parkeringsplássið á Svínaryggi*, og spurt varð, um hetta er hóskandi navn." Nevndarlimur, sum legði málið fram, hevði kannað ymiskt viðvíkjandi navninum Svínaryggur og greiddi frá tí. Niðurstøðan hjá Gøtunavnanevndini var tá: "Nevndin metir, at tað er ikki av leið at nýta staðarnavnið Svínaryggur, men hon heldur, at um parkeringsøkið alment skal hava eitt navn, er betri at nýta *undir Svínaryggi*." (Mál nr. 17/03734)

**Gøtunavnanevndin 30. september 2020: Nevndin mælir til at nevna økið «undir Svínaryggi»**

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Útsett.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

# 277/20 Uppskot at velja uttanhýsis umboð fyri kommunustýrið í tvey skúlastýri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 246/19 | 18/03914-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 269/20 | 18/03914-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 229/20 | 18/03914-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 277/20 | 18/03914-1 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot frá Gunvør Balle, at tað eina kommunustýrisumboðið í skúlastýrum verður eitt uttanhýsis umboð.

**Lýsing av málinum**
Sambært fólkaskúlalógini § 50 skal kommunustýrið velja umboð í skúlastýrini. Tvey kommunustýrisumboð skulu veljast í hvørt stýri, men eru færri enn 20 næmingar í einum skúla, skal bert eitt kommunustýrisumboð veljast í skúlastýrið í tí skúlanum.

Sambært frískúlalógini § 12 stk. 4 kann kommunustýrið eftir áheitan frá skúlastýrinum gera av, at ein av limum tess er við á skúlastýrisfundi uttan atkvøðurætt. Eitt kommunustýrisumboð er í skúlastýrinum í Lítlaskúla.

Í Tórshavnar kommunu eru 10 kommunalir fólkaskúlar og tveir frískúlar.

Á fundum við forkvinnur/formenn í skúlastýrunum og í eftirmetingini av Nám X hevur verið umrøtt, at annað kommunustýrisumboðið í skúlastýrinum kundi verið eitt uttanhýsis umboð. Sostatt hevði býráðið valt eitt umboð, sum er býráðslimur og eitt uttanhýsis umboð. Hetta umboð kundi t.d. verið fyri vinnuna, arbeiðsmarknaðin, miðnámsútbúgvingarnar ella frítíðarfelagsskapir.

Ætlanin er, at hesi umboð styrkja samband og samstarv millum skúla og útbúgvingarstovnar, vinnu, felagsskapir og lokalsamfelag. Sum eina roynd verður mælt til, at í fyrstu syftu fer ein býráðslimur úr skúlastýrunum í ávikavist Eystursskúlanum og Skúlanum á Fløtum, og býráðið velur so eitt umboð fyri vinnuna í skúlastýrið í Eystursskúlanum og eitt umboð fyri miðnám í skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum.

Mannagongdin at velja uttanhýsis umboðini í Tórshavnar kommunu kann vera tann, at heitt verður á Vinnuhúsið at finna eitt umboð fyri vinnuna og á Glasir at finna eitt umboð fyri miðnámsútbúgvingarnar.

Val til skúlastýrini er samstundis sum býráðsval, og valskeiðið hjá skúlastýrinum er tað sama sum valskeiðið hjá kommunustýrinum. Sostatt eru smá tvey ár eftir av hesum valskeiði. Við støði í eini tílíkari roynd at velja uttanhýsis umboð í tvey skúlastýri, kann á heysti 2020 støða takast til, um Tórshavnar kommuna skal velja eitt uttanhýsis umboð í øll skúlastýrini, sum sambært lógini hava meir enn eitt kommunustýrisumboð, ella hildið verður fram sum nú, at bæði umboðini eru býráðslimir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 44 frá 30. apríl 2018
Løgtingslóg nr. 46 frá 26. mars 2002 um frískúlar

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við uppskotinum at velja eitt uttanhýsis umboð í skúlastýrið í Eysturskúlanum og eitt uttanhýsis umboð í skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, stemma blankt.

**Ískoyti**:
Síðani samtyktina er málið ikki komið víðari í skipanini.

Skotið verður tí upp at taka málið uppaftur nú í sambandi við at kommunustýrisval er í næstum og at eitt komandi nývalt býráð kann fáa høvi til at velja nýggj umboð við støði í hesum máli.

Skotið verður upp at halda fast við ætlanina og evt. víðkað royndarverkætlanina við onkrum skúla afturat.

Møguligt samtykt í málinum kemur so at liggja til grund í málunum viðv. val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini, ið ætlandi verður í desember 2020. Av tí at talan er um lutfalsval í sambandi við val av slíkum

umboðum, verður mælt til, at møgulig samgongu/andstøða avráða sínamillum í hvørjum føri tey velja eitt kommunustýrisumboð, sum er býráðslimur og sum ikki er tað.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at velja eitt uttanhýsis umboð í skúlastýrið fyri Skúlan á Fløtum og Eysturskúlan, ið ikki er býráðlimur. Málið verður beint í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minnluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, atkvøður ímóti og mælir til at ein heildarætlan verður gjørd fyri økið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

## 278/20 Bátahylur í Álakeri - gøta á brimgarð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.11.2020 | 230/20 | 20/04321-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 308/20 | 20/04321-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 278/20 | 20/04321-1 |
| 4 Vinnunevndin | 24.11.2020 | 85/20 | 20/04321-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar Havn hevur í eina tíð arbeitt við at gera ein nýggjan bátahyl í Álakeri. Fyrr í ár varð samtykt at taka av tilboðnum frá p/f Tórhall Hansen og at gera sáttmála um arbeiðið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur, saman við Tórshavnar havn, arbeitt við skipan av økinum kring sjálvan bátahylin og í tí sambandinum er gøtan á brimgarðinum komin upp at venda.

Býarskipanarliga er tað ynskiligt, at gera økið áhugavert hjá borgarum at ferðast í, og í tí sambandinum hevur eitt ynski verið at gera brimgarðin atkomuligan hjá øllum borgarum, soleiðis at borgarin hevur møguleika at ganga sær ein túr út á sjógvin at njóta útsýnið, uppihalda sær og møguliga eisini nýta eitt fiskipláss fyri endan av brimgarðinum. Sí viðheftu støðumynd, skjal nr. 20/04321-2 og visualisering av økinum, skjal nr. 20/4321-5.

Hetta átakið verður somuleiðis mett sum eitt gott íkast til Landssjúkrahúsið, sum væntandi við sjúklingum og vitjandi kemur at hava gagn av at kunna ganga sær ein túr í umkringliggjandi økinum.

Arbeiðstøkuna, at gera brimgarðin, hevur p/f Tórhall Hansen fingið. Tórshavnar havn hevur síðani samskift við arbeiðstakaran um somuleiðis at átaka sær at gera gøtuna á brimgarðinum. Fyritøkan hevur latið eitt tilboð inn áljóðandi kr. 500.000 u/mvg. Hesin kostnaðurin inniber ikki kostnað fyri ljósseting, og tí verður mett, at arbeiðstøkan samlað verður áljóðandi kr. 600.000. Arbeiðið verður væntandi sett í gongd á vári 2021.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í økisparti B2 í Almennu byggisamtykini, sum ásetur at umráðisparturin verður lagdur til vinnuendamál, ið hava samband við skipaferðslu og fiskiskap og til virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. skrivstovur, tænastuvirksemi, bilstøðlar og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hugsandi er, at Álaker í framtíðini verður meiri býarkent, tó samansett við vinnuligum virksemi, og tí verður somuleiðis mett, at ynski at gera økið áhugavert at uppihalda sær í hóskar væl til ta visjónina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/00083 Bátahylur í Álakeri

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

-

**Skjøl**

- 20/04321-2, 01_Støðumynd_23.10.2020
- 20/04321-5, Visualisering av bátahyli við gøtu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at játta sum eykajáttan kr. 600.000 av kt. 6210 til kt. 7476, L74010, Bátahylur í Álakeri, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
Somuleiðis verður mælt til, at málið fer í vinnunevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 24. november 2020:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

## 279/20 Kommunuætlanin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 110/17 | 15/02638-18 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 84/17 | 15/02638-18 |
| 3 Mentamálanevndin | 31.05.2017 | 139/17 | 15/02638-18 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.06.2019 | 30/19 | 15/02638-18 |
| 5 Vinnunevndin | 06.06.2019 | 34/19 | 15/02638-18 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 109/19 | 15/02638-18 |
| 7 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 53/19 | 15/02638-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 09.09.2019 | 238/19 | 15/02638-18 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 12.09.2019 | 24/19 | 15/02638-18 |
| 10 Eldranevndin | 12.09.2019 | 16/19 | 15/02638-18 |
| 11 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 63/20 | 15/02638-18 |
| 12 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 15/20 | 15/02638-18 |
| 13 Vinnunevndin | 09.03.2020 | 25/20 | 15/02638-18 |
| 14 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 89/20 | 15/02638-18 |
| 15 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.03.2020 | 9/20 | 15/02638-18 |
| 16 Økisnevndin | 09.03.2020 | 3/20 | 15/02638-18 |
| 17 Trivnaðarnevndin | 14.05.2020 | 17/20 | 15/02638-18 |
| 18 Eldranevndin | 14.05.2020 | 1/20 | 15/02638-18 |
| 19 Mentamálanevndin | 13.05.2020 | 141/20 | 15/02638-18 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.05.2020 | 84/20 | 15/02638-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 137/20 | 15/02638-18 |
| 22 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 109/20 | 15/02638-18 |
| 23 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 192/20 | 15/02638-18 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.11.2020 | 227/20 | 15/02638-18 |
| 25 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 309/20 | 15/02638-18 |
| 26 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 279/20 | 15/02638-18 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunuætlanin er yvirskipaða stýringsamboðið fyri planlegging og menning av Tórshavnar kommunu. Kommunuætlanin sambindir strategiir, ætlanir, verkætlanir og leiðreglur, sum saman skapa karmarnar fyri menning í kommununi.

Sostatt lýsir kommunuætlanin mál og stevnumið hjá býráðnum fyri framtíðarmenning í kommununi, eitt nú fólkavøkstur og tænastustøði, umframt mál fyri fysisku planleggingina, eitt nú hvussu kommunan skal vaksa, býti millum bústaðir, vinnumenning, eldraøkið, infrakervi, náttúruvernd, landbúnað o.s.fr.

Kommunuætlanin byggir á visjónina hjá býráðnum við samgonguskjalinum sum grundarlag.

Altso er kommunuætlanin ein heildarætlan og fevnir um ráðlegging fyri eitt tíðarskeið á ávikavist 4 ár og 12 ár. Strategiskar ætlanir og langtíðarætlanir kunnu tó strekkja seg yvir eitt longri tíðarskeið.

Kommunuætlanin skal fevna um alla kommununa, og verður hon dagførd 4. hvørt ár.

Verandi kommunuætlan er frá 2014. Ætlanin er at henda tekur við 1. januar 2020.

**Mentanarøkið:**
Sum liður í tilgongdini við gerð av dagførdari kommunuætlan er uppskot gjørt viðvíkjandi serligum viðurskiftum o.a. innan grein 4 fólkaskúlar og grein 5 mentan og ítróttur. Sí hjálagt uppskot.

Á fundinum fer umsitingin at leggja fram yvirornað um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið við atliti til at umsitingin lagar uppskotið til í víðari tilgongdini til eitt samlað rit sum verður lagt fyri í summar.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at dagføra kommunuætlanina, hevur verið arbeitt við evninum 'Fólk og Vøkstur', sí viðhefta skjal, Kommunuætlan BB-nevndin. Umframt evni 'Fólk og vøkstur', verður arbeitt við hesum evnum:

- Náttúra sum frítíðarstaður
- Umhvørvið
- Vinna
- Infrakervi og teknikkur
- Eldraøkið
- Børn og ung
- Mentan
- Sosialaøkið

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at umrøða viðhefta uppskot við atliti til, at umsitingin arbeiðir framhaldandi við at dagføra kommunuætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Málið umrøtt.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Barna- og ungdómsøkið
Sum liður í tilgongdini við gerð av dagførdari kommunuætlan er uppskot gjørt viðvíkjandi serligum viðurskiftum o.a. innan grein 3 Barna- og ungdómsøkið. Sí hjálagt uppskot.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 31. mai 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið við at dagføra kommunuætlanina er tikið upp aftur, og er avgjørt at skipa kommunuætlanina í 6 evnir. Hesi eru:

1. Fólk og bústaðir
2. Náttúra, varðveiting og umhvørvi

3. Vinna
4. Undirstøðukervi
5. Mentan, frítíð og útilív
6. Tænastuøkið

Evnið ‘Fólk og bústaðir’ fevnir í høvuðsheitum um lýsing av leiðreglum innan bústaðarbygging og býarmenning, framskriving av fólkavøkstri og ávísing av hóskandi økjum til býarvøkstur.

Evnið ‘Náttúra, varðveiting og umhvørvi’ fevnir í høvuðsheitum um lýsing av leiðreglum og arbeiðslagi innan náttúruvernd, varðveiting av friðaðum bygningum og býarumhvørvum og innan orku- og umhvørvispolitikk hjá Tórshavnar kommunu.

Evnið ‘Vinna’ fevnir í høvuðsheitum um lýsing av vinnulívi í Tórshavnar kommunu og leiðreglum innan staðseting av vinnulívi og nýggjum vinnuøkjum.

Evnið ‘Undirstøðukervi’ fevnir í høvuðsheitum um planlegging av Tórshavnar kommunu í mun til vegir og ferðslu og í mun til tekniskar leiðingar, so sum kloakk, vatnveiting o.a.

Evnið ‘Mentan, frítíð og útilív’ snýr seg í høvuðsheitum um skipan av mentan og frítíðarvirksemi í kommununi, bæði innan- og uttandura.

Evnið ‘Tænastuøkið’ snýr seg í høvuðsheitum um lýsing av kommunalu tænastuni innan økini *Børn og ung, Heilsu og umsorgan og Sosialøkið*, nú og frammi í tíðini.

Tíðarætlanin fyri gerð av kommunuætlanini er soljóðandi:

- Framløga av evnum 1, 2 og 3 (juni)
- Framløga av evnum 4, 5 og 6 (september)
- Liðuggerð av evnum og uppseting til hoyring (september)
- Almenn hoyring (ultimo september / primo oktober)
- Viðgerð av innkomnum viðmerkingum (ultimo oktober)
- Endalig redigering og framløga í fíggjarnevnd (november)
- Endalig samtykt í býráðnum (november/desember)

Fyrstu trý evnini verða nú løgd fyri nevnd til kunning og umrøðu. Hesi eru:
1. Fólk og bústaðir
2. Náttúra, varðveiting og umhvørvi
3. Vinna

Evni 1, 2 & 3 skulu til kunning og umrøðu í byggi- og býarskipanarnevndini
Evni 2 skal til kunning og umrøðu í náttúru- og umhvørvisnevndini
Evni 3 skal til kunning og umrøðu í vinnunevndini

**Skjøl:**
- Lesivegleiðing til kommunuætlanina, sí skjal nr. 15/02638-40
- Evni 1: Fólk og bústaðir, sí skjal nr. 15/02638-41
- Evni 2: Náttúra, varðveiting og umhvørvi, skjal nr. 15/02638-42
- Evni 3: Vinna, sí skjal nr. 15/02638-43

Til fundirnar verða evnini løgd fram, og er ynskiligt at viðmerkingar verða at umrøða á fundunum, og annars at viðmerkingar verða sendar umvegis journalina at umrøða og raðfesta.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin, tekniski stjórin, virkandi leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla ávikavist byggi- og býarskipanarnevndini, náttúru- og umhvørvisnevndini og vinnunevndini til at umrøða evnini við atliti at umsitingin arbeiðir framhaldandi við at dagføra kommunuætlanina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. juni 2019:** Umrøtt.

**Vinnunevndin 06. juni 2019:** Umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Rógvi Nybo, samskipari legði teir tríggjar fyrstu partarnar av kommunuætlanini fram:

1. Fólk og bústaðir
2. Náttúra, varðveiting og umhvørvi
3. Vinna

**Ískoyti:**
Sum liður í arbeiðinum at dagføra kommunuætlanina, verða tey seinastu trý evnini av Kommunuætlanini løgd fyri nevnd til kunning og umrøðu. Hesi eru:

4. Undirstøðu- og infrakervið
5. Mentan, frítíð og útilív
6. Tænastuøkið

Evni 4 skal til kunning og umrøðu í Teknisku nevnd.
Evni 5 skal til kunning og umrøðu í Mentanarnevndini.
Evni 6 skal til kunning og umrøðu í Trivnaðarnevndini.

**Skjøl:**

- Lesivegleiðing til kommunuætlanina, sí skjal nr. 15/02638-40
- Evni 4: Undirstøðu- og infrakervið, sí skjal nr. (15/02638-49)
- Evni 5: Mentan, frítíð og útilív, sí skjal nr. (15/02638-50)
- Evni 6: Tænastuøkið, sí skjal nr. (15/02638-51)
- Til fundirnar verða evnini løgd fram, og er ynskiligt at viðmerkingar verða at umrøða á fundunum, og annars at viðmerkingar verða sendar umvegis journalina at umrøða og raðfesta.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini, leiðarin á umhvørvisdeildini, leiðarin á mentamáladeildini og leiðarin á barna- & ungdómsdeildini mæla ávikavist Teknisku nevnd, Mentamálanevndini og Trivnaðarnevndini til at umrøða evnini við atliti til at umsitingin arbeiðir framhaldandi við at dagføra kommunuætlanina.

**Mentamálanevndin 09. september 2019:** Umrøtt.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Umrøtt.

**Eldranevndin 12. september 2019:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 12. september 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Uppskot til kommunuætlan 2020 verður við hesum lagt fyri fíggjarnevndina at beina í nevndir til hoyringar.

Tá ið kommunuætlanin hevur verið í fíggjarnevndin aftur og samtykt í býráðnum, er ætlanin at senda uppskot til kommunuætlan 2020 í almenna hoyring í 6 vikur.

**Lýsing av Kommunuætlan 2020:**

Kommunuætlanin er yvirskipaða stýringsamboðið fyri planlegging og menning av Tórshavnar kommunu.

Kommunuætlanin vísir, á hvørjum grundarlagi og innan hvørjar karmar avgerðir verða tiknar um lendisnýtslu í kommununi og hvørji atlit skulu takast og vigast upp móti hvørjum øðrum, tá avgerðir skulu takast um lendisnýtslu.

Kommunuætlanin samantvinnar landslógir um eitt nú býarskipan, vegir, náttúru- og umhvørvisvernd og almennar tænastur við politikkir hjá kommununi um bústaðir, umhvørvi og orku, parkering, frítíð og ítrótt, eldrapolitikk og barna- og ungdómspolitik. Harumframt lýsir kommunuætlanin framtíðar tørv á bústøðum, vegum, dagstovnum og skúlum, ellis- og røktarheimum og so framvegis.

Ein kommunuætlan hyggur ávikavist fýra og 12 ár fram. Ætlanin við eini kommunuætlan er, at hon skal dagførast fjórða hvørt ár, og at hvørt býráð skal meta, um tann galdandi kommunuætlanin skal dagførast lutvíst ella heilt.

Hetta merkir eisini at ein dagførd kommunuætlan natúrliga byggir víðari á nógv av tí, ið var í fyrru kommunuætlanini, og sum framvegis er galdandi.
Stórar broytingar eru farnar fram í samfelagnum og serliga í Tórshavnar kommunu síðan seinastu kommunuætlan. Talan er tí í stóran mun um eina heilt nýggja kommunuætlan, sum tó byggir víðari á fyrstu kommunuætlanina frá 2014.

Høvuðsbroytingarnar við kommunuætlan 2020 eru, at hon er munandi meira víðfevnd enn tann fyrra, hon er býtt sundur í seks evni og hon viðgerð munandi fleiri politikkøki enn fyrra kommunuætlanin.

Kommunuætlan 2020 er býtt sundur í hesi evni, sum verða viðgjørd hvør sær og kunnu lesast einsæris:
1. Fólk og bústaðir
2. Náttúra, varðveiting og umhvørvi
3. Vinna
4. Undirstøðukervið
5. Mentan, frítíð og útilív
6. Tænastuøkið

Harumframt er kommunuætlan 2020 gjørd klár til at leggja á ein talgildan pall hjá Tórshavnar kommunu, tá hesin verður klárur saman við nýggju heimasíðuni. Stóri fyrimunurin við hesum er, at øll kort, ið hoyra til kommunuætlanina, verða sjálvvirkandi dagførd so hvørt sum broytingar verða gjørdar og lagdar inn í kortskipanina hjá Tórshavnar kommunu. Stóri fyrimunurin við hesum er at øll, ið nýta kommunuætlanina sum kunningaramboð, fáa dagførdar kortupplýsingar.

Kommunuætlanin er eitt týdningarmikið amboð, sum fyrisiting og politikarar í Tórshavnar kommunu nýta í teirra arbeiði.

Kommunuætlanin er eisini eitt týdningarmikið amboð til kunning til borgarar, fyritøkur, stovnar og áhugafelagsskapir, sum her kunnu fáa vitan og kunning um grundleggjandi viðurskifti í kommununi, hvussu arbeitt verður og hvørjar ætlanir eru fyri framtíðina.

Hon er ætlað øllum teimum, ið so ella so koma í samband við Tórshavnar kommunu, brúka tænastur frá kommununi og merkja tey inntriv, ið verða gjørd av kommununi.

**Tíðarætlan:**
Arbeitt verður fram móti at býráðið kann samtykkja Kommunuætlan 2020 endaliga á býráðsfundi í juni. Til tess at røkka hesum máli verður arbeitt við hesari tíðarætlan:
- 27/2 – Fíggjarnevnd at beina í býráðsnevndir og býráðið til viðgerð
- 9/3 – 25/3 Viðgerð í nevndum og býráðnum
- 26/3 – 7/5 Almenn hoyring í 6 vikur
- 30/3 – 3/4 Borgarafundur um kommunuætlan

- 11/5 – 2/6 Viðgerð av innkomnum viðmerkingum
- 8/6 – 24/6 Endalig samtykt í fíggjarnevndini og býráðnum.

**Hoyringsleistur:**
Skotið verður upp at Uppskot til kommunuætlan 2020 verður lagt til almenna í 6 vikur. Skotið verður upp at uppskotið verður lagt á heimasíðuna hjá kommununi sum eitt talgilt eintak, og at kunnað verður um hetta umvegis heimasíðu, talgildar miðlar og møguliga við tíðindaskrivi til fjølmiðlar.

Harumframt verður mælt til at skipa fyri einum stórum almennum borgarafundi ein av døgunum 1-3. apríl, og at kunnað verður um hetta beinanvegin tá uppskotið verður lagt til almenna hoyring, sí omanfyri.

**Skjøl:**
- Journal nr. 15/02638-69 Uppskot til Kommunuætlan 2020

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniskur stjóri og deildarleiðarin á Býarskipanardeildini mæla fíggjarnevndini at beina uppskot til kommunuætlan 2020 í Teknisku nevnd, Byggi- og býarskipanarnevndina, Vinnunevndina, Mentamálanevndina, Náttúru- og umhvørvisnevndina, Økisnevndina, Trivnaðarnevndina og Eldranevndina og staðbundnu nevndirnar til hoyringar at leggja fyri fíggjarnevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur kommunuætlanina fram

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Økisnevndin 09. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

Nevndin ynskir at arbeiðið við bygdaætlaninum verður tikið upp so skjótt sum kommunuætlanin er avgreidd.

**Vinnunevndin 09. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Framlagt og samtykt at viðgerða málið á eyka mentamálanevndarfundi í apríl.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer til almenna hoyring.

**Mentamálanevndin 13. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer út til almenna hoyring.

**Trivnaðarnevndin 14. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer út til almenna hoyring.

**Eldranevndin 14. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer út til almenna hoyring.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við kommunuætlanini, so hon fer út til almenna hoyring.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**:
Framhald av viðgerð frá fundinum 13. mai 2020. Hesaferð av grein 5 viðurskiftum og restin viðv. grein 3.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Uppskotið til Kommunuætlanina 2020 hevur verið til almenna og innanhýsis hoyring. Innkomnu viðmerkingar eru viðgjørdar og ávísar tillagingar gjørdar í uppskotinum. Niðanfyri er nærri lýsing av hoyringsleistinum, innkomnu viðmerkingum umframt broytingum, ið eru framdar.

**Hoyringsleistur:**
Almenna hoyringin fevndi um tíðarskeiðið 29.05.2020-10.08.2020. Í hesum sambandi hevur eitt talgilt eintak av Kommunuætlanini 2020 verið tøkt á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu. Ætlanin var eisini at hava ein borgarafund um kommunuætlanina, men hesin bleiv avlýstur vegna covid19. Ístaðin bleiv ein talgild framløga, sum lýsti Kommunuætlanina 2020 í stuttum, løgd út á heimasíðuna hjá kommununi.
Uppskotið til Kommunuætlanina 2020 hevur eisini verið til innanhýsis hoyring hjá øllum deildum í kommununi. Viðmerkingar og broytingar til kommunuætlanini stava sostatt bæði frá almennu og innanhýsis hoyringini.

**Almenna hoyringin – viðmerkingar og broytingar:**
Í alt eru 14 viðmerkingarnar móttiknar til Kommunuætlanina 2020 frá almenninginum, tær eru allar hjálagdar sum fylgjiskjal. 7 viðmerkingar eru komnar inn frá borgarum, umframt 7 viðmerkingar frá stovnum og felagsskapum. Viðmerkingarnar eru ymiskar, har summar eru meiri ítøkiligar rættingar til tekstin, meðan aðrar eru meiri yvirskipaðar um evni og vantar sum heild í kommunuætlanini.

Viðmerkingarnar frá almennu hoyringini eru bólkaðar í 8 tema.

1. Um menning av fólkabólkasøvnum (viðmerking 1)
2. Um miðbýin og umhvørvi til børn (viðmerking 2+3)
3. Um raðfesting av byggilendi (viðmerking 4+5+6)
4. Um bláu økini (viðmerking 7)
5. Um ítróttarviðurskifti (viðmerking 8)
6. Um viðurskifti hjá vinnuni (viðmerking 9+10)
7. Um jarðfrøðisvirði, plantu- og djóralív (viðmerking 11)
8. Um ljóð og óljóð (viðmerking 12+13)
9. Rættingar til tekstin í Kommunuætlanini 2020 (viðmerking 8+11+12+14)

Viðmerkingarnar eru viðgjørdar og savnaðar í hjálagda skjalinum, ***Yvirlit yvir viðmerkingum og rættingum frá almennu og innanhýsis hoyringini*, journalnr. 15/02638-87**. Yvirlitið vísir eisini uppskot til svar til viðmerkingarnar umframt hvørjar hava ført til broytingar í kommunuætlanini.

**Innanhýsis hoyring – viðmerkingar og broytingar:**
Fleiri deildir í kommununi eru eisini komnar við viðmerkingum til Kommunuætlanina 2020. Ymiskar broytingar eru gjørdar í uppskotinum smb. hesum, sum kunnu bólkast soleiðis:

a) <u>Bygnaðarligar broytingar</u>

Sum dømi kann nevnast, at innihaldsyvirlitið er flutt nakrar síður fram, so lesarin skjótari fær eitt yvirlit yvir kapitlum og evnum í kommunuætlanini. Harumframt eru ávís undirevni í kapittul 2 og 3 umskipaði, soleiðis at raðfylgjan er greiðari fyri lesaran.

b) Rættingar og ískoyti til verandi tekst
Rættingar og/ella ískoyti til verandi tekst er gjørt í øllum kapitlum (0-6).
Eitt nú er brotið um byggisamtyktir, sum stendur undir Karmar í hvørjum kapitli, rættað. Eitt ískoytið er eisini lagt afturat í «Innleiðing» um talgilding av kommunuætlanini.

c) Rættingar til kort, myndir og tabellir
Flestu kort eru rættaði umframt fleiri tabellir umframt ein einkult mynd. Til dømis er kortið Bygnaður í Tórshavn rættað, so tað vísir bæði bústaðardeplar og miðstaðardepilin. Harumframt er tabellin «Mesta næmingatal í fólkaskúlum...» dagførd við røttum tølum.

d) Nýggj tekstbrot
Fleiri nýggj tekstbrot eru løgd afturat í kap.0-5. Í kapittul 0 við Innleiðing, er nýtt brot um Smart City lagt afturat. Harumframt eru fleiri politikkir og ætlanir lagdar afturat viðkomandi kapitlum, eitt nú Miðbýarætlan, Gulaætlan og Grønaætlan.

e) Strikaður tekstur
Í fleiri kapitlum er úrvaldur tekstur strikaður, sum mettur var óneyðugur fyri evni og Kommunuætlanina 2020.

Samlaða yvirlitið yvir broytingum og rættingum, sum eru framdar, eru at síggja í hjálagda skjalinum***, Yvirlit yvir viðmerkingum og rættingum frá almennu og innanhýsis hoyringini,*** **journalnr. 15/02638-87**

Umframt hesar eru eisini smærri málsligar broytingar gjørdar gjøgnumgangandi í øllum kapitlum. Eitt nú eru málsligar villur rættaðar og einkult orð løgd afturat ella broytt í setningum.

Sostatt er uppskotið til Kommunuætlanina 2020 dagført við støði í innkomnum viðmerkingum frá innanhýsis og almennu hoyringini.
Dagførda uppskotið av Kommunuætlanini 2020 er hjálagt sum fylgiskjal.

**Skjøl:**
- *Dagførd Kommunuætlan 2020,* journalnr. 15/02638-88
- *Yvirlit yvir viðmerkingum og rættingum frá almennu og innanhýsis hoyringini,* journalnr. 15/02638-87
- *Viðmerkingar frá almennu hoyringini, nr. 1-14*, journalnr. 15/02638-86

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at samtykkja dagførda uppskotið til kommunuætlanina 2020 við omanfyri nevndu broytingum frá hoyringini
- at samtykkja svar til innkomnu viðmerkingarnar frá almennu hoyringini
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir byggi- og bárskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

# 280/20 Umsókn um byggiloyvi til Ovasavn á matr. nr. 92a og 19, Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.11.2020 | 222/20 | 20/03248-5 |
| 2 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 280/20 | 20/03248-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 303/20 | 20/03248-5 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn um byggiloyvi til Ovasavn á matr. nr. 92a og 19, Nólsoy, dagfest 31.08.2020.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum D í byggisamtyktini fyri Nólsoy, har ásetingarnar eru:

1. Økið verður lagt av til almennar stovnar, undirvísing, mentanarlig endamál, átrúnaðarlig, heilsulig endamál o.t.
2. Innan fyri økispartarnar mugu bara verða gjørd slík virki ella bygningar, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økispørtum og tænastuvirksemi, ið hava samband við tey.
3. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,3 m.
4. Bygningar kunnu bara verða bygdir eftir eini byggiætlan, sum bygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrligt avmarkað øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ætlanin er at byggja fult á báðar matriklarnar, soleiðis at bygningurin verður 6,2 x 16,34 m, íalt 101,3 $m^2$, umframt terassu á 11,4 $m^2$.

Annar endin er í einari hædd, her verður bátasavnið.
Hin endin er í tveimum hæddum, við móttøku/kunningarstovu og wc í niðaru hædd og mynda- og filmssavni í ovaru hædd.

Hæddin á bygninginum til mønu er 6,3 m í øðrum endanum og 7,3 m í hinum endanum

<u>Matrikkulviðurskifti:</u>
Ætlanin er at byggja á tveir matriklar, tað er matr. nr. 92 a og 19 í Nólsoy, báðir matriklarnir eru ogn hjá Tórshavnar kommunu. Ognirnar eru íalt (46+41) 87 $m^2$ og liggja í einum neystaøki.

Øðrumegin heldur Bjargingarfelagið til og bilurin hjá teimum stendur vanliga inni á hesum matriklinum.

Neyðugt er:
- At leggja matriklarnar saman.
- At gera eldvervuveggir ímóti marki
- At brunaverja tekjuna ímóti grannamarki

<u>Tilfar latið inn:</u>
Kommunan hevur móttikið 14 tekningar, dagfestar 25.08.2020, teknað hevur ÓSL.
Tilfar sum manglar til endaliga byggimálsviðgerð:
- Frágreiðing um tilfar og konstruktiónir
- Orkuútrokningar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Spurningurin um stuðul verður viðgjørdur av Mentamáladeildini, hetta er eitt sjálvstøðugt mál.

Fíggjarnevndin hevur samtykt tann 17. juni 2020 at fara undir at gera treytaðan leigusáttmála við stuðulsnevndina um langtíðarleigu av matr. 19 og 92a, hetta er eitt sjálvstøðugt mál, j.nr. 16/03741.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Sambært ásetingunum í byggisamtyktini má nettonýtingarstigið ikki fara upp um 0,3.
Talan er um eitt øki sum liggur ímillum neyst, har tað er loyvt at byggja 100%, og tí er tað ikki eitt stórt frávik í mun til økið uttanum.

**Umhvørvisárin**
Viðgjørt eftir umhvørvisflokking 1-2

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Hevur ikki verið hjá øðrum.

**Skjøl**
j.nr. 20/03248-1, umsókn og tekningar

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Spurningurin um fíggjarligar stuðul verður viðgjørdur av kommununi og fíggjarnevndin hevur samtykt at fara undir at gera treytaðan leigusáttmála við stuðulsnevndina um langtíðarleigu av matr. 19 og 92a.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at ganga umsóknini um byggiloyvi á møti sum frávik, treytað av:

- at býráðið góðkennir projektið sum eina byggiætlan fyri økið, vísandi til ásetingarnar í byggisamtyktini fyri Nólsoy, §21 stk. 4.
- at leigusáttmáli fyri matr. nr. 92a og 19 í Nólsoy verður undirskrivaður

og annars við treytum sum umsitingin setur og at beina málið í býráðið í sambandi við byggiætlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 281/20 Nýggj serstøk byggisamtykt á Glyvursnesi, matr. nr. 2a og 2c, Kirkjubøur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 175/20 | 20/01016-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 188/20 | 20/01016-1 |
| 3 Vinnunevndin | 30.11.2020 | 86/20 | 20/01016-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 281/20 | 20/01016-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna er farin undir at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og varð endurskoðaninløgd til almenna hoyring 25. juni 2020.

Í verandi almennu byggisamtykt eru rættiliga nógv ymisk øki, serliga vinnuøki. Hetta kann tykjast fløkjut og hevur eisini fleiri broytingar við sær, av tí at munirnir teirra millum eru avmarkaðir. Ynski er at fækka um hesi økini, soleiðis at ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini verða heldur breiðari, meðan man, um neyðugt, kann gera neyvari ásetingar fyri ymisk øki í serstakari byggisamtykt. Hetta við tí fyri eyga, at færri broytingar verða í tí almennu byggisamtyktini, meðan man í teimum serstøku byggisamtyktunum kann taka atlit til ítøkiligar verkætlanir, politikkir, ætlanir o.s.fr.

Økið, sum uppskotið til serstaka byggisamtykt á Glyvursnesi er galdandi fyri, liggur sum B11-vinnuøki í almennu byggisamtyktini. Í uppskotinum til endurskoðan av almennu byggisamtyktini verður mælt til, at verandi B11 øki verður koyrt úr almennu byggisamtyktini, og at økið verður broytt til 4. grundumráði. Tískil verður neyðugt við einari serstakari byggisamtykt fyri økið, ið inniheldur tær somu ásetingarnar, sum í verandi B11 øki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B11 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu – áðrenn endurskoðan:

*§ 18. Ásetingar fyri umráðispartarnar B11 í 3. grundumráði.*

*Umráðisparturin verður kannaður grótbrot og virksemi, ið hevur samband við hetta.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 17/02748 – Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Serstøk byggisamtykt fyri Glyvursnes,* journal nr. 20/01016-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. november 2020 | Blað nr.: 1164<br><br>Formansins merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina á Glyvursnesi og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Á fundi í mentamálanevndini hin 9. september 2020 varð samtykt at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av norðara parti av grótbrotinum til ítróttaendamál. Tískil verður hesin parturin av grótbrotinum ikki við í serstøku byggisamtyktini fyri grótbrotið á Glyvursnesi, men fer allarhelst at verða partur av byggisamtyktini fyri eitt samlað ítróttarøki á Glyvursnesi.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina á Glyvursnesi sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Glyvursnes sep. 2020* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis vinnunevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur undir við at beina málið í vinnunevndina.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

## 282/20 Nýggj umsókn um broyting av byggisamtykt til útstykking á matr. nr 83a, Hvítanes

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.06.2020 | 146/20 | 20/02249-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 155/20 | 20/02249-2 |
| 3 Hvítanesnevndin | 23.06.2020 | 4/20 | 20/02249-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2020 | 210/20 | 20/02249-2 |
| 5 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 282/20 | 20/02249-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn er send Tórshavnar kommunu, har søkt verður um at víðka almennu byggisamtyktina fyri Hvítanes fyri matr.nr. 83a. Nágreiniliga verður søkt um at víðka verandi áseting B Bústaðarøki eitt vet norð-eystureftir frá at vera 4. grundumráði til at verða B Bústaðarøki og at broyta F Almenna frítíðarøkið, sum í verandi støðu liggur sum ein partur av vegnum, eisini til B Bústaðarøki, sí skjølini *Umsókn um broyting í byggisamtyktini* og *Áðrenn broyting.*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsøkjarin hevur ætlanir um at byggja 9 bygningar, við tveimum íbúðareindum í hvørjum bygningi á ognini matr. nr. 83a, sí skjal *20200616 Hvítanes - Hús við 2 íbúðum,.pdf*. Um loyvið skal gevast til byggingina, er fyrst neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri Hvítanes, sum greitt frá omanfyri (sí kortskjal 'Eftir broyting').

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matrikul 203a liggur í 4. grundumráði og er tí avsett til landbúnað, almenn frílendi og tílíkt. Loyvt er einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

Umráðisparturin B-Bústaðarøki í serstøku byggisamtyktini fyri Hvítanes verður lagdur til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg við í mesta lagi 2 íbúðum í hvørjum húsi ella tvíhús til eitt húski í hvørjari húsaeind.

Bygging í økinum er fevnt av løgtingslóg um náttúrufriðing smb. §2, stk. 2:
*Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini:*

1) *Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginflóðarmálanum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at broytingin, ið søkt verður um, er lítil í mun til verandi byggisamtykt og at broytingin kemur at hava lítla ella onga ávirkan á verandi øki.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Umsóknin hevur verið til umrøðu hjá byggideildini og ongar viðmerkingar eru í mun til broyting av byggisamtyktini.

Um málið fer til víðari viðgerð, vil byggideildin tó síggja eina fullføra verkætlan av útstykkingini og byggingini við vegum, kloakkum o.ø., umframt tekningar av húsunum, soleiðis at ein málsviðgerð kann fara fram (sí skjali 'Umsókn um útstykkingarætlan 16.06.2020.pdf')

Mælt verður til at málið verður sent Náttúrufriðingarmyndugleikanum til nýggja viðgerð, av tí at tað eru uml. 12 ár liðin síðan eitt líknandi mál seinast var til hoyringar hjá Náttúrufriðingarmyndugleikanum (sí skjalið 'Hvítanes, Dispensatión frá Yvirfriðingarnevndini').

**Skjøl**
20/02249-4 Umsókn um útstykkingarætlan 16.06.2020.pdf
20/02249-4 20200616 Hvítanes - Hús við 2 íbúðum,.pdf
20/02249-4 Hvítanes. Dispensatión frá yvirfriðingarnevndini
20/02249-5 Áðrenn broyting
20/02249-5 Eftir broyting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja broytingina í byggisamtyktini sambært kortskjalinum *Eftir broyting*, treytað av góðkenning frá avvarðandi myndugleikum, og at beina málið í býráðið, umvegis staðbundnu nevndina.

**Hvítanesnevndin 23. juni 2020:** Staðbundna nevndin viðmælir broyting av byggisamtyktini, og at p-plássini verða flutt sunnanfyri bygginginа, eins og at rúm verður fyri einum vendiplássi sunnanfyri bygginginа.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghld Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at broytingin av byggisamtyktini fyri Hvítanes hevur ligið til almenna hoyring, hevur kommunan móttikið eina viðmerking, sí skjal *Viðmerking 1*.

Í viðmerkingini verður víst á, at eitt F-frítíðarøki liggur við endan av Gerðisvegi, og nú økið annars er útstykkjað, tykist hetta F-økið at vera ein gomul leivd, sum ikki varð broytt, tá økið varð broytt til bústaðarøki.

Harumframt verður ynski ført fram um at broyta ein part av matr. nr. 84a frá 4. grundumráði til B-bústaðarøki.

Til hetta hevur umsitingin hesar viðmerkingar:

Hetta ítøkiliga málið er í sambandi við eina bústaðarverkætlan á matr. nr. 83a og er talan sostatt ikki um eina viðgerð av byggisamtyktini fyri Hvítanes sum heild.

Arbeitt verður við at endurskoða allar byggisamtyktirnar fyri Tórshavnar kommunu. Fyrsti liður í hesum arbeiði var at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og er hesin parturin um at verða liðugur. Næst á skránni eru byggisamtyktirnar fyri bygdirnar, harímillum byggisamtyktin fyri Hvítanes. Hetta arbeiðið er byrjað, og verður væntandi liðugt síðst í komandi ár.

Mælt verður til, at viðmerkingin verður viðgjørd í sambandi við endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Hvítanes.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at halda fast í uppskotinum um broyting av byggisamtykt fyri Hvítanes, sum samtykt í býráðnum 25. juni 2020.
- at viðmerkingin, sum kom inn í sambandi við almennu hoyringina verður viðgjørd, tá byggisamtyktin fyri Hvítanes verður endurskoða í síni heild.
- at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

# 283/20 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Sílagøtu, matr. nr. 803f, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.08.2020 | 149/20 | 20/01446-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 169/20 | 20/01446-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.11.2020 | 226/20 | 20/01446-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 283/20 | 20/01446-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um bygging á matr. nr. 803f, Tórshavn. Ætlanin er at taka vinnubygningin, sum liggur á matriklinum niður, og byggja íbúðir ístaðin.

Økið liggur í einum A1 sethúsaøki. Í almennu byggisamtyktini er ásett, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini hin 18. mai 2020 varð byggimálið viðgjørt og samtykt varð at fara undir arbeiðið at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið, sí skjal *Fyrispurningur um íbúðarbygging á matr. nr. 803f, Tórshavn.*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin er at byggja ein íbúðarbygning í 2 hæddum, og skal byggingin fylgja teimum bygningsregulerandi ásetingunum fyri A1 øki. 14 íbúðir, umframt goymsluskúrar, 16 parkeringspláss, parkeringspláss til súkklur og felags tún eru í økinum. Ætlanin er at umleggja vegin frá at liggja eystanfyri bygningin, til at liggja vestanfyri bygningin.

Mett verður, at ætlaði íbúðarbygningurin hóskar betri til økið, enn vinnubygningurin, sum ætlanin er at taka niður. Matrikulin liggur í einum øki við blandaðari bygging, við sethúsum, raðhúsum, almennum stovni. Ætlaða íbúðarbyggingin á matr. nr. 804a verður mett at hóska til dámin í økinum. Bygningurin liggur framvið markinum móti suðuri og eysturi, og hevur felagsøki vestanfyri millum bygningar og parkering.
Byggingin hevur ávirkan á grannar og atkomu til grannaognir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki, kap. 4, § 5, eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu byggjast tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fyri at tryggja gott vegasamband víðari niðan eftir Sílagøtu, er neyðugt hjá umsøkjaranum at keypa uml. 12 $m^2$ av matr. nr. 803s. Samráðingarnar um hetta keypið eru í gongd.
Í sambandi við skipan av byggingini skal tryggjast at nøktandi ferðsluviðurskifti eru til grannaognir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr. nr. 803f, Pedda við Stein gøta/Sìlagøta Tórshavn,* journal. Nr. 19/01524.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Fyrispurningur um íbúðarbygging á matr. nr. 803f, Tórshavn,* journal nr. 19/01524-17.
- *Keypsavtala_07.07.2020.pdf,* journal nr. 20/01446-4.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Sílagøtu,* journal nr. 20/01446-7.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Sílagøtu, og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. august 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum treytað av at umsøkjarin ger nøktandi atkomu til matr. nr. 803y, vísandi til notat j.nr. 20/01446-9.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina av uppskotinum til serstaka byggisamtykt fyri Sílagøtu, eru viðmerkingar komnar frá trimum av grannaognunum, sí skjøl *Viðmerking 1* og *Viðmerking 2.* Niðanfyri er ein bólking og samandráttur av hesum viðmerkingum:

1. Byggingin og dámurin á økinum:

- Tað verða 3 ferðir so nógvir bústaðir á Sílagøtu (14 nýggjar íbúðir), í mun til hvussu nógvir eru í dag.
- Dámurin á byggingini er ikki í trá við friðarliga og familjuvinaligu atmosferuna í økinum, við fríttstandandi húsum við havum, trøum og øðrum vøkstri.
- Fleiri av húsunum í økinum fara at verða nógv ávirkaði av íbúðarblokkinum. Øll byggigrundin verður hevja, samstundis sum bygt verður til mark, bæði viðvíkjandi hædd og til mark – 7,5 m høgt og 2,5 m frá marki.
- Prinsippielt merkir hetta, at eitthvørt friðarligt sethúsaøki kann broytast til eitt øki (sum í Hoyvík), har húsini liggja so tætt, at einki privatlív er longur.

2. Parkering og ferðsla:

- Vegirnir í økinum eru allir pakkaðir við koyrandi og parkeraðum bilum, tað er ikki rúm fyri 20+ bilum afturat.
- Víst verður á, at Pedda við Stein gøta er ein ferðslu æðr til og frá barnagarði, vøggustovu og skúla. Vegurin er smalur og ongar gongubreytir eru á henni.
- Nøkur av parkeringsplássunum, sum eru av stórum týdningi fyri tey verandi húsini í økinum, hvørva. Serliga er tað lærarafelagið í Pedda við Stein gøtu 9, sum brúkar nógv pláss.
- Ein av grannunum (matr. nr. 803y) missir innkoyringina til sítt stykki.

3. Uppskot til broytingar

- Verkætlanin eigur at verða umhugsað av nýggjum, og í øllum førum minkað í mun til fyriliggjandi ætlan.
- Fækka um íbúðareindirnar, soleiðis at lutfallið millum búeindir pr. kvm. verður í trá við økið annars.
- Nøgdin av parkeringsplássum eigur at samsvara við talið av íbúgvum.
- Vísa atlit til grannar, so teir framhaldandi kunnu hava eitt privatlív, uttan at tann ætlaða byggingin hevur beinleiðis útsýni inn í stovur teirra, umframt at tað ávirkar nøgdina av dagsljósi munandi. Hetta kann t.d. gerast við at økja um frástøðuna til mark til t.d. 4 m, umframt at minka um bygningshæddina.
- Heitt verður á býráðið um fyrst at gera ábøtur á Pedda við Stein gøtu, so vegurin verður tryggari fyri skúlabørn, áðrenn loyvi verður givið til bygging av eini so stórari verkætlan sum hesari.

Ad. 1. Mett verður, at ætlaði íbúðarbygningurin hóskar betri til økið, enn vinnubygningurin, sum ætlanin er at taka niður. Matrikulin liggur í einum øki við blandaðari bygging, við sethúsum, raðhúsum, almennum stovni, og hevur hetta við sær, at økið ikki hevur ein eyðsýndan sethúsadám.

Viðvíkandi byggiregulerandi ásetingum, so sum hædd og frástøða til mark, so fylgir verkætlanin treytunum í almennu byggisamtyktini. Um tað t.d. vóru sethús, ið vóru bygd, ístaðin fyri íbúðir, so høvdu hesi somuleiðis havt møguleikan fyri at bygt 7,5 m høgt og 2,5 m frá marki, og hevði hetta sostatt haft somu ávirkan á privatlívið hjá grannaognunum, sum íbúðarbyggingin hevur.

Almenna byggisamtyktin ásetir, at íbúðir kunnu verða bygdar í A1 økjum, sum annars eru útløgd til sethús, um mett verður, at hetta hóskar til økið. Um so er, skal ein serstøk byggisamtykt gerast fyri økið.

Ad. 2. Viðmerkingarnar um ferðslu og parkering eru viðgjørdar saman við teknisku deild. Tekniska deild ásannar, at trýstið á Pedda við Stein gøtu er stórt, serliga í meldurtíð. Nøgdin av íbúðum er tó avmarkað, í mun til ferðsluna eftir Pedda við Stein gøtu í meldurtíð, og ferðslan frá íbúðarbyggingini fer væntandi í størstan mun at vera út á Dalavegin. Mett verður tí ikki, at ferðsluviðurskiftini á Pedda við Stein gøtu eiga at hava ávirkan á ætlaðu íbúðarbyggingina á Sílagøtu.

Íbúðarætlanin skal fylgja ásetingunum um parkering í almennu byggisamtyktini. Tað, at aðrar ognir í økinum ikki megna at veita parkeringsøki til brúkarar sínar, eigur ikki at ávirka hesa ítøkiligu verkætlanina.

Loysn skal finnast á atkomuviðurskiftunum til matr. nr. 803y, áðrenn málið verður sent Landsstýrinum til endaliga góðkenning.

Ad. 3. Vísandi til omanfyrinevndu grundgevingar, so verður framvegis mælt til, at íbúðarbyggingin á Sílagøtu verður loyvd.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri Sílagøtu, treytað av at loysn verður funnin á atkomuviðurskiftunum til matr. nr. 803y í samstarvi við eigararnar, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 284/20 Umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til KOKS

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 27/20 | 20/00199-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.02.2020 | 40/20 | 20/00199-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 68/20 | 20/00199-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 75/20 | 20/00199-3 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.11.2020 | 225/20 | 20/00199-3 |
| 6 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | | | 20/00199-3 |
| 7 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 284/20 | 20/00199-3 |

**Upprunin til málið:**
Gist og Vist gera vart við at fyribils virksemi Frammi við Gjónna við Leynavatn ikki er nøktandi og at arbeitt hevur verið við at finna eina varandi framtíðartryggjaða loysn, sum kann verða karmur um virksemi komandi árini.

Ósbjørn Jacobsen Arkitektar hava vegna Gist og Vist søkt um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til Koks við Fossdalsgjógv á Velbastað.

**Skjøl**:
20/00199-2 G&V_KOKS_Skitsuuppskot_A3 mappa_30062019

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Á fundinum hin 5. februar 2020 var umsøkjarin saman við arkitektinum og sakføraranum og greiddu nevndini frá teirra ætlan.

Festarin hevur eftirfylgjandi biðið um at sleppa inn á fund, fyri at lýsa síni sjónarmið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2020:** Festarin varð á fundinum og legði fram.

**Ískoyti:**
Umsøkjari søkir um at sleppa at byggja ein býling til matstovuvirksemi hjá Koks við Fossdalsgjógv á Velbastað.
Matstovan er serlig og hevur útmerkað seg í heimshøpi. Matstovan hevur 2 michelin stjørnur, júst fingið eina grøna afturat, og hevur ætlanir um at fáa 3. michelin stjørnuna.
Ætlanin er serstøk og er ikki umfatað av byggisamtyktarásetingini fyri økið.
Tískil skal byggisamtyktin broytast, um umsóknin verður gingin á møti.
Sí skjal nr. 20/00199-2 G&V_KOKS_Skitsuuppskot

**Verandi virksemi:**
Talan er um festara á Lýðarhaga í fimta ættarlið.
Fossdalur er lívsgrundarlagið fyri virksemið sum vinnurekandi bóndi.
Taðingin er ikki foreinilig við matstovu og hotelvirksemi.
Festið er størsti mjólkaframleiðandi bóndi í landinum. 6. Hvør mjólkarpakki er frá hesum festinum. Sí skjal 20/00199-11 framløga fyri byggi- og býarskipanarnevndini 24.02.2020

**Viðmerkingar frá myndugleikum:**
Viðmerkingar frá Búnaðarstovuni til umsóknir um bygging í Fossdali
Víst verður til skriv um tvær byggiumsóknir við Fossdalsgjógv, onnur at byggja køst og hin at byggja matstovu.

*Niðurstøða:*
Búnaðarstovan mælir út frá verandi upplýsingum í málinum frá at umskipa lendið undir Syðradalsvegnum norðan fyri Fossdalsgjógv til aðra nýtslu enn landbúnað.
Sí skjal 20/00388-4 búnaðarstovan mælir til, at alt økið verður verandi landbúnaðarøki og mælir frá at umskipa tað til aðra nýtslu.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Journal nr. 20/00349 Umsókn um byggiloyvi til køst í Fossdali, Velbastaður. Køsturin er partur av heildarætlanini í sambandi við biogasanleggið, sum er bygt á Hjalla.
Búnaðarstovan mælir til, at alt økið verður verandi landbúnaðarøki, og at umsóknin um at byggja køst verður gingin á møti, um allir aðrir viðkomandi myndugleikar geva neyðugu loyvini til tess.

**Lendið:**
Lendið er sera bratt, og eigur at verða kannað nærri um økið er trygt at hava matvøruvikrsemi og ferðandi.
Økið er sera harðført, og kann spurningur verða settur við, um rætt er at byggja í økinum.

**Samanumtøka:**
Økið, biðið verður um, liggur í 4. grundumráði, sum m.a. hevur hesa áseting:
1. 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

Verandi byggisamtykt rúmar sostatt ikki virkseminum, ið søkt verður um.

Tað tykist sum at ætlaða matstovuvirksemi og verandi virksemi ikki hóska saman í tí líki málið fyriliggur, spurningurin er um ætlanin kann tillagast fyri at bæði kunnu virka á økinum..
Støða eigur at verða tikin til, um arbeiðast skal fyri at loyva matstovuvirkseminum og hvussu, um so er.

**Skjøl:**
Journal nr. 20/00199-1 umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til KOKS
Journal nr. 20/00199-2 G&V_KOKS_Skitsuuppskot
Journal nr. 20/00388-4 Búnaðarstovan mælir til, at alt økið verður verandi landbúnaðarøki og mælir frá at umskipa tað til aðra nýtslu.
Journal nr. 20/00199-9 Notat frá teknisku fyrisiting
Journal nr. 20/00199-11 framløga fyri byggi- og býarskipanarnevndini 24.02.2020

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til, um farast skal undir at broyta byggisamtyktina, treytað at onnur viðurskifti eru komin uppá pláss fyrst, m.a. friðingarmyndugleikar, útvegan av lendi o.s.fr. soleiðis at matstovuvirksemið, sum søkt verður um, kann rúmast á økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Nevndin er sinnað at fara undir eina tilgongd at broyta byggisamtyktina fyri økið við Fossdalsgjógv norðan fyri Velbastað, soleiðis at Gist og Vist kann byggja matstovu v.m. til KOKS á staðnum, treytað av at umsøkjarin fær eina skrivliga avtalu við eigaran av lendinum, áðrenn farið verður undir at broyta byggisamtyktina.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini hin 23. apríl 2020 varð samtykt at fara undir eina tilgongd at broyta byggisamtyktina fyri økið við Fossdalsgjógv, soleiðis at Gist og Vist kann byggja matstovu v.m. til KOKS, treytað av at umsøkjarin fekk eina skrivliga avtalu við eigaran av lendinum.

9. september 2020 móttók umsøkjari tilsøgn frá Búnaðarstovuni um, at Búnaðarstovan er sinnað at avhenda økið, um so er, at byggi- og planmyndugleikin, Tórshavnar kommuna, broytir byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at økið kann brúkast til annað endamál enn landbúnað, sí skjal *Tilsøgn frá Búnaðarstovuni*. Búnaðarstovan vísir á, at tá umsókn um keyp av lendi verður móttikin, verður hon send til hoyringar hjá festara, sum eisini hevur møguleika at kæra eina avgerð hjá Búnaðarstovuni um sølu til landbúnaðarstevnu.

Í trá við nevndarsamtyktina 23. apríl 2020, hevur umsitingin gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt, ið skipar part av matr. nr. 49, Velbastað til matstovu, gisting v.m.

Í umsóknini skrivar umsøkjarin, at staðið hevur alstóran týdning, og verður ein av hornasteinunum undir framhaldandi menningini av KOKS, sum annars hevur prógvað sínar dygdir seinastu 8 árini. Visjónin handan verkætlanina tekur støði í tveimum høvuðstræðrum: Máltíðin og náttúran, og er ætlanin at flætta hesar báðar træðrir saman til eitt enn sterkari sameint upplivilsi, enn tað á nakran hátt er gjørligt at røkka hvør sær. Viðvíkjandi bygging, er ætlanin at taka støðið og íblástur frá eini siðbundnari tilgongd til bygging og viðgerð av landslagi. Íblásturin til skipanina av býlingunum kemur frá teimum gomlu føroysku gørðunum/býlingunum, við tættari og skiftandi bygging, sum er sett í landslagið við tí fyri eygað at skapa tí best hóskandi funktiónssamansetingina og eitt vart uttandura tún.

Yvirskipað er ætlanin at skipa økið soleiðis:
- Parkeringsøki og innilokað ruskgoymsla við landsvegin ovast.
- Einfaldur dyrkingarvegur til vøruflutning og flutning av gestum, tá tað krevst. Annars er ætlanin, at gestir ganga eftir gøtu oman gjøgnum lendið, frá parkeringsøkinum til matstovuna.
- Norðari Býlingur, sum í høvuðsheitum hýsir bygningum, sum hava beinleiðis samband við djórahald og matframleiðslu.
- Heimari Býlingur við sjálvari matstovuni og øllum dagligum stuðulsfunktiónum.
- Einføld bryggja við sjóvarmálan.
- Smátturnar til gisting liggja tvær og tvær ymsastaðni í økinum.
- Vælveru hentleikar, ið eru beinleiðis samantvunnir við náttúruni. T.d. heitar keldur í helluni í fjøruni, náttúrubað í Fossdalsá og fossinum og sjódypp við bryggjuna.

Allar bygdirnar í Tórshavnar kommunu liggja í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og eru skipaðar í serstøkum byggisamtyktum fyri hvørja einstøku bygd. Í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað/Kirkjubø eru ávís øki løgd til bygging, og er restin av ”kommununi” løgd til K-landbúnað. Serstaka byggisamtyktin er frá áðrenn kommunusamanleggingina, og er ikki vorðin endurskoða í síni heild síðani. Endamálið við K-landbúnaðarøki í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað/Kirkjubø er at sammeta við 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, men hevur tó ikki heilt somu møguleikar sum 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini hevur.

Ásetingarnar fyri K-landbúnaðarøki í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað eru m.a.:
*13. gr. pkt. 1. Øki K er tað, sum eftir er av kommununi, tá ið frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskialistøðir o.a.*

Ásetingarnar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:
*§26, 1. 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*
*§26, 2, e. Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. grundumráði.*

Av tí at eitt av høvuðsendamálunum við verkætlanini hjá Gist & Vist er at skapa eina heildaruppliving, har matur og náttúra ganga upp í eina hægri eind, og at ítøkiliga økið hevur stóran týdning, verður mett, at verkætlanin skal skipast sambært ásetingunum í §26, 2, e í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Í næstum verður farið í holt við at endurskoða tær serstøku byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi, og í hesum sambandi verður alt, sum ikki er byggiøki í bygdunum, lagt undir ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Orsakað av broytingunum, sum liggja fyri framman, umframt at serstaka byggisamtyktin fyri Velbastað/Kirkjubø ikki hevur somu møguleikar, verður tað mett at vera best ráðiligt, at skipa serstøku byggisamtyktina fyri Fossdalsgjógv sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Málið verður sent Náttúrufriðingarnevndini og Landsverki til góðkenningar.

Fíggjarlig viðurskifti:
Økið liggur uttanfyri planlagda byggiøki í bygdini, og ber umsøkjari allan kostnaðin fyri at leggja neyðugar tekniskar veitingar til økið.

Sambært lóg um býarskipanir og byggisamtyktir § 14, í sambandi við ger ella broyting av eini byggisamtykt er m.a. ásett:

- Stk. 1. Tá ið eitt øki samsvarandi byggisamtykt er lagt av til almenn hús ella virki, ella er ætlað til vegir, torg ella annað sovorðið og ognarmaður tess eftir meti meringarnevndarinnar smbr. § 15 missir møguleikan at nýta teir fyrimunir, ið økið hevur á rímiligan og forsvarligan hátt sammett við, hvussu grannaøkini í roynd verða nýtt, kann ognarmaður krevja, at kommunan skal taka økið fyri endurgjald.

Av tí at tilsøgn er fingin frá Búnaðarstovuni, um at tey eru sinnaði at avhenda økið, um byggisamtyktin verður broytt, verður ikki mett, at kommunan kann verða kravd biðin um endurgjald, sambært omanfyristandandi áseting í lógini um býarskipanir og byggisamtyktir.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Umsókn til køst í Fossdali, Velbastaður, journal nr. 20/00349:
Tórshavnar kommuna hevur móttikið umsókn frá festaranum um byggiloyvi til køst á økinum við Fossdalsgjógv – á sama øki, sum ætlanin er at hava omanfyristandandi virksemi. Umsóknin er í trá við verandi ásetingar fyri økið.

Í lógini um býarskipanir og byggisamtyktir stendur í § 8 um fyribils forboð:

- Tá ið eitt kommunustýri, ið hevur byggisamtykt í umbúnað, biður um tað, kann landsstýrismaðurin nokta fyri, at ein ogn, ið ætlandi kemur inn undir byggisamtykt, verður nýtt á slíkan hátt, ið hildin verður ósamsvarandi byggisamtyktini. Slíkt forboð má bara galda eitt ár og kann ikki, uttan býarskipanarnevndin samtykkir, verða sett meira enn hesa einu ferð.

Um uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Fossdalsgjógv verður samtykt, kann ein tílík áheitan verða send landsstýrismanninum, soleiðis at møguleiki er fyri at bíða við at geva byggiloyvi til køstin, inntil endalig avgerð er tikin um serstøku byggisamtyktina.

T**ilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri Fossdalsgjógv, treytað av loyvi frá avvarðandi myndugleikum og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina fyri Kirkjubø/Velbastað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Gunvør Balle.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. november 2020 | Blað nr.: 1175 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

# 285/20 Kunngerð um súkklandi á gongubreyt - broytingaruppskot

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 05.03.2020 | 10/20 | 20/00775-1 |
| 2 Ferðslunevndin | 29.04.2020 | 12/20 | 20/00775-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 12.05.2020 | 23/20 | 20/00775-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 17.11.2020 | 57/20 | 20/00775-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 285/20 | 20/00775-1 |

**Upprunin til málið:**
*Havnin sum súkklubýur*, málsnr. 19/0370

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur samtykt at menna Havnina til súkklubý. Fleiri átøk skulu setast í verk í 2020 (sí **Súkkluárið 2020**), ið m.a. fevna um at gera betringar í vegakervinum til frama fyri súkklur umframt at menna samstørv og tiltøk sum varpa ljós á súkkling og burðardygga ferðslu. Í hesum sambandi er stig tikið til at gera hetta broytingaruppskotið til kunngerðina um súkklandi á gongubreytum, soleiðis at umstøðurnar at súkkla gerast betri og tryggari.

Kunngerðin um súkklandi á gongubreytum bleiv samtykt í 2017, og er ein fyribils fyriskipan, sum gevur heimild til at súkklur kunnu nýta gongubreytir at ferðast á um treytir sambært §2 - §4 verða loknar. Ásettu treytirnar eru m.a., at gongubreytir skulu í minsta lagi verða 2,5 m breiðar, áðrenn tær kunnu deilast sundur til bæði gongu- og súkklubreyt, og skal sundurbýtið gerast við longdaravmerking/stipling umframt boðskelti.

Fleiri avbjóðingar eru við verandi kunngerð, sum forða fyri at endamálið, at betra um umstøðurnar hjá súkklum, verður rokkið. Hesar verða útgreinaðar nærri niðanfyri saman við broytingaruppskotinum.

<u>Broytingaruppskotið</u>

Høvuðsendamálið við broytingaruppskotinum er at geva heimild til at skipa gongubreytir sum felags breyt, har súkklandi og gangandi nýta somu breyt og/ella gera deilda breyt, har gongubreytin verður sundurbýtt við stipling til gongu- og súkklubreyt. Í hesum sambandi eru uppskot til broytingar gjørdar til §§2 – 4 (sí hjálagda skjal: **Broytingaruppskotið til kunngerðina um súkklandi á gongubreytum**).

1. Broytingar í § 2 um *Vegviðurskifti og ferðsluviðurskifti*

Í §2, stk. 2-6, eru nýggjar treytir orðaðar, soleiðis tað er greitt hvørji veg- og ferðsluviðurskifti eru galdandi, tá heimild verður givin til at skipa gongubreyt sum felags breyt og/ella deilda breyt.

Ein avbjóðing við verandi kunngerð er kravið um min. 2,5 m breidd til sundurbýting av gongubreytum. Gongubreytirnar í høvuðsstaðnum hava ikki støðuga breidd, og tí ber um kunngerðin skal fylgjast bert til at býta tær sundur í støðum (sí hjálagda skjal: ***kort_gongubreytir*). Sostatt** verður súkklufarleiðin á stiplaðum/sundurbýttum gongubreytum ofta avbrotin, og súkklur skulu av breytini og á vegin at súkkla smb. kunngerðini.

Á vegastrekkjum, har ferðslan er nógv og tung, og har eingin súkklubreyt er á vegnum, velja súkklur ofta at fara á gongubreytina at súkkla, hóast hon er minni enn 2,5 m í breidd og ikki er longdaravmerkt við stipling.

Broytingarnar í §2 geva sostatt heimild til at skipa allar gongubreytir sum felags breyt ella deilda breyt, tá umstøðurnar verða mettar ov vandamiklar at súkkla á vegnum. Í stk. 2-6 eru m.a. nýggjar ásetingar gjørdar, hvussu ferðslan skal skipast á felags breytum, umframt nær gongubreytir kunnu býtast sundur til deilda breyt.

2. Broytingar í §3 um *Merking*

Í §3, við stk. 2-4, eru nýggjar ásetingar gjørdar til hvør merking er neyðug, tá talan er um at skipa gongubreytir sum felags breyt og/ella deilda breyt til súkklandi og gangandi.

Umstøðurnar eru so ólíkar á gongubreytum í høvuðsstaðnum, og tað er ikki altíð ráðiligt at deila gongubreytina sundur til gongu- og súkklubreyt við longdarmerking/stipling. Í støðum eru forðingar á breytini, eitt nú har Bussleiðin steðgar og við lyktapelar, sum gongufólk og súkklandi mugu víkja undan, tá tey ferðast á breytini.

Sí hjáløgdu myndir, sum vísa dømi um forðingar á deildum breytum: Á Frælsinum, mynd 1 og 2, og Á Heygnum, mynd 3.

Nýggju ásetingar í §3 fevna m.a. um, at øll merking skal gerast smb. kunngerð um ferðslumerking, og at felags breytir skulu hava boðskelti um “Felags breyt” umframt kunnu merkjast við súkklutekin á breytini.

3. Broytingar í §4 um *Fyribils skipan*

Kunngerðin um súkklandi á gongubreytum er ein fyribils skipan, og tí er umráðandi at krøv verða sett til gerð av súkklubreytum/farleiðum í vegakervinum í allari nýgerð og umvæling av vegum.

Í hesum sambandi er ískoytið gjørt til §4 við áseting um, at tá vegakervið er ov smalt, ella lendi er soleiðis háttað at trupult er at fáa nøktandi vegabreidd til at gera súkklubreyt, tá kunnu loysnir sum t.d. felags breyt og/ella deild breyt gerast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð sum súkklandi á gongubreyt nr. 138 frá 19.okt. 2017, við heimild í §29, stk. 4., í løgtingslógarkunngerð nr.14 frá 2. mars 1988 um ferðslu.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Havnin sum súkklubýur, málsnr. 19/0370

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Kort_gongubreytir (breidd og sundurbýting)*, journal nr. 20/00775-2
*Forðingar á deildum breytum*, journal nr. 20/00775-3
*Broytingaruppskotið til kunngerðina um súkklandi á gongubreytum,* journal nr. 20/00775-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | X | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at tikið verður undir við broytingaruppskotinum til kunngerð um súkklandi á gongubreytum nr. 138, og at uppskotið verður sent til Kommunufelagið til støðutakan og síðani til Umhvørvis- og Vinnumálaráðið til góðkenningar.

**Ferðslunevndin 05. mars 2020:** Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Broytingaruppskotið til kunngerðina um súkklandi á gongubreytum varð send løgregluni til viðgerðar. Landfútin sent kommununi viðmerkingar, og broytingaruppskotið er tillagað sambært hesum (sí hjáløgdu skjøl).

Fútin mælir m.a. til, at ein rætting skal gerast í §1 um myndugleikar. Tað eigur ikki at verða løgreglan, sum í samráð við viðkomandi vegamyndugleika, skal ávísa nær gongubreytir skulu skipast sum súkklubreytir. Heldur eigur tað verða vegamyndugleikin, sum í samráð við løgregluna skal ávísa nær gongubreytir skulu skipast sum súkklubreyt.

Vart skal annars gerast við, at broytingaruppskotið eigur at samsvara við løgtingslógarkunngerð nr.14 frá 2. mars 1988 um ferðslu. Eitt nú eigur §29 í løgtingslógarkunngerðini nr.14, stk. 2-4, um prutl og mark á gongubreytum at endurskoðast, so ásetingarnar samsvara við kunngerðina um súkklandi á gongubreytum.

**Skjøl**
*Kunngerð um súkklandi á gongubreytum – broytingaruppskotið*, journal nr. 20/0075-7
*Bemærkninger til forslag om kundgørelse nr.138*, journalnr. 20/0075-8

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla ferðslunevndini og teknisku nevnd til at samtykkja broytingaruppskotið til kunngerð um súkklandi á gongubreytum nr. 138, og at uppskotið verður sent til Kommunufelagið til støðutakan og síðani til Umhvørvis- og Vinnumálaráðið til góðkenningar.

**Ferðslunevndin 29. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við broytingaruppskotinum.

**Tekniska nevnd 12. mai 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum grundað á ótryggleika hjá fólki til gongu og við barnavogni á gongubreytini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Broytingaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá Kommunufelagnum, Landsverk og Ráðnum fyri Ferðslutrygd (RFF), og hevur kommunan móttikið ymiskar viðmerkingar til uppskotið.

Smáar tillagingar eru gjørdar í broytingaruppskotinum í kunngerðini smb. innkomnu viðmerkingum. Eitt nú er orðing broytt í §2, stk. 2, frá «súkklur víkja fyri gangandi» til «súkklandi víkja fyri gangandi», so ábyrgdarsubjektið er greiðari tilskilað.

Broytingaruppskotið er eisini broytt í uppsetan við nærri frágreiðing til ynsktu broytingar (sí broytingaruppskot).

RFF tekur undir við broytingaruppskotinum, men ger samstundis vart við, at umstøður fyri súkklandi skulu hugsast inn í allar ný- og umbyggingar av vegum. Loysnir sum at skipa gongubreytir sum «felags breyt» ella «deilda breyt», sum broytingaruppskotið leggur upp til, eiga tí bert at verða nýttar har lendi er soleiðis hátta at tað ikki ber til at gera súkklubreyt ella sum fyribils loysn har súkklubreyt er ávegis. Kommunan eigur í hesum sambandi at arbeiða við at gera neyvari ætlan fyri súkklukervið, sum tryggjar hetta. Mett verður tó, at broytingaruppskotið framvegis er neyðugt at fremja fyri at bøta um umstøður fyri súkklandi, av tí at verandi heimild í kunngerðini ikki er nøktandi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Havnin sum súkklubýur, málsnr. 19/0370
Mál um súkklubreytir og atkomuviðurskifti hjá rørslutarnaðum, málsnr. 2005-1436/2
Súkklubreytir, málsnr. 2012-02777

**Skjøl:**
*Broytingaruppskot til kunngerð*, journal nr. 20/00775-17
*Viðmerkingar frá LV, RFF, KF og Politinum*, journal nr. 20/00775-18
*Kort_gongubreytir (breidd og sundurbýting)*, journal nr. 20/00775-2
*Forðingar á deildum breytum*, journal nr. 20/00775-3

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, býararkitekturin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla teknisku nevnd til:

- at samtykkja broytingaruppskotið til kunngerðina um súkklandi á gongubreytum nr. 138,
- at senda uppskotið til Umhvørvis- og Vinnumálaráðið til góðkenningar umvegis býráðið.

**Tekniska nevnd 17. november 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum, tí at gongubreyt er til at ganga á og ikki til ferðslu.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Teknisku nevnd, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og 4 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddi Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus og Helena Dam á Neystabø.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. november 2020 | Blað nr.: 1180 |
| | Formansins merki: |

# 286/20 Persónsupplýsingartrygd í Tórshavnar Kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 177/19 | 18/03628-9 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 240/19 | 18/03628-9 |
| 3 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 208/19 | 18/03628-9 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 313/20 | 18/03628-9 |
| 5 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 286/20 | 18/03628-9 |

**Málslýsing**

**Innleiðing – stutt um GDPR.**
Nýggja EU kunngerðin um Persónsdátutrygd “General Data Protection Regulation” (GDPR) var sett í gildið 25. maj 2018 í DK. Endamálið við GDPR er harmonisering av Persónsupplýsingarlóggávum innan EU, og erstattar sostatt alla aðra lóggávu um Persónsdátutrygd innan EU.

Av tí at Føroyar standa uttan fyri EU, eru Føroyar eitt sokalla 3. triðja land mótvegis EU í mun til GDPR. Føroyar eru, sum nú er, eitt "sikkurt triðja land", sum er ein góðkenning frá ES, sum byggir á eina meting av føroysku lóggávuni - verjir hon skrásetta nóg væl, er ábyrgdarbýtið í lóggávuni nøktandi, er nakað eftirlit, er revsing fyri brot osfr. Góðkenningin hjá Føroyum skal endurskoðast í mai 2020. Ein góðkenning hevur týdning fyri frítt og ómakaleyst at kunna flyta persónsupplýsingar av landinum.

**Føroyska lóggávan**
Við støði í føroysku Persónsupplýsingarlógini og Trygdarkunngerðini hevur Dátueftirlitið tann 2. oktober 2018 vent sær til Tórshavnar Kommunu, yvirskipað fyri at fremja eftirlit viðvíkjandi persónsdátutrygd í Tórshavnar Kommunu.
Dátueftirlitið hevur sett fyrispurning fram um: at fáa avrit av árligu trygdarskoðan fyri 2017, umframt at fáa yvirlit yvir allar skipanir í Tórshavnar Kommunu, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar, við serligum denti á møguligar skipanir við viðkvæmum upplýsingum, at fáa mannagongdir í samband við viðgerð av persónsupplýsingum, støðutakan til viðgerðarloyvi og dátuviðgeraravtalur við veitarar.
Talan var um rúgvismikið tilfar, og fekk TK útsetan frá Dátueftirlitinum av innlevering av omanfyri nevnda tilfari til ávikavíst 1. apríl fyri skipanir við viðkvæmum upplýsingum og 1. juni fyri skipanir við persónsupplýsingum.

Í hesum tíðarskeiðnum hevur verið arbeitt við:

- Trygdarskoðan fyri alla Tórshavnar Kommunu í mun til persónsdátutrygd
- Skráseting av øllum skipanum við persónsupplýsingum í TK í Wired Relations, herundir allan viðgeraraktivitet
- Mannagongd fyri handfaring av persónsupplýsingum í TK – til samtyktar
- Persónsupplýsingarpolitikkur fyri starvsfólk í TK – til samtyktar
- Persónsupplýsingarpolitikkur fyri borgarar, í mun til rættindi hjá skrásetta – kunning at leggja á heimasíðu – til samtyktar
- Vegleiðing til strikipolitikk – lógin ásetur, at støða skal takast til, hvørjir persónsupplýsingar skulu varðveitast og hvørjir skulu strikast og hvussu
- Skjal til mannagongdir í mun til økini í TK, og teirra virksemi innan persónsupplýsingum
- Politikkur um upplýsingartrygd – verandi politikkur er broyttur sambært skriv frá Dátueftirlitinum og eigur at vera samtyktur av nýggjum

**Skjøl:**
Tilfar sent Dátueftirlitinum liggur í málinum.

**Tilmæli:**

Kunnað verður um málið. Málið verður at leggja fyri fíggjarnevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
**Myndugleika- og ábyrgdarbýti og persónsupplýsingarpolitikkir í TK.**
Við støði í føroysku Persónsupplýsingarlógini (PUL) og Trygdarkunngerðini (TKG) hevur Dátueftirlitið tann 2. oktober 2018 vent sær til Tórshavnar Kommunu, yvirskipað fyri at fremja eftirlit viðvíkjandi persónsdátutrygd í Tórshavnar Kommunu.

Til tess at uppfylla krav lógarinnar um myndugleika- og ábyrgdarbýti, og tryggja at starvsfólk og borgarar fáa neyðugu kunningina um innsavnan og viðgerð av persónsupplýsingum, og rættindi borgarans, hevur TK gjørt myndugleika- og ábyrgdarbýti og persónsupplýsingarpolitikkir fyri starvsfólk og borgaran, at samtykkja skjal nr. 18-03628-18.

Endamálið er, at lýsa partar av trygdarfyriskipanum, sum Tórshavnar Kommuna hevur sett í verk fyri at tryggja, at persónsupplýsingar, sum TK fær um hendi í samband við sítt virksemi, til eina og hvørja tíð, verða viðgjørdir við virðing fyri tí persónliga frælsinum og heimafriðinum, fyri at tryggja persónsvernd hins einstaka.

Omanfyri nevndu politikkir eru yvirskipaðir og seta karmarnar fyri tilhoyrandi mannagongdir á økinum. Øll starvsfólk í Tórshavnar Kommunu eiga at kenna og fylgja hesar politikkir og mannagongdir.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og Fyrisitingarstjórin mæla til, at samtykkja Myndugleika- og ábyrgdarbýti og persónspolitikkir í TK og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið býráðið.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við støði í galdandi lóggávu innan persónsdátuverju Persónsupplýsingarlógin og Trygdarkunngerðin, hevur Dátueftirlitið (DAT) vent sær til Tórshavnar Kommunu (TK) tann 2. oktober 2018 fyri at fremja eftirlit viðvíkjandi persónsdátutrygd í TK.

TK sendi í december 2019 Trygdarskoðan (TS) 2019 saman við øðrum viðkomandi fylgiskjølum til DAT. Í hesum sambandi hevur DAT vent sær aftur til TK tann 07. apríl við viðmerkingum, og umbøn um, at TK letur inn Trygdarskoðan fyri 2020, sambært galdandi lóggávu.

TK hevur gjøgnum árið arbeitt við at fáa TS2020 frá hondini. Hetta arbeiði rennur saman við at Løgtingið tann 07. juni í ár, samtykti nýggja lóggávu fyri Persónsdátuverndarøkið, nevniliga LL nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum. Nýggja lóggávan kemur í gildi tann 01. januar 2021, og verandi lóggávur fara tá úr gildi.

Av hesum eru dagføringar gjørdar í fylgjandi lógarkravdu politikkum:

- Trygdar- og ábyrgdarbýti og persónsupplýsingarpolitikkur fyri starvsfólk og borgarar
- KT-trygdarpolitikkur

Av størstu broytingum eru, at politikkirnir eru dagførdir so hesir nú fylgja nýggju Dátuverndarlógini. Sostatt er Myndugleika- og ábyrgdarbýti broytt til ein Trygdar- og ábyrgdarbygnaður, umframt, at lógarkravda Dátuverndarfólki er partur av bygnaðinum.

KT-trygdarpolitikkurin er dagførdur soleiðis, at hesin vísir til nýggju Dátuverndarlógina. Viðkomandi dagføringar eru umframt, at krøv verða sett til dátuvernd gjøgnum
sniðgeving og dátuvernd gjøgnum standardstillingar í samband við útvegan av nýggjum KT-skipanum. Harumframt er dagføring gjørd um at fráboðan skal sendast Tjóðskjalasavninum, sambært galdandi lóggávu um skjalasøvn, um fráboðan og góðkenning av skipan og format av dátum.

Omanfyri nevndu politikkir eru partar av tí tilfari, ið skal latast DAT í samband við innsending av TS2020 tann 01. december 2020.

**Tilmæli:**
Við støði í omanfyri nevnda, og lóggávu um persónsdátuverju, mæla Kommunustjórin og Fyrisitingarstjórin í Tórshavnar Kommunu til, at Fíggjarnevndin samtykkir Trygdar- og ábyrgdarbýti og persónsupplýsingarpolitikk fyri starvsfólk og borgarar, og KT-trygdarpolitikk fyri TK, og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

## 287/20 Fíggjarætlan 2021, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.09.2020 | 243/20 | 20/03416-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 206/20 | 20/03416-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.10.2020 | 248/20 | 20/03416-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 08.10.2020 | 34/20 | 20/03416-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2020 | 41/20 | 20/03416-1 |
| 6 Vinnunevndin | 05.10.2020 | 75/20 | 20/03416-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 50/20 | 20/03416-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 208/20 | 20/03416-1 |
| 9 Eldranevndin | 08.10.2020 | 16/20 | 20/03416-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 291/20 | 20/03416-1 |
| 11 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 243/20 | 20/03416-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 16.11.2020 | 310/20 | 20/03416-1 |
| 13 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 287/20 | 20/03416-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 320/20 | 20/03416-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 29. oktober og aðru viðgerð 26. november.

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið**
20/03322 Fíggjarætlan 2021 [Tórshavnar havn]

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Tøknilig framskriving**
Í juni mánaða bleiv gjørd ein tøknilig framskriving av fíggjarætlanini 2021. Kunnað varð um hesa framskrivingina í fíggjarnevndini 17. juni 2020.

Fortreytirnar fyri tøkniligu framskrivingini vóru varisligar vísandi til corona-óvissu, og avlopið til íløgur, frároknað Tórshavnar havn, varð tá mett til 133 mió.kr.

**Fíggjarætlan 2021, fortreytir**

Eftir kunning um tøkniligu framskrivingina í fíggjarnevndini hevur verið arbeitt víðari við uppskotinum til fíggjarætlan 2021 at leggja fyri fíggjar- og faknevndir og býráðið.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 8.000 kr.

Tiknar eru eisini við allar kendar framskrivingar og virksemisbroytingar. Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2019 | Ætlan 2020 | Ætlan 2021 | Broyting 2020/2021 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 846.629 | 846.694 | 873.135 | 3,1% | *26.441* |
| 20601 | Felagsskattur | 49.230 | 35.000 | 28.000 | -20,0% | *-7.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.293 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 150.072 | 145.397 | 149.032 | 2,5% | *3.635* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 37.616 | 35.353 | 35.353 | 0,0% | *0* |
| 20803 | Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 0 | | | | |
| | **Inntøkur íalt** | **1.084.839** | **1.064.444** | **1.087.520** | **2,2%** | ***23.076*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 91.172 | 92.991 | 95.895 | 3,1% | *2.904* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 245.626 | 256.490 | 282.668 | 10,2% | *26.178* |
| §3 | Børn og ung | 191.563 | 193.131 | 200.198 | 3,7% | *7.067* |
| §4 | Undirvísing | 40.807 | 43.946 | 44.713 | 1,7% | *767* |
| §5 | Mentan og frítíð | 54.691 | 58.679 | 61.810 | 5,3% | *3.131* |
| §6 | Teknisk mál | 133.087 | 141.892 | 144.852 | 2,1% | *2.960* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 77.731 | 77.485 | 79.064 | 2,0% | *1.579* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -46.216 | -36.318 | -32.858 | -9,5% | *3.460* |
| | **Rakstur íalt** | **788.462** | **828.296** | **876.343** | **5,8%** | ***48.047*** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.344 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.523 | 2.500 | 2.000 | -20,0% | *-500* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **19.867** | **20.500** | **20.000** | **-2,4%** | ***-500*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **276.510** | **215.648** | **191.177** | **-6,3%** | ***-13.621*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 477 | 1.200 | 800 | -33,3% | *-400* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.500 | 5.500 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur | -348 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| | **Rentur íalt** | **826** | **6.700** | **6.300** | **6,6%** | ***440*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **275.685** | **208.948** | **184.877** | **-11,5%** | **-24.071** |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir** | **46.456** | **19.607** | **17.107** | -12,8% | *-2.500* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **229.229** | **189.341** | **167.770** | **-11,4%** | **-21.571** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **183.013** | **176.896** | **156.285** | **-11,7%** | **-20.611** |
| | | | | | | |

Búskaparráðið hevur júst lagt sína heystfrágreiðing framm. Ráðið væntar búskaparliga afturgongd í BTÚ í ár upp á -6,9% og ein vøkstur aftur komandi ár upp á 5,5%.

**INNTØKURNAR**
Partar av vinnuni hava merkt ein stoyt av corona. Hóast hetta ikki sæst so væl aftur í inntøkunum hjá kommununi higartil, er inntøkumetingin nú nakað varligari og lægri.

Kommunuskatturin er framroknaður við støði í inntøkunum fyrstu átta mánaðirnar í 2020 við einum mettum vøkstri í skattagrundarlagnum á 2,00% løgdum aftrat.

Inntøkurnar frá kommunuskattinum vaksa tá 3,1% ella 26,4 mió.kr upp í 873,1 mió.kr í mun til 846,7 mió.kr í fíggjarætlanini 2020.

Skattainntøkurnar av eftirlønargjøldum eru mettar til 149 mió.kr, sum er ein vøkstur á 2,5%.

Felagsskatturin er mettur til 28,0 mió.kr, sum er 7,0 mió.kr ella 20% lægri enn metingin í fjør. Orsøkin er, at summi rakstraravlop fara at verða lægri orsakað av corona.

Samlaðu inntøkurnar vaksa sostatt 23,1 mió.kr ella 2,2% upp í 1.087,5 mió.kr í mun til 1.064,4 mió.kr í fíggjarætlanini 2020.

Til samanberingar vuksu inntøkurnar íalt í fíggjarætlanini 2020 við 60,5 mió.kr ella 6,0% í mun til fíggjarætlanina 2019.

**RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR**
Kommunan er enn sum áður í stórum vøkstri, og hevur hetta við sær munandi øking í virksmeminum, tænastunum og rakstrarútreiðslunum.

Rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi íalt vaksa netto 48,0 mió.kr upp í 876,3 mió.kr úr 828,3 mió.kr. Hetta er ein vøkstur upp á 5,8% í mun til fíggjarætlanina 2020.

**Útbyggingarnar á eldraøkinum økja raksturin 2,00%-stig**
Vøksturin í kommununi sæst serliga aftur í vøkstrinum í útreiðslunum á eldraøkinum, har ið tveir nýggir deplar - tvey stór rakstrarstøð - verða tiknir í nýtslu fyrsta dagin.

Talan er um nýggja umlættingar- og rehabiliteringsdepilin URD upp í Hoyvík og nýggja demensdepilin á Tjarnargarði uppi í Stoffalág.

Út av nettovøkstrinum í rakstrarútreiðslunum á 48,0 mió.kr eru 43,8 mió.kr hækking í lønum, harav 17,4 mió.kr er hækking á eldraøkinum; fyrst og fremst frá nýggju deplunum.

Hækkingin á 17,4 mió.kr svarar til góð 2,00-%-stig í hækking í rakstrarútreiðslunum. Frároknað hesa lønarhækkingina var útreiðsluvøksturin 3,8% í mun til nú 5,8%.

**Lønirnar eru munandi partur av rakstrinum**
Lønirnar hjá kommununi, sum eru 60% av samlaðu bruttokostnaðunum og 75% av nettokostnaðunum, vaksa sum nevnt omanfyri 43,8 mió.kr í mun til fíggjarætlan 2020.

Av hesum er 15,2 mió.kr ella 35% av vøkstrinum lønardagføring fyri 2021 og so ein øking á 28,6 mió.kr, har ið størsti parturin er ísv nýggj størv á nýggju deplunum. Sí talvu niðanfyri.

Lønirnar eru dagførdar við kendum sáttmálabroytingum, og lagt er harumframt upp fyri, at onkrar sáttmálasamráðingar draga út.

| | Lønar-reguleing | Lønar-vøkstur | Íalt |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 2.254 | 471 | 2.725 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 5.792 | 17.410 | 23.202 |
| §3 Børn og ung | 3.317 | 4.870 | 8.187 |
| §4 Undirvísing | 233 | 2.443 | 2.676 |
| §5 Mentan og frítíð | 766 | -133 | 633 |
| §6 Teknisk mál | 2.059 | 1.136 | 3.195 |
| §7 Kommunal virkir | 783 | 2.363 | 3.146 |
| | **15.204** | **28.560** | **43.764** |

Hædd er tikið fyri lógarbroytingum, býráðssamtyktum og virksemisbroytingum, ið fylgja av nýggjum íløgum, sáttmálabroytingum og líknandi.

Fólkavøksturin hevur týðandi ávirkan á rakstrararútreiðslurnar, og gongdin í fólkatalinum ávirkar bæði inntøkur og útreiðslur.

Miðskeiðís í 2020 vóru 22.216 fólk skrásett í kommununi, sum er ein vøkstur upp á 472 fólk ella 2,2% í mun til árið fyri.

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**
Á **§ 1** Kommunual fyrisiting økjast nettoúreiðslurnar 3,1% ella 2,9 mió.kr, sum fer til sáttmálabundnar lønarhækkingar, býráðið og tænastumannaeftirlønir.

Nettoútreiðslurnar á **§ 2** Almanna- og heilsumál økjast íalt við 10,2% ella 26,2 mió.kr, herav 23,2 mió.kr er hækking í lønum.

Barnavernd hevur ein samlaðan vøkstur upp á 6%, ið er 2,2 mió.kr. Børn í fosturfamiljum hækkar 9,7% ella 1,5 mió.kr, og brúkaragjøld til børn á serstovni økjast við 0,9 mió.kr.

Á eldraøkinum er serliga talan um hækking í konto 2721 Røktartænastur 11,1 mió.kr (8,0%). Harav eru 3 mió.kr uppraðfesting av røktarøkinum umframt fígging til 9 nýggj búpláss.

Konta 2722 Tilboð hækkar við 8,7 mió.kr (30,3%) ísv umlættingar- og rehabiliterings-depilin og demensdepilin á Tjarnargarð, sum báðir standa klárir um ársskiftið.

Kontan fyri lógarbundna ansingarsamsýning økist 632 tkr, tí fleiri ansarar eru í skipanini.

Játtanin til Heilsuhúsið økist 3,8 mió.kr til rakstur av nýggju deplunum og av reingerðar-tænastuni, sum nú er fast tilboð.

Nettoútreiðslurnar á **§ 3** Børn og ung fylgja í høvuðsheitum barnatalinum, og økjast útreiðslurnar 3,7% ella 7,1 mió.kr.

Sum liður í at umskipa og styrkja tilboð og tænastur til børn við serligum tørvi á dagstovnunum og dagstovnum við serstovu, verður skipað serlig normering og fígging á 4 mió.kr. Talan er her um eina meirnormering upp á 4,0 mió.kr á § 3.

Eisini er nú meirnormeringin frá í fjør upp á 4,5 mió.kr skrásett og fíggjað varandi á hesum rakstrarstað. Útreiðslur til systkinaavsláttur vaksa 900 tkr.

Nettoútreiðslurnar á **§ 4** Undirvísing hækka 1,7%, ið er 0,8 mió.kr. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Størsti vøksturin er í samband við nýggja Skúlan á Fløtum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 5** Mentan og frítíð hækka 5,3% svarandi til 3,1 mió.kr samsvarandi øktum virksemi.

Av hesum eru 600 tkr øking í lønum.

Stuðul til ítrótt økist 550 tkr, nú ítróttarhøll í Skúlanum á Fløtum legst aftrat, og kontan Ítróttaranlegg økist 588 tkr í høvuðsheitum av somu orsøk.

Nettoútreiðslurnar á **§ 6** Teknisk mál økjast við 2,1% ella 3,0 mió.kr. Av hesum eru 1,1 mió.kr. lønir ísv økt virksemi.

Fleiri bygnings-fermetrar eru at viðlíkahalda, m.a Umlættingardepilin, Býlingshúsið vesturi á Flat, Finsen-hallirnar og Skúlin á Fløtum,

Nettoútreiðslurnar á **§ 7** Kommunal virkir økjast við 12,2%, sum er 5 mió.kr. Umframt játtnina til Tórshavnar havn er tað serliga vøkstur í játtan til renovatión á knappar 2,4 mió.kr og 1 mió.kr fyri Bussleiðina.

-----

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 191,2 mió.kr.

Úrslit áðrenn avdráttir og íløgur verður 184,9 mió.kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 156,3 mió.kr.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðar íløgur, má munurin fíggjast við antin meiri inntøku, tøkum peningi ella lántøku.

Býráðið ásetir skattaprosent og barnafrádrátt og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 23. september 2020:** Framlagt og beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Framlagt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2020:** Framlagt.

**Vinnunevndin 05. oktober 2020:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2020:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Framlagt.
Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at heita á fíggjarnevndina um at útvega játtan til at seta fleiri fólk í starv á byggideildini, vísandi til skjal nr. 20/03416-9.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Helena Dam á Neystabø, atkvøða blankt.

**Trivnaðarnevndin 08. oktober 2020:** Framlagt.

**Eldranevndin 08. oktober 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Nýggj inntøkumeting av eftirlønarskatti og flyting vegna DIS, FAS og frádráttir eru komin frá Fíggjarmálaráðnum.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 24.09.20 var metingin 184,4 mió. Nýggja metingin er kr. 188,6 mió, tvs 4,2 mió hægri.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020: Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, taka undir við fyriliggjandi fíggjarætlanaruppskoti við hesum broytingum:**

| | | |
|---|---|---|
| **Inntøkumeting** | **Mettar meirinntøkur í eftirlønargjaldi og DIS, FAS og frádráttum** | **4.200** |
| **Broyting til 1. viðgerð** | **Nevndarviðgerð** | |
| §6 - 6175 | Yvirtøka av Gundadalshøllini | 1.000 |
| §6 - 6275 | Gamla brúgv um Sandá | 2.500 |
| §6 - 6275 | Vetrarfriðing | 700 |
| | | **4.200** |

Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Í FÆ 2021 er játtanin til ókeypis hallarleigu 3.500.000 kr.

Tað er Ítróttaanlegg, ið umsitur útleigan av høllunum í skúlum, og sum sendir Tórshavnar kommunu rokning fyri tann partin av leigu, ið kemur undir skipanina við ókeypis hallarleigu. Haraftrat sendir Ítróttaanlegg kommununi rokning fyri ókeypis hallarleigu í teimum ítróttarhøllum og fimleikahøllum, sum

ítróttaanlegg umsitur. Upphæddin fyri ókeypis hallarleigu, sum Ítróttaanlegg sendir rokning fyri er uml. 3 mió kr. um árið.

Játtanin til ókeypis hallarleigu er játtað á 5365 Stuðul til ítrótt.

Tað er rættiliga nógv umsiting av skipanini, og heldur enn, at Ítróttaanlegg sendir kommununi rokning fyri leigu, kundi skipanin verið tann, at upphædd, verður játtað Ítróttaanleggum og teimum skúlum, sum fáa leigu av játtanini til ókeypis hallarleigu. Henda upphædd kemur so í staðin fyri ta inntøku, stovnarnir fáa av leiguni.

Við støði í tølunum frá 2019, verða hesar upphæddirnar fluttar av 5365 Stuðul til ítrótt á hesar deildir:

| | |
|---|---|
| 5717 Ítróttaanlegg | 2.592.400 kr. |
| 4118 Eysturskúlin | 36.000 kr. |
| 4115 Kollafjarðar skúli | 16.000 kr. |
| 4119 Sankta Frans skúli | 50.000 kr. |
| 4122 Skúlin við Løgmannabreyt | 135.000 kr. |

Í játtanini 2021 er nakað minni sett av til húsaleigu, enn tað var í 2020, og upphæddin til 5717 Ítróttanalegg er uml. 200 tkr. lægri enn væntaðu útreiðslurnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at í fíggjarætlanini fyri 2100 verða:
a) 2.842.000 kr. fluttar av 5365 Stuðul til ítrótt á 5717 Ítróttaanlegg
b) 135.000 kr. fluttar av 5365 Stuðul til ítrótt á 4118 Eysturskúlin
c) 16.000 kr. fluttar av 5365 Stuðul til ítrótt á 4115 Kollafjarðar skúli
d) 50.000 kr. fluttar av 5365 Stuðul til ítrótt á 4119 Sankta Frans skúli
e) 36.000 kr. fluttar av 5365 Stuðul til ítrótt á 4122 Skúlin við Løgmannabreyt.

**Mentamálanevndin 16. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2021 við teimum broytingum, ið mentamálanevndin hevur samtykt og harumframt samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum við aðru viðgerð við niðanfyristandandi broytingum.

| **Deild** | **Konta** | **Navn** | **Viðmerkingar** | **Upphædd** |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | **Inntøkur:** | | |
| | | - | | |
| §20-20801 | 618000 | Skattur av eftirlønarinngjøldum | Nýggj inntøkumeting frá FMR | 5.785 |
| §20-20802 | 781000 | Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | Nýggj inntøkumeting frá FMR | -1.509 |
| | | | | |
| | | **Inntøkur íalt** | | **4.276** |
| | | | | |
| | | **Rakstur:** | - | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| §5-5365 | 161000 | Stuðul til ítrótt | Umlegging av játtanini til ókeypis hallarleigu, samtykt frá mentamálanevndini 16.11.20 í máli 20/03416: | -3.079 |
| §4-4122 | 161000 | Skúlin við Løgmannabreyt | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 36 |
| §4-4115 | 161000 | Kollafjarðar skúli | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 16 |
| §4-4118 | 161000 | Eysturskúlin | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 135 |
| §4-4119 | 161000 | Sankta Frans skúli | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 50 |
| §5-5717 | 161000 | Ítróttaranlegg | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 2.842 |
| | | | | |
| §4-41xx | 146900 | Undirvísing | Fólkaskúlar, dagført næmingatal | -192 |
| §4-4142 | 712000 | Fólkaskúlin, aðrar útreiðslur | Samsýning til forfólk í skúlastýrum, FN 16.09.20, 20/01658-1 | 36 |
| §4-4142 | 731000 | Fólkaskúlin, aðrar útreiðslur | Eftirskúlar og fígging av rakstri, FN 21.10.20, 20/03578-1 | 210 |
| | | | | |
| | | **Rakstur íalt** | | **54** |
| | | | | |
| | | **<u>Íløgur:</u>** | - | |
| | | | | |
| §3-3175 | 31 | Barnaansing | Frítíðarskúlin við Botnánna í Kollafirði | 2.000 |
| §5-5575 | 31 | Søvn og mentanararvur | Býarsavn | 1.500 |
| §5-5775 | 31 | Ítróttaranlegg | Langhylur | -3.500 |
| §5-5775 | 31 | Ítróttaranlegg | Venjingarhøli í Kollafirði | 1.000 |
| | | | | |
| §6-6275 | 31 | Fríðkan av kommununi | Gamla brúgvin um Sandá | 2.500 |
| §6-6275 | 31 | Fríðkan av kommununi | Vetrarfriðing | 700 |
| §6-6275 | 31 | Fríðkan av kommununi | Torg frammanfyri FSF | 6.000 |
| §6-6275 | 31 | Fríðkan av kommununi | Fiskastykkið | 500 |
| | | | | |
| | | **Íløgur íalt TK** | | **10.700** |
| | | | | |
| | | **Broyting íalt** | | **-6.478** |

**Ískoyti:**
Rætting til omanfyri standandi talvu. Vísandi til samtyktina í býráðnum tann 29.10.20, skal 1. mió játtast til yvirtøku av Gundadalshøllini. Játtanin til Torg frammanfyri FSF verður 5 mió.

**Broytingar til aðru viðgerð í Býráðnum 26.11.20**

| Deild | Konta | Navn | Viðmerkingar | Upphædd |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | <u>**Inntøkur:**</u> | | |
| | | | | |
| | | - | | |
| §20-20801 | 618000 | Skattur av eftirlønarinngjøldum | Nýggj inntøkumeting frá FMR, BÝ 29.10.20, 1. viðgerð | 5.785 |
| §20-20802 | 781000 | Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | Nýggj inntøkumeting frá FMR, BÝ 29.10.20, 1. viðgerð | -1.509 |
| | | | | |
| | | **Inntøkur íalt** | | **4.276** |
| | | | | |
| | | <u>**Rakstur:**</u> | - | |
| | | | | |
| §5-5365 | 161000 | Stuðul til ítrótt | Umlegging av játtanini til ókeypis hallarleigu, samtykt frá mentamálanevndini 16.11.20 í máli 20/03416: | -3.079 |
| §4-4122 | 161000 | Skúlin við Løgmannabreyt | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 36 |
| §4-4115 | 161000 | Kollafjarðar skúli | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 16 |
| §4-4118 | 161000 | Eysturskúlin | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 135 |
| §4-4119 | 161000 | Sankta Frans skúli | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 50 |
| §5-5717 | 161000 | Ítróttaranlegg | Broyting mentamálanevndin 16.11.20, 20/03416 | 2.842 |
| | | | | |
| §4-41xx | 146900 | Undirvísing | Fólkaskúlar, dagført næmingatal | -192 |
| §4-4142 | 712000 | Fólkaskúlin, aðrar útreiðslur | Samsýning til forfólk í skúlastýrum, FN 16.09.20, 20/01658-1 | 36 |
| §4-4142 | 731000 | Fólkaskúlin, aðrar útreiðslur | Eftirskúlar og fígging av rakstri, FN 21.10.20, 20/03578-1 | 210 |
| | | | | |
| | | **Rakstur íalt** | | **54** |
| | | | | |
| | | <u>**Íløgur:**</u> | - | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| §3-3175 | 31 | Barnaansing | Frítíðarskúlin við Botnánna í Kollafirði | 2.000 |
| §5-5575 | 31 | Søvn og mentanararvur | Býarsavn | 1.500 |
| §5-5775 | 31 | Ítróttaranlegg | Langhylur | -3.500 |
| §5-5775 | 31 | Ítróttaranlegg | Venjingarhøli í Kollafirði | 1.000 |
| | | | | |
| §6-6175 | 31 | Umsiting og røkt av fastari ogn | Yvirtøka av Gundadalshøllini, BÝ 29.10.20, 1. viðgerð | 1.000 |
| §6-6275 | 31 | Fríðkan av kommununi | Gamla grótbrúgvin um Sandá í Havnadali, BÝ 29.10.20, 1. viðgerð | 2.500 |
| §6-6275 | 31 | Fríðkan av kommununi | Vetrarfriðing, BÝ 29.10.20, 1. viðgerð | 700 |
| §6-6275 | 31 | Fríðkan av kommununi | Torg frammanfyri FSF | 5.000 |
| §6-6275 | 31 | Fríðkan av kommununi | Fiskastykkið | 500 |
| | | | | |
| | | **Íløgur íalt TK** | | **10.700** |
| | | | | |
| | | **Broyting íalt** | | **-6.478** |

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Annika Olsen legði fram uppskot um at taka undir við fíggjarætlanini við broytingunum til aðru viðgerð og harumframt at játta kr. 4 mió. afturat til kirkjuna á Argjum konta 5370 Stuðul til íløgur og 5 mió. kr. til konta 3175 Barnaansing løgukonta. Eisini varð skotið upp at áseta kommunuskattaprosentið til 19% og barnafrádráttin til kr. 8.000.

Atkvøtt varð um fíggjarætlanina við broytingunum til aðru viðgerð og broytingaruppskotið frá Anniku Olsen, ið varð einmælt samtykt.

Fíggjarætlanin fyri 2021 soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

# 288/20 Eykajáttan oktober 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 292/20 | 20/03794-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 244/20 | 20/03794-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 288/20 | 20/03794-1 |

**Upprunin til málið:**
Inntøkurnar í árinum hava verið hægri enn mett, og gevur hetta møguleika fyri at hækka inntøkur og útreiðslur í inniverandi fíggjarætlanin. Inntøkur frá felagsskattinum í 2020 hava verið 19,7 mió.kr hægri enn upprunaliga mett. Inntøkur higartil í ár annars eru áleið 3% hægri enn mett í fíggjarætlanini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Krav til eykajáttan**
Eykajáttan krevst, tá ið ein samtykt fíggjarætlan verður broytt, verið seg hækking ella lækking av inntøkum og/ella útreiðslum. Uppskot til fígging skal altíð fylgja við eini eykajáttan. Eykajáttanir skulu vera samtyktar í býráðnum við aðru viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.

Í árinum er játta av tøkum peningi til niðanfyri standandi:

**Skúlin á Fløtum, innbúgv og kt-útgerð**
Víst verður til mál 14/03408 Nýggjur skúli í vesturbýnum, har ið Býráðið 28. mai 2020 og 11. juni 2020 við eykajáttan samtykti at játta 6,82 mió.kr til innbúgv og útgerð.

***Umlættingar- og endurvenjingardepiln, endurgjald til eigarafelag***
Víst verður til mál 20/01297 30. apríl 2020, har ið Býráðið samtykti at játta 2.246.086 kr til eigarafelagið fyri luttøku kommununna í útstykkingini.

***Aðrar inntøkur***
Eftir at m.a útreiðslur í samband við corona eru rindaðar av hesi kontu, er neyðugt at 1,3 mió.kr verða játtaðar, um kontan ikki skal hava hall.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | Býráðsfundur<br>26. november 2020 | Blað nr.: 1194<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at umrøða málið.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at játta av tøkum peningi soleiðis:

| **Eykajáttan oktober** | |
|---|---|
| Afturkeyp av grundøki Karlamagnussarbreyt | 4.600 |
| Ferðslutrygd, gøtur, spælipláss Karlamagnusarbreyt | 3.000 |
| Spælipláss í kommununi | 2.000 |
| Býlingshúsið Vesturi á Flat, útiøki | 1.000 |
| Endurvenjing | 1.000 |
| Útkalliskipan til sløkkiliðið | 980 |
| Heilsutænastur í Nólsoy | 800 |
| Leigusáttmáli Drotning Ingridar | 640 |
| Felagshús til ítrótt á Tórsbreyt | 500 |
| Fablab | 350 |
| Vælferðartøkni | 200 |
| Listasavnið | 150 |
| Byggimálsavgreiðsla | 900 |
| Fyrisitingartímar til leiðarar á dagstovnaøkinum | 2.300 |
| | **18.420** |

Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Samlað yvirlit játta av tøkum peningi, at samtykkja við aðru viðgerð:

| **Játtan av meirinntøkum 2020** | |
|---|---|
| Eykajáttan til skúlan av Fløgum 14/03408 | 6.820 |
| URD, endurgjald til eigarafelag | 2.246 |
| 20910 Aðrar inntøkur | 1.300 |
| Játtan íalt av meirinntøkum 2020 | **10.366** |

| **Eykajáttan oktober** | |
|---|---|
| Afturkeyp av grundøki Karlamagnussarbreyt | 4.600 |

| | |
|---|---|
| Ferðslutrygd, gøtur, spælipláss Karlamagnusarbreyt | 3.000 |
| Spælipláss í kommununi | 2.000 |
| Býlingshúsið Vesturi á Flat, útiøki | 1.000 |
| Endurvenjing | 1.000 |
| Útkalliskipan til sløkkiliðið | 980 |
| Heilsutænastur í Nólsoy | 800 |
| Leigusáttmáli Drotning Ingridar | 640 |
| Felagshús til ítrótt á Tórsbreyt | 500 |
| Fablab | 350 |
| Vælferðartøkni | 200 |
| Listasavnið | 150 |
| Byggimálsavgreiðsla | 900 |
| Fyrisitingartímar til leiðarar á dagstovnaøkinum | 2.300 |
| | **18.420** |

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

## 289/20 Eykajáttan november 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 315/20 | 20/04370-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 289/20 | 20/04370-1 |

**Upprunin til málið**
Inntøkurnar í árinum hava verið hægri enn mett, og hevur hetta givið møguleika fyri at hækka inntøkur og útreiðslur í inniverandi fíggjarætlan fyri 2020.

Eykajáttan krevst, tá ið ein samtykt fíggjarætlan verður broytt, tað verið seg hækking ella lækking av inntøkum og/ella útreiðslum. Uppskot til fígging skal fylgja við eini eykajáttan. Eykajáttanir skulu vera samtyktar í býráðnum við aðru viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.

**Lýsing av málinum, samandráttur**
Samlaðu meirinntøkurnar í árinum vóru í oktober 61,8 mió.kr. Av hesum eru 18,2 mió.kr. meirinntøkur frá felagsskatti og 18,8 mió.kr. eru reguleringin fyri 2019.
Samtykt er at játta tilsamans 28,8 mió.kr. av meirinntøkum. Mál nr. 20/03794.

Meirnýtsla hevur verið á einstøkum rakstrarstøðum, sum ikki hava fingið neyðuga játtan.
Mælt verður til, at játta pening til til hesi rakstrarstøð:

| **Rakstrarstøð sum tørva eykajáttan í 2020:** | |
|---|---|
| 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju | 3.000 |
| 2617 Brúkaragjøld, serstovur | 2.300 |
| 2810 Fíggjarligt frípláss | 300 |
| 3213 Systkinaavsláttur | 4.800 |
| 3212 Tímar vegna serligan tørv | 3.000 |
| **Rakstrarstøð sum tørva eykajáttan í 2020** | **13.400** |

**2613 Børn sett heiman í fosturfamilju**
Talan er um lógarbundna játtan sambært barnaverndarlógina í sambandi við umsorganaryvirtøku av barni.

Við árslok 2019 hevði kontan eina meirnýtslu uppá kr. 972.000. Orsøkin var stór útreiðsluøking frá kr. 12,8 mió í 2018 til kr. 15,7 mió í 2019, sum játtanin ikki hevði tikið hædd fyri. Gongdin pr. oktober 2020 gevur ábending um, at útreiðslurnar verða umleið kr. 17,2 mió í ár, og samlaða meirnýtslan (2019 íroknað) verður uml. kr. 3,1 mió.

Orsøk til hesa hesa gongd er stór øking í talinum av børnum sett heiman í fosturfamilju. Í 2018 vóru í miðal 47 børn i skipanini, í 2019 var talið í miðal 50, og higartil í 2020 er talið komið uppá uml. 60 børn. Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 eru settar av kr. 16,5 mió.

**2617 Brúkaragjøld, serstovur**
Talan er um lógarbundna játtan sambært barnaverndarlógina í sambandi við umsorganaryvirtøku av barni.

Við árslok 2019 hevði kontan eina meirnýtslu uppá kr. 1, mió, harav meirnýtsla kr. 330.000 var frá árinum 2018. Eins og konta 2613 hevur henda konta havt stóra útreiðsluøking síðstu árini. Í 2018 vóru útreiðslurnar kr. 2,4 mió og í 2019 kr. 3,1 mió. Við støði í útreiðslunum pr. oktober 2020 verða útreiðslurnar fyri alt 2020 mettar til uml. kr. 4,4 mió. Lagt er ikki upp fyri hesum í játtanini til 2020, og mett verður tí samlað meirnýtsla uppá kr. 2,5 mió.

Eins og við kontu 2613 er vøkstur í talinum av børnum (eisini familjum) í skipanini orsøk. Í 2018 vóru í miðal 7 børn í skipanini, í 2019 var talið í miðal 10, og higartil í 2020 er talið komið uppá 15.

**2810 Fíggjarligt frípláss**
Talan er um lógarbundna játtan sambært sambært dagstovnalógini.

Við árslok 2019 hevði kontan eina meirnýtslu uppá kr. 399.000. Játtanin í 2020 er kr. 4,2 mió. Væntaða nýtslan pr. november 2020 er kr. 4,25 mió, men vegna meirnýtsluna í fjør hevur kontan eina væntaða samlaða meirnýtslu uppá uml. kr. 450.000.

Barnatalið í dagstovnaaldri er vaksið nógv síðstu árini og foreldragjaldið er hækkað.

**3213 Systkinaavsláttur**
Talan er um avsláttarskipan, sum kommunan hevur sett í verk, har foreldur gjalda einans fyri yngsta barnið á stovni.

Kontan hevur havt meirnýtslu síðani 2017, tá við kr. 431.000. Í 2018 lækkaði meirnýtslan til kr. 334.000, hetta í sambandi við, at játtanin hækkaði við uml. kr. 1 mió til kr. 10 mió, men í 2019 vaks meirnýtslan við kr. 2,8 mió. Hóast játtanin í 2020 hækkaði til kr. 11,5 mió, so er gongdin pr. november 2020, at nýtslan verður uml. kr. 13,1 mió. Samlað meirnýtsla verður tá uml. kr. 4,7 mió.

Í 2017 var útreiðslan kr. 9,2 mio. Stóri vøksturin í barnatalinum hesi ár – í dagstovnaaldri nærum 200 børn, er høvuðsorsøk til hækkingina. Aftrat er hækka foreldragjald.

**3212 Tímar vegna serligan tørv**
Talan er um skipan við støði í dagstovnalógini § 5 um námsfrøðilig tilboð til børn við serligum tørvi.

Útreiðslugongdin í 2019 og 2020 er hægri enn árini frammanundan. Í 2018 var útreiðslan kr. 9,2 mió, meðan hon í 2019 var kr. 11,5 mió, og framroknað pr. oktober 2020 væntast útreiðslan at verða kr. 12,8 mió. Samlaða meirnýtslan í 2020 verður væntandi uml. kr. 3 mió.

Orsøk til hetta er lutvíst hækkaða barnatalið, men í størri mun vaksandi tørvur bæði á eyka tímum í vanligum stovum og vaksandi tørvur á serstovum, har nógv færri børn og nógv fleiri starvsfólk eru enn í vanligari stovu.

Umleið 125 børn fáa eyka tímar av hesi kontu á vanligari stovu, men haraftrat eru 24 børn á serstovu, sum krevja nógv fleiri tímar. Hesari broyting rúmar játtanin ikki, og í sambandi við fíggjarætlanina 2021 er tí eisini lagt upp til at skipa eina serstovunormering burturav umframt játtan til endamálið.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávísøkir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingarligar avleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvislgar avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli**:
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til, at ein partur av avlopinum av meirinntøkum, 13,4 mió. kr. verður nýtt at fíggja omanfyri standandi.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

## 290/20 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 64/20 | 20/00203-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 48/20 | 20/00203-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 83/20 | 20/00203-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 106/20 | 20/00203-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 86/20 | 20/00203-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 138/20 | 20/00203-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 110/20 | 20/00203-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 181/20 | 20/00203-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 160/20 | 20/00203-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 235/20 | 20/00203-1 |
| 11 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 207/20 | 20/00203-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 268/20 | 20/00203-1 |
| 13 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 245/20 | 20/00203-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 316/20 | 20/00203-1 |
| 15 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 290/20 | 20/00203-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmáláráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars at góðkenna.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

## 291/20 Føroyskt Íslandsrossafelag : Umsókn um víðkan av øki felagsins við Kráarheygg í Havnardali (2006-0321)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 178/17 | 17/02798-12 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 172/17 | 17/02798-12 |
| 3 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 198/17 | 17/02798-12 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 117/20 | 17/02798-12 |
| 5 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 46/20 | 17/02798-12 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 183/20 | 17/02798-12 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 298/20 | 17/02798-12 |
| 8 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 291/20 | 17/02798-12 |

**Málslýsing:**
**33/06 2006-0321**

**Føroyskt Íslandsrossafelag, umsókn um víðkan av øki felagsins undir Kráarheyggi í Havnardali.**
**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Føroyskt Íslandsrossafelag søkir um víðkan av leiguøkinum til ríðivirksemi í Havnardali.
Umboð felagsins hava verið á fundi við umsitingina og avrátt varð at søkja um at víðka økið samsvarandi hjáløgdu tekning.
Matr. nr. partur av 1160a Flatnahagi.
Eigari: Tórshavnar kommuna.
Leigari: Júst Rubeksen.
Vídd: 60.260 m² (gl. øki. 28.520 m²).
Byggisamtykt: D2 ítróttur (partur av økinum) Harav 21.150m² eru í 4. grundumráði**.**

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at ganga umsóknini á møti og at beina málið til fíggjarnevndina at gera nýggjan sáttmála við Føroyskt Íslandsrossafelag og at boða verandi leigara frá broytingunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at broyta leigusáttmálan samsvarandi.

**Býráðið 23. februar 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Samskift hevur verið við felagið um leigusáttmálan. Avtalað varð at brúka verandi sáttmála við teirri broyting, at víddin framyvir verður 60.260 m2, vísandi til. kortuppdráttinum í málinum. Við broytingini koma tey nýggju fjósini, sum felagið í næstum fer at byggja í Havnadali, at vera á økinum ið felagið leigar.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at gera ískoyti til sáttmálan, dagfestur 19. november 1992, soleiðis, at víddin framyvir verður 60.260 m2.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Málið er avgreitt.

**Ískoyti:**
Felagið hevur sent kommununi umsókn um at verandi leigusáttmáli verður longdur til 15. mai 2048.

Sambært telefonsamrøðu við umboð fyri felagið framgongur, at limirnir og felagið gera dýrar íløgur í byggibúning og bygging av fjósum. Íløgan í eitt fjós við uml. 5. básum liggur millum kr. 0,5 til eina millión kr. Tað veldst um hvussu nógv eigararnir klára at gera sjálvir. Í samband við bygging stendur felagið fyri sjálvari byggibúningini av lendinum, og rinda fjósaeigarar tá eitt brúksgjald til felagið, sum svarar til tær útreiðslur, felagið hevur havt av byggibúningini. Umboðið fyri felagið vísir á, at íløgurnar í fjósini eru sera stórar, og er ynski hjá felagnum at fáa tryggari viðurskifti, vegna limirnar, sum í sínum lagi gera stórar íløgur.

Grein 1 í verandi sáttmála er soljóðandi.

Leigumálið tekur við tá hesin sáttmálin er undirskrivaður og kann av hvørgum partinum uppsigast fyrr enn við eitt ára fyrivarningi til 15. maj 2028, sbr. tó. gr. 6 og gr. 7.

Galdandi sáttmáli er dagfestur 13.09.2017

Skotið verður upp, at sáttmálin verður óbroyttur galdandi, tó við teirri broyting at grein 1. verður broytt soleiðis:

Leigumálið tekur við tá hesin sáttmálið er undirskrivaður, og kann av hvørgum partinum uppsigast fyrr enn við eitt ára fyrivarningi til 15. maj 2048, tó sambært grein 6 og grein 7 í sáttmálanum.

Ískoyti verður gjørt til verandi sáttmála.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipanarliga verður víst á, at tað er týdningarmikið, at virksemið felagsins ikki steðgar menningini av býnum.

Í longri tíð hevur verið arbeitt við vegalinjuni av innkomuvegnum, sum í síni heild gongur allan vegin frá Kalbaksvegnum til Kirkjubøarvegin. Vegalinjan, sum er løgd av Landsverki, gongur beinleiðis gjøgnum økið í Havnardali, har rossavirksemið er, og kommunan vil arbeiða fyri, at hon verður løgd øðrvísi, men er enn ikki víst hvat endaliga úrslitið verður.

Um kommunan leingir sáttmálan, og vegalinjan, sum nú fyriliggur, ikki verður broytt, so bindur kommunan seg til at rinda felagnum fyri tær útreiðslur, sum felagið hevur lagt í økið.

Grundað á hesa støðu, og ivamálið hvørs tað verður gjørligt at flyta fyriliggjandi vegalinju, og av tí at hetta er eitt arbeiðið, sum er sett á breddan millum kommununa og Landsverk, so verður mælt til at bíða við at leingja sáttmálan inntil arbeiðið við vegalinjuni er komið longri.

Verandi sáttmáli gongur ikki út fyrr enn í 2028, og tí er ikki neyðugt at broyta sáttmálan enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at bíða við at leingja sáttmálan inntil arbeiðið við vegalinjuni fyri innkomuvegnum er liðugt og beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Ein meiruluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, mælir til at leingja sáttmálan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Bogi Andreasen, Helena Dam á Neystabø og Annfinn Brekkstein, mælir til at ganga umsóknini á møti, at leingja sáttmálan til 2048.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Turið Horn, tekur undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 25. november 2020: Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini at leingja sáttmálan við tí fyrivarni**,** at skal kommunan brúka økið í sambandi við framtíðar vegagerð, skal leigarin fara av økinum uttan endurgjald fyri tað, ið er lagt í økið, men samstundis fáa ávíst annað øki til virksemi sítt og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |